# GERÐABÓK

**Dato:** 26. februar 2026 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 26/26-69/26

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Birgir Nielsen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Fríður P. Dalsgarð
Hermann Mortensen
David Andresen
Jeanette Ellefsen Blaasvær
Øssur Patursson
Mortan Simonsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Olga Knudsen/Anna Havmand

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 85<br>Forkvinnunnar merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðir**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 26/26 | 26/00448-1 | Mál beind í nevndir 2026 | 87 |
| 27/26 | 26/01042-1 | Dagføring av Skúlum og spæliplássum | 89 |
| 28/26 | 25/03150-5 | Oyggjaleikir 2027 - ítróttahallir, vallir v.m. | 92 |
| 29/26 | 26/00714-1 | Dagføringar í Svimjihøllini í Gundadali - 2025 | 97 |
| 30/26 | 25/10176-2 | Gøtunavnanevndin: Brýr um Sandá – Brúgv 6 | 99 |
| 31/26 | 25/10177-2 | Gøtunavnanevndin: Brýr um Sandá – Brúgv 7 | 101 |
| 32/26 | 25/10178-2 | Gøtunavnanevndin: Brýr um Sandá – Brúgv 8 | 103 |
| 33/26 | 25/01117-1 | Umvæla gamla Argja skúla til frítíðartilboð hjá 3.-6. flokk og undirvísingarhølir hjá Gula skúla - 24/07481 | 105 |
| 34/26 | 25/01714-1 | Betra akustiskta inniumhvørvið (ljóðviðurskifti) á dagstovnunum | 108 |
| 35/26 | 26/00534-1 | Viðv. játtan 2026 til uttanumøkið á dagstovnaøkinum | 114 |
| 36/26 | 26/01053-1 | Útbygging. Lonir til Skúlan á Fløtum | 116 |
| 37/26 | 26/01054-1 | Útbygging. Lonir til skúlan á Argjahamri | 118 |
| 38/26 | 25/02301-1 | Torg í Hoyvík - 22/00327 | 121 |
| 39/26 | 25/09430-1 | Íverksetan av rakstrarstovninum Lendis- og kirkjugarðstænastan | 124 |
| 40/26 | 25/10998-5 | Útstykking oman fyri Argjahamar – øki 4 - 23/05733 | 129 |
| 41/26 | 25/04939-5 | Hegn kring viðarlundina í Havnardali | 132 |
| 42/26 | 25/02597-2 | Sauna/saunagos í Tórshavnar kommunu - 23/04346 | 134 |
| 43/26 | 25/02905-4 | Dagføring av sertstøku byggisamtyktini fyri Argjaboða, matr. nr. 43g og 43h, Argir | 142 |
| 44/26 | 25/00581-2 | Útstykking til sethús við Stórutjørn - 22/02943 | 145 |
| 45/26 | 26/00599-1 | Fjarhiti til útstykkingina Stórutjørn | 151 |
| 46/26 | 26/00219-1 | Átøk á vegnum Úti á Heyggi og á Bakkavegnum á Velbastað | 153 |
| 47/26 | 25/09594-2 | Fjallasúkklubreyt til Oyggjaleikir 2027 | 155 |
| 48/26 | 25/10813-1 | Keyp av tunnilsgróti frá EST | 159 |
| 49/26 | 26/00500-1 | Kanningar í sambandi við møguligan parkeringstunnil í Havn - 19/01708 | 162 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 50/26 | 26/00526-1 | Dagføring av kloakk leiðingum Mikkjalstrøð, Tórshavn - 20/03621 | 164 |
| 51/26 | 25/00255-1 | Fígging til smærri verkætlanir - 21/01164 | 166 |
| 52/26 | 25/01183-26 | Fráboðan um vegskráningin á matr. nr. 23l, Velbastað er so illa frágingin, at tað ríður undan vegnum oman á matr. nr. 23k, Velbastað (2009-0525) - 14/00178 | 168 |
| 53/26 | 25/04926-15 | Vatntrupulleikar, við Sjógv 64, matr. nr. 154, Kollafjørður - 20/03632 | 170 |
| 54/26 | 26/00650-1 | Verkætlan øki BX1-BX4 - Nýggj havleiðing á Kjalnesi | 172 |
| 55/26 | 25/00315-1 | Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali | 175 |
| 56/26 | 25/00087-1 | Ruskplássið í Kollafirði - 23/00546 | 179 |
| 57/26 | 25/00207-1 | Umhvørvispolitikkur 2024 - 2030 | 183 |
| 58/26 | 26/00687-1 | Raðfesting av konto 6177 – Umsiting og røkt av bygningum, orkuátøk fyri 2026 | 187 |
| 59/26 | 25/04357-17 | Elinnlegging á Bacalao | 190 |
| 60/26 | 26/01201-1 | Nevndarval til nevndina í P/F Visit Faroe Islands 2026 | 193 |
| 61/26 | 26/01384-1 | Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval í Tórshavn | 194 |
| 62/26 | 26/01386-1 | Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval á Argjum | 195 |
| 63/26 | 26/01387-1 | Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval í Kollafirði | 196 |
| 64/26 | 26/01388-1 | Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval í Hoyvík | 197 |
| 65/26 | 25/00349-4 | Møgulig yvirtøka av bygninginum - Gamla Hospital - matr. nr. 220d, Sigmundargøta 25, Tórshavn | 198 |
| 66/26 | 25/05489-1 | Keypari av vinnustykkið nr. 26 á Ovara Hjalla, letur stykkið innaftur til kommununa. | 202 |
| 67/26 | 26/00100-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2026 | 204 |
| 68/26 | 25/05986-1 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum - 21/02924 | 206 |
| 69/26 | 25/11161-4 | Umsókn frá Landsverk um undantak viðvíkjandi støðini á Sornfelli | 216 |

**Til viðgerðir**

## 26/26 Mál beind í nevndir 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 3/26 | 26/00448-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 26/26 | 26/00448-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Framlagt.

# 27/26 Dagføring av Skúlum og spæliplássum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 12.02.2026 | 9/26 | 26/01042-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 17/26 | 26/01042-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 27/26 | 26/01042-1 |

**Upprunin til málið**
Størri viðlíkahald av skúlabygningum og skúlar, uttanumøkið

**Lýsing av málinum**

Ventilasjón á Løgmannabreyt:
Í 2019 gjørdi RAM Sp/F Ráðgevandi verkfrøðingur frágreiðing um inniluftina í Skúlanum við Løgmannabreyt. Frágreiðingin staðfestir at tað er eingin ivi um, at verandi "náttúrliga" ventilatiónsloysn er avbjóðandi fyri inniumhvørvið og fyri lærarirnar og skúlanæmingarnar. Er vindurin yvir 10m/s, so fáa skúlastovurnar onga fríska luft yvirhøvur. Tí eigur at verða skift yvir til mekaniska ventilatión skjótast tilber, og harvið betra munandi um inniumhvørvið alt árið. Við mekaniskari ventilatión fær man stýr á inniumhvørvið, og sleppur undan gjóstri og larmi, nakað lærarar og skúlanæmingarnir klaga yvir. Mælt verður til at gera tvær lonir fyrst (4 skúlastovur) og fáa royndirnar av hesum, Arbeiðið at skifta tvær lonir kann gerast í summarferiuni, uttanfyri skúlatíð, men innanfyri vanliga arbeiðstíð.

Skúlar, uttanumøkið:
Skúlarnir í Tórshavnar kommunu hava havt eina árliga rakstrarjáttan á konto 4140 til spælipláss og útiøki skúlans. Í FÆ2026 er hendan játtan á tvær mió kr. sett av sum íløga. Mentamáladeildin hevur í samráð við skúlaleiðarar gjørt av, at Bygningsdeildin og skúlaleiðslur í felag finna ein leist fyri keyp av útbúnað til útiøki skúlans. Skúlar í Tórshavnar kommunu søkja og fáa játtan um stuðul til útiøki innanfyri verandi játtan á 2 mió kr. Allar umsóknir vera lagdar fyri Trivnaðarnevndina til støðutakan, tá ið Mentamáladeildin hevur viðgjørt umsóknirnar og mælt til hvørjar vera raðfestar.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
25/01675 Viðgerð av umsóknum um útiøkjum hjá skúlunum
21/04561 Útiøkir hjá skúlum, umsóknir og játtanir

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

| | Býráðsfundur<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 90<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| LK41020 | karmur | Størri viðlíkahald av skúlabygningum og skúlar, uttanumøkið | 4175 | Løga | Ventilasjón á Løgmanna-breyt | Ja | 2.000.000 |

☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| LK41020 | karmur | Størri viðlíkahald av skúlabygningum og skúlar, uttanumøkið | 4175 | Løga | Skúlar, uttanumøkið | Ja | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 5.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 / 2028 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | neutralt |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin fyri bygningsdeildina mæla nevndini til at samtykkja at flyta 4 mió kr. av LK 41020 til tvær ymiskar løgukontur á 4175; ventilasjón á Løgmannabreyt og Skúlar, uttanumøki.

**Trivnaðarnevndin 12. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Kristianna Winther Poulsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

Klik eller tryk her for at skrive tekst.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

# 28/26 Oyggjaleikir 2027 - ítróttahallir, vallir v.m.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.06.2025 | 87/25 | 25/03150-5 |
| 2 Mentamálanevndin | 05.11.2025 | 116/25 | 25/03150-5 |
| 3 Mentamálanevndin | 11.02.2026 | 31/26 | 25/03150-5 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 18/26 | 25/03150-5 |
| 5 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 28/26 | 25/03150-5 |

**Upprunin til málið**
Dagføring av ítróttafasilitetum til OyL2027.

**Lýsing av málinum**
Tey sersambond, sum hava skulu hava sína ítróttagrein í TK, hava sent inn eina fyribils tørvslýsing av tí sum krevst, fyri at fáa sína kapping avgreidda.
Í løtuni er talan um áleið 5,5 mió kr. Tá vit næstu mánarnir kava niður í hetta øki, renna vit okkum væntandi í ymiskt, sum kjak verður um. Sostatt kann hetta talið bæði økjast ella lækkast.

Súkklusambandið er tó ikki komi á mál við einari tørvslýsing. Her er tað serliga ein breyt fjallasúkkling, sum lýkur altjóða krøv, sum manglar.

Tórsbreyt, sum bleiv bygd í 2008, er blivin 17 ár, og er sostatt komin inn í tað intervallið, at hon er við at eldast. Undir vanligum umstøðum sigur man at rennibreytir halda 15-20 ár.

Í løtuni verður arbeitt við at kanna rennibreytina til OyL2027. Fyribils úrslitini eru at rennibreytin ikki lýkur tær treytir IAAF (World Athletic) setir, fyri at fáa úrslit góðkend. Avbjóðingar eru eisini við kastibúrinum og øðrum hentleikum á breytini. Harafturat verður breytin kanna um hon er blivin ov hørð – alt talar í løtuni fyri hesum.
Kringumstøðurnar til at hava oyggjaleikir við rennibreytina mugu dagførast. S.s. áskoðarapláss, skiftingarrúm, tekniskt útgerð, goymsla og bíðirúm til íðkarar. Í næstum má støða takast til, um hetta verður gjørt sum nakrir fastir fasilitetir ella partvíst sum fyribilsloysnir.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 93 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | LK57049 | Ljósskipanir á Ítróttarøkinum | 5775 | Nýggj Verkætlan | | | 3.000.000 kr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:
- at flyta kr. 3.000.000 kr. av løgukonto 5775 LK57049, Oyggjaleikir 2027, á nýggja projektkonto, við heitinum “Tórsbreyt - umvæling”.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 04. juni 2025:** Nevndin samtykti at bjóða arbeiði út og síðani at koma aftur í nevnd.

**Ískoyti:**
Gongdin í málinum við rennibreytina hevur higartil verið fylgjandi:
Umsitingin hevur samskift við bæði, Bragdið, Hvirluna og FÍF um hvørji ynski tey hava í samb. við nýggja rennibreyt.
Í høvuðsheitum hava tey ynskt, at nú TK ger nýggja breyt, so er ymisk útgerð sum antin manglar, ella má broytast eitt vet. Eitt nú kastibúrið. Harumframt hava tey ynskt at í hvussu onnur langsíðan broytist frá at vera 6 geilar til 8 geilar á 110m

Eksternur ráðgevi er innyvir verkætlanina, og hevur verið við í allari tilgongdini síðani í summar. Ráðgevin er biðin um at gera útbjóðingartilfar, ið kann nýtast til at innheinta tilboð frá arbeiðstakarum, sum kunnu projektera og byggja eina rennibreyt sambært altjóða krøvum, í hesum førinum World Athletics 2 sertifikat, og samstundis er dentur lagdur á, at tilfarið ikki skal avsmitta. Harumframt er ráðgevin komin við einari kostnaðarmeting. Kostnaðarmetingin liggur viðheft í málinum.
Í sínari vegleiðing til TK, metir ráðgevin, at høvuðsarbeiðstøka er besta loysn fyri tílíka verkætlan. Hetta er m.a. tí at hon umfatar jørðarbeiði, sum føroysk fyritøka tekur sær av, men eisini tí at tað bert eru

útlendskir undirveitarar sum kunnu leggja belegningin á. Í sovorðnum førum kann tað verða torført at skrúva eitt útboð saman eftir galdandi reglum við garantiskyldum o.l. Ein føroyskur høvuðsarbeiðstakari kann veita hesa trygd sbrt. ABF06.

Í samskiftiinum við bæði ráðgeva og feløgini er staðfest, at til ber at gera vestaru síðu til 110 metrar breyt við 8 geilum. Harumaframt hevur ráðgevin staðfest, at tilber at uppstiga rennibreytina til Cat IV. Til hetta krevst onkrar broytingar av verandi breyt, og tikið verður eitt sindur av vestaru síðu av grasvøllinum.

**Tilmæli**
Trivnarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 05. november 2025:** Umrøtt.

## Ískoyti

**Ráðgevarasáttmáli**
Umsitingin hevur verið í samráðingum við MAP ARKITEKTAR um avtalu á tekniska ráðgeving viðvíkjandi útbygging av Tórsbreyt. Avtalan fevnir um tekniska ráðgeving og stuðul í sambandi við projektering og útbygging av Tórsbreyt. Henda avtalan umfatar ráðgeving viðvíkjandi:
Skipanaruppskot
Prosjektuppskot
For-/myndugleikaprojekt
Høvuðsprosjekt
Prosjekteringsleiðsla
Útboð og kontrahering
Eftirlit
Byggileiðsla
Prosjektuppfylging
Mangulgjøgnumgongd
AS-Built tilfar, niveau 2.
Skipan av avhending og mangulgjøgnumgongd
Skipan av 1 árs garantisýn
Fíggjarliga grundarlagið fyri verkætlanini er sambært grein 4.3. í rágevarasáttmálanum.
Samsýning ráðgevans er avtalað at vera føst samsýning sambært ABR89, grein 3.1.1.1., avtalað at vera:

kr. 689.000 u/mvg

**Tilboð á arbeiðstakarum á Tórsbreyt - Umvæling**
Í januar 2026 bjóðaði umsitingin arbeiðið á útskifting og víðkan av Tórsbreyt út í høvuðsarbeiðstøku. Ráðgevin mælti til, at 9 arbeiðstakarar vórðu bodnir við til innbodna lisitatión. Hesi vóru:
Andrias Berg, Articon, Grettir, J&K Petersen, Konsax, Maskingrevstur, Maskinkoyring Entreprenørar, Plan, RTS Contractors.

3 høvuðsarbeiðstakarar veittu tilboð áljóðandi:

| | |
|---|---|
| Articon | kr. 9.143.592 u/mvg |
| Grettir | kr. 7.535.268 u/mvg |
| J&K Petersen | kr. 8.934.530 u/mvg |

Umsiting hevur verið í samráðingum við lægsta tilboðsveitara. Sp/f Grettir hevði fyrivarni í tilboðið sínum, at móttøkugjøld til burturbeining av verandi belegningi á kommunalu brennistøðini ikki varð íroknað umframt spilldagar. Umsitingin hevur í samráð við Grettir kapitaliserað, fyrivarnini til kr 510.000 út frá upplýsingum

arbeiðstakarin hevur givið. Samanlagt hevur Sp/f Grettir lægsta boð. Endaliga tilboðið frá vinnandi arbeiðstakara er áljóðandi:

kr. 8.045.268 u/mvg.

**Fígging - Samlað kostnaðarmeting**
Umsitingin hevur eftirfylgjandi gjørt ein samlaða kostnaðarmeting yvir verkætlanina íroknað Hondverkaraútreiðslur(HVÙ), ráðgevarasáttmáli, trygging, leyst innbúgv, prosjektumsiting, mvg. o.a. Samlaði kostnaður á verkætlanina Tórsbreyt – Umvæling er áljóðandi:

10.639.307,00 v/mvg

Omanfyrinevndu tilboð eru komin inn tann 5. februar 2026.
Harumframt hava sersambondini latið inn teirra ynskir og krøv til teir ítróttarfasilitetirnar, sum tey vara av. Hetta er m.a. góðkent kappingargólv o.l.
Upprunaliga kostnaðarmetingin var at rennibreytin kostaði áleið 8,5 miókr. og saman við ynskjunum frá sersambondunum bleiv samlaði metti kostnaðurin góðar 14 mió kr.
Paralelt við hetta eru 2 mió. kr. játtaðar til møguliga fjallasúkklubreyt.

Yvirlit yvir samtyktir til Oyggjaleikir

| Mál | Upphædd | Konto |
|---|---|---|
| Mál 25/09786 Eykajáttan av meirinntøkum 2025: | kr. 2.000.000 | Kt 5775 Oyggjaleikir, Fjallasúkklubreyt |
| Mál 25/09786 Eykajáttan av meirinntøkum 2025: | kr. 1.000.000 | Kt 5775 Oyggjaleikir, Tórsbreyt |
| Mál 25/06020 Fíggjarætlan 2026: | Kr. 5.000.000 | Kt 5775 LK57049 |
| Mál 24/07504 Fíggjarætlan 2025: | Kr. 4.000.000 | Kt. 5775 Oyggjaleikir 2027, Ljós Tórsbreyt |

Í hesum síðsta málinum, mál 24/07504, hava fylgjandi mál viðgjørt tær 4.000.000 kr.:
Mál 25/02736 (Oyggjaleikir 2027 – Fígging): her bleiv samtykt at játta kr. 1.000.000 av LK 57049 Oyggjaleikir 2027 yvir á kt 1312 Trivnaðarfyrisitingin. Sostatt eru 3 mió kr. eftir av hesari játtan á kt. 5775 LK57049, Oyggjaleikir 2027.
Harumframt eru kr. 2.000.000 játtaðar á fíggjarætlanini 2025 til Frælsan Ítrótt, høll, á kt. 5775 LK57049.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | LK57049 | Oyggjaleikir 2027 | 5775 | | Oyggjaleikir, hallir og rennibreyt | Ja | 3.000.000 |
| 5775 | LK57049 | Oyggjaleikir 2027 | 5775 | | Oyggjaleikir, hallir og rennibreyt | ja | 5.000.000 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5775 | LK57999 | Ítróttaanlegg | 5775 | | Oyggjaleikir, hallir og rennibreyt | ja | 1.000.000 |
| 5775 | LK57042 | Frælsur ítróttur | 5775 | | Oyggjaleikir, hallir og rennibreyt | | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 14.000.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025-2027 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla til

- At tikið verður undir við fyriliggjandi kostnaðum og tilboðum, og at byggiarbeiðið verður sett í gongd eftir leisti, sum lýst omanfyri.
- At játta kr. 3.000.000 av kt 5775 LK57049 til nýggja løgujáttan «Oyggjaleikir, hallir og rennibreyt»
- At játta kr. 5.000.000 av kt 5775 LK57049 til nýggja løgujáttan «Oyggjaleikir, hallir og rennibreyt»
- At játta kr. 1.000.000 av kt 5775 LK57999 til nýggja løgujáttan «Oyggjaleikir, hallir og rennibreyt»
- At játta kr. 2.000.000 av kt. 5775 LK 57042 til nýggja løgujáttan «Oyggjaleikir, hallir og rennibreyt»
- At tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu fíggingini.
  at beina málið í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, ongari atkvøðum ímóti og trimum blankum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen.

Ímóti atkvøddu eingin.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, og Annfinn Brekkstein.

# 29/26 Dagføringar í Svimjihøllini í Gundadali - 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.02.2026 | 30/26 | 26/00714-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 19/26 | 26/00714-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 29/26 | 26/00714-1 |

**Upprunin til málið**
Sbrt. mál 25/09786 (Eykajáttan av meirinntøkum 2025) eru 4 mió. kr. játtaðar til dagføring av barnahylunum í Svimjihøllini í Gundadali.

**Lýsing av málinum**
Verandi reinsskipan inni í gomlu svimjihøllini í Gundadali er gomul og slitin. Og samstundis er skipanin ov lítil til tað høga vitjanartalið. Hetta merkir, at skipanin er ovbyrjað, og er vatngóðskan til tíðir uttanfyri markið til galdandi krøv.

Skipanirnar lúka heldur ikki tey nýggju lógarkrøvini, sum eru frá 2013(DS 477). Í nýggju krøvunum er ásett, at hvør hylur skal hava sína egnu reinsiskipan. Sum er, eru báðir barnahyljarnir í einari skipan, og 25m-hylurin og kavingarhylurin í einari skipan.

Tað sum ætlanin er at gera nú, er at gera hvør sína skipan til teir báðar barnahyljarnar. Henda broyting kemur m.a. at gera, at tá “fækalóhapp” eru, so nýtast vit ikki at stongja báðar hyljarnar, men bara tann sum er fyri óhappinum. Harumframt kunnu vit hækka hitan frá núverandi 31° til 34° við tað, at vit fáa størri filturkapasitet.

Hetta er fyrsta stigið av trimum at skifta reinsiskipan í øllum teimum gomlu hyljunum. Sbrt. kostnaðarmeting í mál (24/07253 Dagføringar í Svimjihøllini í Gundadali), so kostar tað uml. 12.000.000 kr. at skifta allar skipanirnar í eldra partinum av svimjihøllini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
24/07253 Dagføringar í Svimjihøllini í Gundadali

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 98<br><br>Forkvinnunnar merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | LK57999 | Dagføring av svimjihøllini | 5775 | | Dagføring av svimjihøllini (eldri partur) | Ja | 4.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 12.000.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026/2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**: Trivnaðarstjórin, leiðarin á Bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla til

- at játta kr. 4.000.000 kr. av kt 5775 LK57999 til nýggja løgujáttan “Dagføring av svimjihøllini (eldri partur)”
- at umsitingin fær heimild til at bjóða arbeiði út.
- at beina málið í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina

**Mentamálanevndin 11. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

# 30/26 Gøtunavnanevndin: Brýr um Sandá – Brúgv 6

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 26.11.2025 | 147/25 | 25/10176-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.02.2026 | 28/26 | 25/10176-2 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 30/26 | 25/10176-2 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Vísandi til mál 21/03817 (Brýr um Sandá – nøvn), so mælir Gøtunavnanevndin til at brúgvin eitur “Støðlabrúgv”.

Brúgvin liggur nær við Støðlagøtu.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☐**

**Skjøl**
Víst verður til myndina í skjal 25/10176-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Vísandi til mál 21/03817 (Brýr um Sandá – nøvn), so mælir Gøtunavnanevndin til at brúgvin eitur “Støðlabrúgv”.

**Mentamálanevndin 26. november 2025:** Útsett.

**Mentamálanevndin 11. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

# 31/26 Gøtunavnanevndin: Brýr um Sandá – Brúgv 7

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 26.11.2025 | 148/25 | 25/10177-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.02.2026 | 27/26 | 25/10177-2 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 31/26 | 25/10177-2 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Vísandi til mál 21/03817 (Brýr um Sandá – nøvn), so mælir Gøtunavnanevndin til at brúgvin eitur "Andrasarbrúgv".

Andras Mortansson og kona hansara, Elspa Dánjaldóttir av Kjalnesi, búsettu seg, sum tey fyrstu, á Argjum í 1829. Andras Mortansson laðaði brúnna í 1835.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
Víst verður til myndina í skjal 25/10177-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Vísandi til mál 21/03817 (Brýr um Sandá – nøvn), so mælir Gøtunavnanevndin til at brúgvin eitur "Andrasarbrúgv".

**Mentamálanevndin 26. november 2025:** Útsett.

**Mentamálanevndin 11. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

# 32/26 Gøtunavnanevndin: Brýr um Sandá – Brúgv 8

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 26.11.2025 | 149/25 | 25/10178-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.02.2026 | 26/26 | 25/10178-2 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 32/26 | 25/10178-2 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Vísandi til mál 21/03817 (Brýr um Sandá – nøvn), so mælir Gøtunavnanevndin til at brúgvin eitur "Argjabrúgv".

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
Víst verður til myndina í skjal 25/10178-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Vísandi til mál 21/03817 (Brýr um Sandá – nøvn), so mælir Gøtunavnanevndin til at brúgvin eitur "Argjabrúgv".

**Mentamálanevndin 26. november 2025:** Útsett.

**Mentamálanevndin 11. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

# 33/26 Umvæla gamla Argja skúla til frítíðartilboð hjá 3.-6. flokk og undirvísingarhølir hjá Gula skúla - 24/07481

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.02.2026 | 14/26 | 25/01117-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 12.02.2026 | 10/26 | 25/01117-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 16/26 | 25/01117-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 33/26 | 25/01117-1 |

**Upprunin til málið**
Flyta játtan í íløguætlanini 2026 til Heildaruvæling av Argja skúla til løgukonto

**Lýsing av málinum**

Í íløguætlanini 2026 er játtaðar 8 mió. kr. til heildarumvæling av Argja skúla.

Umsitingin hevur arbeitt við eini ætlan at heildarumvæla Argja skúla til frítíðartilboð til 3.-6. flokk og til at útvega Gula skúla fleiri undirvísingarhølir.

<u>Kostnaðarmeting</u>:
Leysliga kostnaðarmetingin er, at heildarumvælingin kostar 16 mió. kr.
Tekjan, fasadur og vindeygu skulu dagførast. Harumframt skal innrættingin av bygninginum dagførast við atlit til tørvin hjá frítíðartilboðnum og Gula skúla.
Fyrireikingarnar at dagføra bygningsskjólið eru farnar í gongd. Neyvari kostnaðarmeting fyriliggur, tá tilboð koma inn.

<u>Tíðarætlan:</u>
Ætlanin er at brúka játtanina í ár til at fyrireika arbeiðið og umvæla bygningsskjólið. Fyri at arbeiðið kann gerast liðugt, so mugu 8 mió. kr. afturat raðfestast á fíggjarætlanini 2027, so verður verkætlanin mest sannlíkt liðug í august 2027.
<u>Niðanfyri er ein samandráttur av máli nr. 24/07481 "Umvæla gamla Argja skúla til frítíðartilboð hjá 3.-6. flokk og undirvísingarhølir hjá Gula skúla":</u>

Mentamálanevndin samtykti tann 10. januar 2024, í máli nr. 23/06810, at arbeiða víðari við at skipa nýggj frítíðartilboð til børn og ung frá 3. flokki upp til 18 ár. Samtyktin er gjørd við støði í avgerð frá Barna- og Útbúgvingarmálaráðnum viðvíkjandi frítíðartilboðnum hjá Tórshavnar kommunu til 3. Flokk.

Eindarleiðararnir á Barna- og Ungdómsdeildini hava kannað møguligar staðsetingar av frítíðartilboðum til børn og ung frá 3. flokki upp til 18 ár.

Mælt verður til, at eitt frítíðartilboð verður staðsett í gamla Argja skúla á Argjavegi 32. Talan er um ein bygning, sum Tórshavnar kommuna eigur.

Mentamáladeildin upplýsir, at Guli skúli brúkar kjallaran í niðasta parti av gamla Argja skúla til smíðstovu og eina stovu til súkkluverkstað. Skúlin sær møguleika fyri samnýtslu av hesum hølum við eitt møguligt frítíðartilboð.

Mentamáladeildin og leiðslurnar í Gula skúla og í Lonunum síggja góðar møguleikar í at høvuðsumvæla gamla Argjaskúla til frítíðartilboð og skúlabrúk.

Barna- og ungdómsdeildin og Mentamáladeildin hava gjørt eitt upprit við tørvslýsing hjá frítíðar- og skúlatilboðið í gamla Argja skúla.

Í oktober 2024 samtyktu Mentamálanevndin og Trivnaðarnevndin at taka undir við tørvslýsingini og at taka við í FÆ 2025. Nevndin heitir á byggi- og býarskipanarnevndina um at gera uppskot um at gera uttanum økið, sum ein miðdepil.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Bygningurin verður ikki brúktur nógv í løtuni. Guli skúli brúkar niðastu hølini í norður endanum á bygninginum til smíðstovu og súkkluverkstað. Suður endin á bygninginum verður brúktur til AA-fundir.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
- 24/07481 Upprit við tørvslýsing hjá frítíðar- og skúlatilboðið í gamla Argja skúla (Skjal nr 4)
- 24/07481 Umvæla gamla Argja skúla til frítíðartilboð hjá 3.-6. flokk og undirvísingarhølir hjá Gula skúla

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |

| Upphædd |
|---|

| | | |
|---|---|---|
| 4175 | LK41021 | Heildarumvæling av Argja skúla |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 4175 | | | Heildarumvæling av Argja skúla |

| |
|---|
| 8 mió. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 16 mió. kr |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 til xxxx |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Ókent |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina, deildarleiðarin fyri Mentamáladeildina og deildarleiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til at flyta 8 mió. kr. av LK41021 á nýggja løgukonto til endamálið.

At beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 12. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Kristianna Winther Poulsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

# 34/26 Betra akustiskta inniumhvørvið (ljóðviðurskifti) á dagstovnunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.01.2025 | 6/25 | 25/01714-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.01.2025 | 3/25 | 25/01714-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 38/25 | 25/01714-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 02.04.2025 | 48/25 | 25/01714-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2026 | 17/26 | 25/01714-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 21/26 | 25/01714-1 |
| 7 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 34/26 | 25/01714-1 |

**Upprunin til málið**
Ljóðviðurskiftini á dagstovnum

**Lýsing av málinum**
Býráðið hevur játtað 4 mió. kr. til LK31020 "Tillagingar á dagstovnaøkinum"

Í fjør vár samtykti mentamentanevndin, at umsitingin fekk heimild til at arbeiða við at lýsa karmarnar um námsfrøðiliga virksemi. Her undir inniumhvørvi á dagstovnunum, sum hevur sera stóran ávirkan á arbeiðsumhvørvi hjá starvsfólkum og børnum. Fyri nærri lýsing sí mál nr. 24/01070.

Í hesum sambandi kann nevnast, at tá borgarstjórin í fjør vitjaði dagstovnar í kommununi var eitt afturvendandi ynski frá leiðara og starvsfólkum, at betra ljóðviðurskiftini á stovnunum.
Leggjast kann afturat, at miðskeiðis í 2023 hevði trivnaðarstjórin og deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina ein fund við stovnsleiðararnar. Eitt ítøkiligt ynski frá stovnsleiðarunum var at betra um ljóðviðurskiftini á stovnunum.

Barna- og ungdómsdeildin hevur í 2024 umrøtt við Bygningsdeildina, hvussu ein tílík verkætlan viðvíðkjandi inniumhvørvinum kann setast í verk.
Semja er um, at skilabest er at gera kanningar av inniumhvørvinum á øllum stovnum. Kanningin fevnir um luftgóðsku, ljósviðurskifti og akustiskt inniumhvørvi.
Við at betra inniumhvørvi, metir umsitingin, at mest sannlíkt verður talið av sjúkradøgum færri. Harafturat kann tað hava við sær, at starvsfólk at hava størri orku til at arbeiða ein hægri brøk enn tey gera í dag.

Á dagstovnaøkinum eru yvir 40 bygningar og umleið 140 stovur/flokkar. Nógv teir flestu hava avbjóðingar við inniumhvørvinum. Ein serlig avbjóðing við flestu bygningum, er at akustiska inniumhvørvið als ikki eru nøktandi.

Tí mælir umsitingin til at gera ein støðulýsing av inniumhvørvinum í øllum bygningum á dagstovnaøkinum. Mett verður, at kanningarnar kunnu gerast í januar og februar mánað 2025.

Umsitingin mælir somuleiðis til, at játtanin í ár verður brúkt til at betra akustiska inniumhvørvi (ljóðviðurskifti) á dagstovnunum.

**Tilgongd**

Umsitingin mælir sostatt til, at fyrst kanna inniumhvørvi í stovum og felagshølum, har sum starvsfólk og børn í størstan mun halda til í bygningunum.

Fyri at játtanin skal koma so nógvum sum til ber til góðar er mest skynsamt, at ljóðviðurskiftini vera betraði í stovum og felagsrúmum har flestu børn og starvsfólk halda til.

Tá úrslit av kanningum fyriliggur gera Bygningsdeildin og Barna- og ungdómsdeildin eitt yvirlit yvir, hvørjir bygningar trongja til størstar ábøtur.

Játtanin røkkur neyvan til at umvæla ljóðviðurskifti á øllum bygningum. Tí mælir B&U at arbeiðið verður deilt javnt millum eindirnar B, A, R og N, so arbeiðið kemur flest møguligum starvsfólkum og børnum til góðar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Arbeiðsumhvørvislógin

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- Mál nr. 23/05278 "Verkætlan : Betra inniumhvørvi á dagstovnunum við serligum denti á ljóðviðurskiftini"
- Mál nr. 24/01070 "Lýsing av karmunum um námsfrøðiliga virksemið í 2024"

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: Deild | Verk-ætlan | Navn | Játtast á: Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3175 | LK31020 | Tillagingar á dagstovnaøkinum | 3175 | | | Ábøtur, ljóðviðurskifti | 3,5 mió. kr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 3,5 mió. kr. |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | n/a |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina og deildarleiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til:

- at umsitingin fær heimild til at gera eina ætlan og seta í verk eina verkætlan til at betra ljóðviðurskiftini á dagstovnaøkinum
- at flyta 3,5 mió. kr. av LK31020 "Tillagingar á dagstovnaøkinum" til nýggja konto undir 3175 sum eitur "Ábøtur, ljóðviðurskifti" og,
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. januar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2025:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini, og at raðfestingarnar verða lagdar fyri aftur fíggjarnevndina sum kunning.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Steingrund Akustikk hevur gjørt forkanningar av ljóðviðurskiftunum í dagstovnunum í kommununi.

Forkanningarnar vísa, at meginparturin av dagstovnunum hava eitt vánaligt akustiskt inniumhvørvi. Sambært svarum frá dagstovnaleiðarum hevur vánaligur akustikkur eina negativa ávirkan á trivna og heilsu hjá starvsfólkum og børnum.

Steingrund Akustikk mælir til, at í fyrstu atløgu gera ábøtur at betra um eftirljómstíð í rúmunum í stovnunum. Grundgevingin er, at tað er lutfalsliga bíligt og hevur gagnliga ávirkan fyri starvsfólk og børn.

Umsiting tekur tilmælið til eftirtektar, og mælir til at raðfesta stovnar eftir hesum fortreytum:
- At játtanin á konto 3175 í 2025 verður býtt javnt í millum eindirnar
- At stovnar við vánaligari eftirljómstíð vera raðfestir í fyrstu atløgu
- At umsitingin í fyrstu syftu leggur dent á at betra akustiska inniumhvørvi í stovum og felagshølum, sum børn og starvsfólk í størsta mun halda til.

Grundgeving fyri vali av fortreytum:

- Fyri at býta játtanina javnt millum eindirnar er, at játtanin rakar ein so breiðan skarða av starvsfólki og børnum sum til ber.
- At betra um eftirljómstíðina har støðan er ringast, fer mest sannlíkt at hava størst ávirkan á starvsfólk og børn.
- Stovnar, har størri umvælingar verða framdar í ár, fáa ikki eisini ágóðan av játtanini í ár, og verða raðfestir til komandi ár um játtan verður tøk.

Í talvuni niðanfyri er eitt yvirlit yvir stovnarnar sum vera raðfestir í ár:

| **Eind B** | **Eind A** | **Eind R** | **Eind N** |
|---|---|---|---|
| Dagstovnurin við Velbastaðvegin | Dagstovnurin við Øksnagerð | Frítíðarskúlin Smílibýlið | Barna- og ungdómshúsið Látrið |
| Býlingshúsið á Norðasta Horn | Býlingshúsið undir Fjalli | Býlingshúsið millum Gilja | Dagstovnurin við Løgmannabreyt |
| Dagstovnurin Fríðriksgarður | Býlingshúsið á Maritugøtu | Dagstovnurin á Argjum | Býlingshúsið Vesturi á Flat (tann gamli parturin) |

**Tilmæli**:
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2025:** Kunnað varð um málið.

| **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 112 |
|---|---|
| | Forkvinnunnar merki: |

**Ískoyti:**
Stuttur samandráttur av omanfyri standandi málslýsing frá 2025:

Eitt afturvendandi ynski frá stovnsleiðarum hevur verið at betra ljóðviðurskiftini á okkara dagstovnum, sum hava ein miðalaldur á umleið 36 ár.

Í 2025 samtykti býráðið at brúka 4 mió. kr til at seta eina verkætlan í gongd at miðvíst betra ljóðviðurskiftini á dagstovnunum.

Í fyrstu atløgu er ein partur av játtanini brúktur til forkanningar av ljóðviðurskiftunum. Tað er Steingrund Akustikk sum hevur gjørt forkanningarnar. Ein av yvirskipaðu úrslitunum eru, at í meginpartinum av dagstovnunum er akustiska inniumhvørvið
sera vánaligt.

Mælt var til gera ábøtur sum betra eftirljómstíðina á stovnunum, tí tað er lutfalsliga bíligt og hevur gagnliga ávirkan fyri starvsfólk og børn.

Fyri at ábøturnar skulu koma nógvum starvsfólkum til góðar á fleiri ymsum stovnum var avgerð tikin um, at býta játtanina javnt millum eindirnar.

Í talvuni niðanfyri er eitt yvirlit yvir stovnarnar sum vóru raðfestir í fjør. Somuleiðis er ein nærri lýsing av fortreytunum fyri, hvussu stovnarnir eru valdir út.

Fíggjarætlanin 2026:
Á fíggjarætlanini hevur býráðið játtað 8 mió. kr. á LK31020 "Tillagingar á dagstovnaøkinum".

Umsitingin mælir til, at 4 mió. kr. av játtanini vera fluttar á løgukonto L31020.

Nýggja játtanin skal brúkast til at loka verkætlanir, sum eru í gongd, og harnæst verður tað, sum restar í av játtanini, brúkt til nýggjar verkætlanir sambært somu fortreytum sum í fjør.

Mentamálanevndin verður kunnað, tá umsitingin hevur tikið støðu til, hvørjar nýggju verkætlanirnar eru.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 3175 | LK31020 | Tillagingar á dagstovnaøkinum | 3175 | L31020 | Tillagingar á dagstovnaøkinum | | 4,0 mió. kr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 4,0 mió. kr. |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | n/a |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina og deildarleiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til:

- at flyta 4 mió. kr. av LK31020 “Tillagingar á dagstovnaøkinum” til L31020 “Tillagingar á dagstovnaøkinum” og,

- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt við teirri broyting, at 3 mio. kr. verða fluttar av 3175 - LK31020 “Tillagingar á dagstovnaøkinum” til L31020 “Tillagingar á dagstovnaøkinum.

# 35/26 Viðv. játtan 2026 til uttanumøkið á dagstovnaøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.02.2026 | 15/26 | 26/00534-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 22/26 | 26/00534-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 35/26 | 26/00534-1 |

**Upprunin til málið**
Dagføringar av uttanumøkið við dagstovnar.

**Lýsing av málinum**

Býráðið hevur játtað 8 mió. kr.til "Tillagingar á dagstovnaøkinum".

Í fjør samtykti Mentamálanevndin at játta 4 mió kr. til tillagingar av uttanumøkjum við dagstovnum.

Á vári 2024 samtykti mentamentanevndin, at umsitingin fekk heimild til at arbeiða við at lýsa karmarnar um námsfrøðiliga virksemi. Herundir umstøðurnar til uttanumøki við dagstovnarnar. Fyri nærri lýsing sí mál nr. 24/01070. Umsitingin hevur framt eina námsfrøðiliga arbeiðsplássmeting á dagstovnaøkinum á heysti 2025.

Somuleiðis verður eftirlit framt við spæliplássum annaðhvørt ár, men eingin játtan er sett til at umvæla feilir og annað sum eftirlitið kemur fram á.
Ætlanin við játtanini er at gera smærri og miðalstórar íløgur í uttanumøki við dagstovnarnar. Endamálið er at betra og nútímansgera uttanumøkini í samráð við stovnarleiðarar.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
• Mál nr. 24/01070 "Lýsing av karmunum um námsfrøðiliga virksemið í 2024"

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd    Ja ☐    Nei ☒**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 115<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 3175 | LK31020 | | 3175 | | Tillagingar á uttanumøki | | 4 mió kr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 4 mió kr. |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár:2026 | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina og deildarleiðarin fyri Bygningsdeildina mæla nevndini til at samtykkja, at 4 mió kr. verða fluttar av hesari konto fyri 2026:

- 4 mió. kr. av LK31020 "Tillagingar á dagstovnaøkinum" til nýggja løgukonto til námsfrøðiliga arbeiðsplássmeting og spæliplásseftirlit.
- Og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri nágreining at 4 mió. kr. verða fluttar til nýggja løgukontu "Betra uttanumøkið hjá dagstovnunum" og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

# 36/26 Útbygging. Lonir til Skúlan á Fløtum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 12.02.2026 | 11/26 | 26/01053-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 23/26 | 26/01053-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 36/26 | 26/01053-1 |

**Upprunin til málið**
Innskriving í forskúla og 1. Flokk.
Sí mál 25/08236

**Lýsing av málinum**
Tørvur er á eyka skúlastovum til Skúlan á Fløtum, tí komandi árini verða fleiri næmingar innskrivaði til skúlan. Tríggir eyka flokkar verða tiknir inn komandi trý árini. Tørvurin er longu við skúlabyrjan eftir summarfrítíðina 2026.

Umsitingin er í fyrireikingum at útvega lonir til endamálið. Eftir ætlan verða lonirnar staðsettar og samanbygdar í ein minni bygning fyri seg á grundøkið skúlans, men leyst av skúlanum. Millum verandi skúla og Glasir. Lonirnar koma at innihalda 3 skúlastovur, dur og gongd, klæðirúm og lítið tøknirúm. Inngongdin verður eftir ætlan yvirdekkað við einari hálvtekju at verja móti vindi og regni.

Teknisk fyrisiting samráðist um keypoa av samanbygdum lonum frá Moelven í Noregi, samstundis sum arbeiðið við avgrevstri, fundering og leiðingum og annað arbeiði í hesum sambandi verður fyrireikað og boðið út í Føroyum.

Tíðarælanin er knøpp.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Byggingin skal lúka BK17 krøv, og mett verður ikki at neyðugt er at biðja um frávik.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Byggimálsdeildin er kunnað um málið, og umsókn um byggiloyvi er ávegis. Verður sent inn tá tekningar og útrokningar eru lidnar.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd    Ja ☐    Nei ☒**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

| | Býráðsfundur<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 117<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 9.500.000,00 |
| Áður játtað til økið | Upphædd: | 10.000.000,00 er játtað á karminum. |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026-2027 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at 9,5 mió verða fluttar av karminum LK41999 útbygging av skúlaøkinum og fluttar á nýggja løgukonto “Útbygging. Lonir til Skúlan á Fløtum”.

- At nevndin gevur umsitingini heimild at samráðast og gera sáttmála við modulveitara um keyp av lonum, umframt at bjóða út og gera sáttmála um neyðugar arbeiðstøkur áðrenn lonirnar koma til Føroya og meðan hesar skulu setast upp og byggjast saman.

- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 12. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Kristianna Winther Poulsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at arbeiðini vera boðin til føroyskar veitarar og at arbeiðið verður útint av føroyskum handverkarum. Eisini mælt til at Sankta Frans skúli er umfataður av hesari loysn

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen,

# 37/26 Útbygging. Lonir til skúlan á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 12.02.2026 | 12/26 | 26/01054-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 24/26 | 26/01054-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 37/26 | 26/01054-1 |

**Upprunin til málið**
Innskriving í forskúla og 1. Flokk.
Sí mál 25/08236

**Lýsing av málinum**
Tørvur er á eyka skúlastovum til Skúlan á Argjahamri, tí komandi árini verða fleiri næmingar innskrivaði enn áður. Tveir eyka flokkar verða tiknir inn eftir summarfrítíðina í 2027.

Bygningsdeildin og teknisk fyrisiting eru í fyrireikingum við mentamáladeild, skúlan og Børn og Ung, um staðseting, stødd, endamál og annað í hesum sambandi.

Skulu lonir setast upp og verða klárir á sumri í 2027, skal væntandi okkurt fyrireikingararbeiðið gerast á sumri í 2026 við lendi og leiðingar, soleðis at hetta arbeiðir ikki órógvar skúlans virksermi meiri enn neyðugt.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Verða lonirnar staðsettar á skúlans øki, so krevst ikki broyting ella frávik frá galdandi reglum og byggisamtykt. Verða lonirnar staðsettar nærhendis, men uttanfyri skúlans øki, so krevur hetta væntandi broyting í byggisamtykt.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Skjøl**

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | óvist |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at 0,5 mió kr. verða fluttar av karminum LK41999 útbygging av skúlaøkinum og fluttar á nýggja løgukonto, Útbygging. Lonir til skúlan á Argjahamri.

At nevndin gevur umsitingini heimild at fyrireika verkætlanina og venda aftur við samlaðum kostnaði og meiri nágreiniligari ætlan, herundir endaligari staðseting.

At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 12. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Kristianna Winther Poulsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen,

# 38/26 Torg í Hoyvík - 22/00327

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.09.2025 | 130/25 | 25/02301-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.02.2026 | 30/26 | 25/02301-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 28/26 | 25/02301-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 38/26 | 25/02301-1 |

**Upprunin til málið**
Framhald av máli nr. 22/00327 – sí gomlu málslýsingina í skjalinum *Uppruna málslýsing við skjølum*.

**Lýsing av málinum**
Síðani Hoyvíkar kirkja varð liðugt bygd í 2007, hevur stórt ynski verið um at gera uttanumøkið liðugt. Í sambandi við heildarætlanina fyri Karlamagnusarbreyt í 2020 varð víst á týdningin av at menna eitt torg millum kirkjuna, skúlan og Karlamagnusarbreyt eins og at dagføra ferðsluviðurskiftini í økinum. Verkætlanin skuldi tí fevna um nýtt forpláss til Hoyvíkar kirkju, eitt øki til spæl, og betri atkomu til Hoyvíkar skúla eins og eina dagføring av vega- og parkeringsviðurskiftunum í økinum.

Í 2023 varð eitt skipanaruppskot teknað fyri økið, sum vísti, hvussu uppskotið kundi fremjast í trimum byggistigum, sí skjalið *20231017 Torg í Hoyvík (skipanaruppskot).*

Fyri at bøta um trygdina og ferðsluviðurskiftini í økinum varð 1. byggistig av verkætlanini boðið út. Útboðið fevndi um dagføring av vega- og parkeringsviðurskiftunum við tilhoyrandi jørð- og lendisarbeiði við og rundanum p-økið við Hoyvíkar kirkju. Sí tekningina *Yvirlitstekning nýggjar leiðingar v.m.* og skjalið *Frágreiðing útinnan (1. byggistig)*.

Av tí at ætlanir eru um at dagføra Hoyvíkar skúla, so varð økið framman fyri skúlan ikki tikið við í 1. byggistig.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
1. byggistig, *Dagføring av vega- og parkeringsviðurskiftunum við Hoyvíkar kirkju,* av verkætlanini varð í desember 2024 boðið út, og fýra tilboð komu inn:

- Sp/f Andrias Berg kr. 10.384.600
- Articon kr. 9.382.672
- Húsavarðartænastan kr. 11.078.580
- Maskingrevstur kr. 11.484.190

Articon vann tilboðið.

Kostnaðarmetingin fyri 1. byggistig var áljóðandi kr. 10.510.540.

Nú er meira enn hálvt ár liðið síðani verkætlanin var í útboði, og tí skil kann væntast, at kostnaðurin hækkar nakað, síðani útboðið.

Nøktandi játtan hevur ikki verið til at seta arbeiðið í gongd, men sýnist politiskur vilji at verða fyri at finna neyðugu fíggingina til verkætlanina. Ætlanin er, at verkætlanin skal fíggjast av meirinntøkunum, sum verða viðgjørdar í november og desember.

Sostatt sigst, at fíggingin verður til at seta arbeiðið á breddan, og tískil verður mælt til, at endaligar samráðingar við Articon verða settar í verk, og sáttmáli skrivaður um arbeiðið.

Somuleiðis verður mælt til, at kunna bæði kirkjuráðið, skúlastýrið og Hoyvíkar skúla um støðuna, soleiðis at tey eru vitandi um at verkætlanin eftir ætlan verður sett á breddan í 2026.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/00327 - Torg í Hoyvík

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska deild hevur verið við í allari tilgongdini við skipanaruppskotinum og eftirfylgjandi projektering av 1. Byggistigi.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
Uppruna málslýsing við skjølum, journal nr. 25/02301-3
20231017 Torg í Hoyvík (skipanaruppskot), journal nr. 25/02301-5
Yvirlitstekning nýggjar leiðingar v.m., journal nr. 25/02301-6
Frágreiðing útinnan (1. byggistig), journal nr. 25/02301-7

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**
Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | Meirinntøkur 2025 |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verkætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| 6275 | L62048 | Torg í Hoyvík | |

| Upphædd |
|---|
| xxxxxxx kr. |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2025:** Útsett.

**Ískoyti:**
Fíggjarætlanin fyri 2026 rúmar ikki, at verkætlanin verður framd, og tískil verður mælt til, at loka verkætlanina.

Avlopið á játtanini er kr. 2.489.000.

Í máli nr. *25/10815, Bussskýli í kommununi*, er samtykt í teknisku nevnd og fíggjarnevndini at játta kr. 600.000 til nýggja verkætlan «Dagføring av bussskýlum». Málið varð samtykt í býráðnum 29.01.2026, og tískil lækkar avlopið á L62048, Torg í Hoyvík, við kr. 600.000.

So statt verður írestandi avlop kr. 1.889.000.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | | 6275 | L62048 | Torg í Hoyvík | | 1.889.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til:
- at loka verkætlanina L62048, Torg í Hoyvík, og at flyta avlopið á kr. 1.889.000 á kt. 6275, LK62999, Fríðkan av býnum,
- at kunna bæði kirkjuráðið, skúlastýrið og Hoyvíkar skúla um støðuna, soleiðis at tey eru vitandi um, at verkætlanin í núverandi løtu er slept,
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við at loka verkætlanina.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Tikið av skrá.

# 39/26 Íverksetan av rakstrarstovninum Lendis- og kirkjugarðstænastan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.11.2025 | 156/25 | 25/09430-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.11.2025 | 69/25 | 25/09430-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.02.2026 | 36/26 | 25/09430-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.02.2026 | 18/26 | 25/09430-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 27/26 | 25/09430-1 |
| 6 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 39/26 | 25/09430-1 |

**Upprunin til málið**
Hetta er eitt kunningarmál í sambandi við íverksetan av rakstrarstovninum Lendis- og kirkjugarðstænastan.

Fleiri bygnaðarbroytingar eru seinastu árini gjørdar á Teknisku fyrisiting, ið hava havt til endamáls at fáa eitt greiðari og logiskari uppgávubýti millum ráðlegging og rakstur. Í hesum sambandi eru m.a. rakstrarstovnar settir á stovn undir Teknisku deild og Bygningsdeildini.

Eftir er at samla tær smáu eindirnar, ið hava við grøn økir/lendi at gera – og sum í dag liggja hvør sær undir Býarskipanardeildini – í ein “grønan rakstrarstovn”, sum eftir ætlan kemur at eita, Lendis- og Kirkjugarðstænastan.

Talan er um *Kirkjugarðar* og *Lendisdeildina*, sum í løtuni vísa til Býarskipanardeildina, og *moldgoymsluna* í Húsahaga, sum í dag liggur undir Brennistøðini.
Mælt verður til, at savna eindirnar undir einum nýggjum stovni, sum skal vísa til Býarskipanardeildina.

**Lýsing av málinum**
Eindirnar, sum takast við grøn økir/lendi í kommununi eru lítlar og spjaddar. Fyri at styrkja virksemið bæði á lendisliðnum og í kirkjugørðunum, verður mælt til at savna eindirnar í ein grønan rakstrarstovn við einum stovnsleiðara undir Býarskipanardeildini. Mælt verður til, at verandi leiðari fyri Kirkjugarðar verður stovnsleiðari vísandi til býararkitektin.

Í kommununi eru 13 kirkjugarðar, og har starvast 5 arbeiðsmenn umframt leiðaran. Ávísar uppgávur hjá kirkjugørðunum eru í dag útveittar, og samstarv er við lokal verkafólk í bygdunum. Umframt gravaravirksemi eru uppgávurnar hjá Kirkjugørðum eisini at føra m.a. kirkjugarðsprotokoll, samskifti við avvarandi í.s.v. jarðarferðir, líkbilstænasta, umframt urtagarðsvirksemi í sambandi við røkt av kirkjugørðunum.

Lendisliðið er í løtuni undir Býarskipanardeildini, og hevur ein arbeiðsforkvinna, býargartnarin, ábyrgdina av 2 starvsfólkum. Lendisliðið stendur fyri fríðkan av kommununi, men grundað á sera avmarkað starvsfólkatilfeingi, so verður størsti parturin av grønu røktini útveittur. Virksemið var fyri kortum undir Rakstrarstovninum á Oyggjarvegnum, men mett varð ikki, at henda uppgávan hóskar væl saman við kjarnuuppgávuni hjá Rakstrarstovninum, men heldur liggur meiri náttúrliga í nýggja rakstrarstovninum “Lendis- og kirkjugarðstænastan”.

Síðani kommunan er farin í samstarv við IRF um nýtt tyrvingarpláss í Kvívíkshaganum, er bara moldgoymslan eftir í Húsahaga. Tað er ikki longur náttúrligt, at hetta virksemið liggur undir Brennistøðini, og mælt verður tí til, at tey 3 starvsfólkini, ið eru knýtt at avgrevstrarplássinum í Húsahaga, verða flutt undir grøna rakstrarstovnin, og at verandi virksemið verður skipað av nýggjum.

Íverksetanin av Lendis- og kirkjugarðstænastuni er enn í byrjanarfasuni, har býararkitekturin, leiðarin á kirkjugarðinum og umboð frá Starvsfólkadeildini hava havt fundir við ymisku eindirnar. Í november verður farið undir at skipa og fáa neyðug formlig viðurskiftir upp á pláss, soleiðis at ítøkiliga íverksetanin saman við starvsfólkunum verður sett á breddan fyrst í komandi ár.

Starvsfólkini tóku sera positivt ímóti ætlanunum, og eru spent upp á at fáa skipað rakstrarstovnin, soleiðis at tey í størri mun kunnu samstarva tvørtur um eindirnar, umframt at tey sóu fyrimunir fyri starvsfólkatrivnaðin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Enn er eingin støða tikin til, hvussu stovnurin skal samstarva ella hvar stovnurin fer at halda til. Men hugsast kann, at virksemið verður savnað í Kirkjugarðinum við Velbastaðvegin, har bygningur við møguligum umbyggingum kann fevna um skrivstovuhentleikar, matarhøli/fundarhøli, har pláss er fyri øllum starvsfólkunum, og garasju/verkstaði.

Øll hesi viðurskiftini verða at greina í komandi tilgongdini.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei
Fíggjarligu avleiðingarnar av at seta Lendis- og kirkjugarðstænastuna á stovn eru avmarkaðar, tí at verandi flokking av leiðaranum eisini rúmar tað víðkaða arbeiðsøkið, ið hann framyvir hevur ábyrgdina av.

Fyri hini fær bygnaðarbroytingin einans ta ávirkan, at tey framyvir hoyra til nýggja rakstrarstovnin – setanartreytir og arbeiðsuppgávur annars verða ikki ávirkaðar.

Um neyðugt verður at gera ávísar broytingar í hølisviðurskiftunum, verður mælt til, at játtan tá verður funnin til hetta.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. november 2025:** Kunnað varð um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. november 2025:** Kunnað varð um málið.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir málinum.

**Ískoyti**
Arbeiði við at leggja Kirkjugarðarnar, Lendisliðið og Moldgoymsluna saman í nýggja rakstrarstovnin Lendis- og kirkjugarðatænastan er komið væl áleiðis. Starvsfólkini í hesum trimum eindum eru nú partur av nýggja rakstrarstovninum, sum vísir til Býarskipanardeildina. Fyrrverandi leiðari á Kirkjugørðunum er nú dagligur leiðari á nýggja rakstrarstovninum. Nú restar bert í, at fíggjarligu viðurskiftini í sambandi við hesa umskipan verða endaliga avgreidd.

Tá tað kemur til fíggjarliga partin, so er lætt at leggja Kirkjugarðarnar og Lendisliðið undir felags fíggjarliga leiðslu, tá hesir stovnar báðir liggja undir grein 6 í fíggjarætlanini. Skotið verður upp, at leiðarin fyri nýggja stovnin fær neyðugu fíggjarligu heimildirnar til konto 6112, Fríðkan og viðlíkahald – Lendisliðið.

Eitt sindur meira krevst í sambandi við at Moldplássið skal flytast frá Kommunalu brennistøðini til nýggja stovnin. Av tí at Brennistøðin liggur á grein 7 í fíggjarætlanini, meðan nýggi stovnurin liggur á grein 6, er sambært játtanarreglunum neyðugt, at fíggjarliga millumrokningin millum stovnarnar verður viðgjørd sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir í býráðnum.

Niðanfyri sæst ein talva ið lýsir raksturin av Moldplássinum. Tølini fyri 2026 eru metingar (m) har bæði inntøkur og útreiðslur vaksa við 3 prosentum.

**Fíggjarlig greining av Moldplássinum**

| **Útreiðslur** | **2025** | **2026(m)** | **2-3-4. ársf. 2026(m)** |
|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur | 1.299.706 | 1.338.697 | 1.004.023 |
| Maskinur | 1.029.488 | 1.060.373 | 795.279 |
| Brennievni | 193.000 | 198.790 | 149.093 |
| Internet, telefon, kamera o.a. | 100.000 | 103.000 | 77.250 |
| El | 50.000 | 51.500 | 38.625 |
| **Tilsamans** | **2.672.194** | **2.752.360** | **2.064.270** |

| **Inntøkur** | **2025** | **2026(m)** | **2-3-4. ársf. 2026(m)** |
|---|---|---|---|
| Móttóka av tilfari (tyrving) | 1.559.546 | 1.606.332 | 1.204.749 |
| Søla av mold | 36.000 | 37.080 | 27.810 |
| **Tilsamans** | **1.595.546** | **1.643.412** | **1.232.559** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Munur** | **1.076.648** | **1.108.947** | **831.711** |

Ætlanin er, at fíggjarligu viðurskiftini verða endaliga avgreidd í 1. ársfjórðingi 2026, soleiðis at Brennistøðin er endaliga leys av Moldplássinum í seinasta lagi 31. mars 2026.

Sambært talvuni omanfyri er neyðugt at flyta 831.711 kr. frá Brennistøðini til nýggja stovnin. Játtanin hjá Brennistøðini verður sum úrslit minkað við hesi upphædd í 2026 og við umleið. 1,1 mió. kr í 2027.

Tað verður sostatt konto 6212 Fríðkan og viðlíkahald, Lendisliðið sum kemur at yvirtaka allar útreiðslur og inntøkur sum í dag hoyra Moldplássinum til.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 7110 | | Renovatión | 6212 | | Fríðkan og viðlíkahald, Lendisliðið | | 831.711 |

**Tilmæli**
Tekniski stjóri, leiðarin á býarskipanardeildini og leiðarin á náttúru- og umhvørvisdeildini mæla til, at:

- Kr. 831.711 verða fluttar av rakstrarkonto 7110 Renovatión, á rakstrarkonto 6212, Fríðkan og viðlíkahald, Lendisliðið.
- At málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi á Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen atkvøður blankt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annita á Fríðriksmørk, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein og Kári Johansen taka ikki undir við málinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við uppskotinum við tí broyting, at tann milliónin sum varð játtað brennistøðini í 2025 til ger av nýggjum skúri á moldplássinum, eisini verður flutt á rakstrarkonto 6212, Fríðkan og viðlíkahald, Lendisliðið. Sostatt skulu kr. 1.831.711 flytast av rakstrarkonto 7110 Renovatión á rakstrarkonto 6212 Fríðkan og viðlíkahald, Lendisliðið. Málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at fáa óhefta kanning av fíggjarstøðuni síðstu árini í kirkjugarðinum.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri, sjey atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen, Annfinn Brekkstein og Bergur Robert Dam Jensen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddi: Eingin.

Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, og Annfinn Brekkstein.

# 40/26 Útstykking oman fyri Argjahamar – øki 4 - 23/05733

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.02.2026 | 31/26 | 25/10998-5 |
| 2 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 40/26 | 25/10998-5 |

**Upprunin til málið**
Hetta mál er framhald av mál nr. 22/07223, sí skjal nr. *25/010998-6, Upprunalig málslýsing mál nr. 23_05733*, har tað er samtykt at:
- selja og sundirbýta øki 4 til tilboðsgevara, P/F Miðlon
- halda fram við samstarvinum við ráðgevan um víðari arbeiðið av uppskotinum til gerð av serstøku byggisamtyktini

Sí somuleiðis skjal nr. *25/05733-3, Økisskipan_byggiøki og fríøki_UOA_15juni2023,* har øki 4 er litað við gulum, og skjal nr. *25/05733-3, Útbjóðingartilfar_øki 4_compressed (1)*, sum er upprunaliga útbjóðingartilfarið.

**Lýsing av málinum**
Síðani samtyktina hevur tilboðsveitarin boðað kommununi frá, at P/F Miðlon ikki longur stendur við innlatna tilboðið, tí teir meta, at fyritreytirnar fyri ætlaðu verkætlanina eru broyttar, og at grundarlagið fyri at fremja verkætlanina tí ikki longur er til staðar.

Av hesum orsøkum verður málið um sølu av øki 4 ikki ført víðari í hesum umfari.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr.nr. 256 liggur í umráðisparti A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
Økið er ætlað til blandaða bústaða- og miðstaðabygging.
Útstykking kann bert fara fram sambært ásetingum fyri øki C í serstakari byggisamtykt omanfyri Argjahamar, har hesar ásetingar eru galdandi:

Stk. 3. Øki C

1. Økið verður lagt til miðstaða- og bústaðabygging.
2. Virksemið í miðstaðabyggingini skal kunna flokkast í umhvørvisflokki 1 smb. vegleiðing um umhvørvisflokking fyri vinnuvirki hjá Tórshavnar kommunu, tað kann t.d. vera handlar, frisør, matstovur, lækni og tílíkt tænastuvirksemi.
3. Niðaru hæddirnar, sum hava atkomu frá eystaru síðu, skulu vera til miðstaðabygging.
4. Ovaru hæddirnar, sum hava atkomu frá vestaru síðu, skulu vera til íbúðarbygging.
5. Byggingin skal verða sett samsvarandi einari góðkendari heildarætlan fyri økispartin.*
6. Mest loyvda byggistig er 0,25.
7. Mest loyvda nýtslustig er 0,8.
8. Mest loyvda hædd er 16,5 m, mált frá planeringshædd.
9. Byggjast kunnu í mesta lagi 4 hæddir og byggingin skal hava mønutekju, sum er javnfjarð við vegin.
10. Miðstaðabyggingin kann vera í einari ella tveimum hæddum. Miðstaðabyggingin skal altíð vera undir veghæddini omanfyri. Sí prinsippskitsu, ið er sýnd á skjali 3.
11. Íbúðarbyggingin kann vera í tveimum ella trimum hæddum.
12. Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu vera í samsvar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin metir, at tað gevur meining ikki at bjóða økið út av nýggjum júst nú, tí tað kunnu vísa seg at vera onnur kommunal áhugamál, sum eiga at verða staðsett í hesum økinum.
Tað hevur verið tosað um at finna eina staðseting til nýggja læknamiðstøð á Argjum, eisini kann tað vísa seg, at verða tørvur á plássi til barna- og ungdómsøki á Argjum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr. 23/05733, Útstykking oman fyri Argjahamar – øki 4

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
*25/10998-6, Upprunalig málslýsing mál nr. 23_05733*
*25/05733-3, Økisskipan_byggiøki og fríøki_UOA_15juni2023*
*25/05733-3, Útbjóðingartilfar_øki 4_compressed (1)*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:

- loka málið, við støði í at innkomna tilboðið frá P/F Miðlon er tikið aftur, og at tað tískil ikki verður arbeitt víðari við sølu av øki 4 í hesum umfari.
- beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við tólv atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Høgni Vilhelmsen.

# 41/26 Hegn kring viðarlundina í Havnardali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.02.2026 | 32/26 | 25/04939-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 29/26 | 25/04939-5 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 41/26 | 25/04939-5 |

**Upprunin til málið**
Fráboðan um at hegnið kring viðarlundina í Havnardali er illa farið.

**Lýsing av málinum**
Hegnið kring viðarlundina í Havnardali er illa farið, og tænir ikki sínum endamáli longur, nú seyður sleppur inn í viðarlundina at gera skaða á trøini. Sí luftmynd av viðarlundini, har verandi hegn er teknað upp við reyðum, sí skjal nr. *25/04939-6, Luftmynd yvir viðarlundina*.

Hegnið er sum heild illa rustað, og summa staðni er tað heilt illa farið. Somuleiðis liggur píkatráður og sløðist ymsa staðni.

Viðmælt verður at taka gamla hegnið niður, og seta nýtt hegn upp – uttan píkatráð.

Tað eru áleið 2600 metrar, sum skulu hegnast av nýggjum, og mett verður skilabest, at áleið 3-4 fólk skulu til uppgávuna. Arbeiðið kann byrja tíðliga í vár, 2026.

Kostnaðarmeting fyri arbeiðsløn og tilfar, 300 kr. pr. metur = kr. 754.000 u/mvg.

Kostnaðurin er mettur út frá øðrum hegnarbeiði, sum varð gjørt í 2022, har kostnaðurin pr. metur við tilfari og løn/arbeiði var kr. 240 u/mvg.

Tá períshækkingar hava verið í tíðarskeiðinum 2022-2026, so verður mett, at samlaði kostnaðurin liggur áleið á kr. 300 pr. metur u/mvg.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Av tí at eingin rakstrarjáttan røkkur til at fremja arbeiðið, má nýggj fígging finnast.

Áðrenn arbeiðið verður sett í gongd, verða friðingarmyndugleikarnir kunnaðir.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
*25/04939-6, Luftmynd yvir viðarlundina*

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 133<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

Eykajáttan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62998 | Fríðkan, bygdir og økir | 6275 | | | Hegn kring viðarlundina í Havnardali | 800.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- At arbeiðið at gera hegnið kring viðarlundina verður boðið alment út.
- At játtaðar verða kr. 800.000 av kt. 6275 Fríðkan av kommununi (íløgur), LK62998, Fríðkan, bygdir og økir á nýggja verkætlan við heitinum “Hegn kring viðarlundina í Havnardali” undir kt. 6275.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó so at peningurin ístaðin verður játtaður av kontu 6275, LK62999 Fríðkan av býnum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

## 42/26 Sauna/saunagos í Tórshavnar kommunu - 23/04346

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.06.2025 | 96/25 | 25/02597-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 39/25 | 25/02597-2 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 02.06.2025 | 44/25 | 25/02597-2 |
| 4 Havnanevndin | 03.06.2025 | 30/25 | 25/02597-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 109/25 | 25/02597-2 |
| 6 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 156/25 | 25/02597-2 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.09.2025 | 121/25 | 25/02597-2 |
| 8 Tekniska nevnd | 01.09.2025 | 55/25 | 25/02597-2 |
| 9 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.09.2025 | 55/25 | 25/02597-2 |
| 10 Havnanevndin | 02.09.2025 | 32/25 | 25/02597-2 |
| 11 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.09.2025 | 138/25 | 25/02597-2 |
| 12 Havnanevndin | 30.09.2025 | 40/25 | 25/02597-2 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.01.2026 | 23/26 | 25/02597-2 |
| 14 Tekniska nevnd | 12.01.2026 | 15/26 | 25/02597-2 |
| 15 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 12.01.2026 | 7/26 | 25/02597-2 |
| 16 Havnanevndin | 13.01.2026 | 2/26 | 25/02597-2 |
| 17 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 51/26 | 25/02597-2 |
| 18 Kollafjarðarnevndin | 24.02.2026 | 5/26 | 25/02597-2 |
| 19 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 42/26 | 25/02597-2 |

**Upprunin til málið**
Hetta málið er framhald av málinum við sama navni "Sauna/ Saunagos í Tórshavnar Kommunu" j.nr. 23/04346. Sí skjal *j.nr. 23/04346-4, Sauna/Saunagos í Tórshavnar kommunu*.

Í hesum málið varð samtykt í Byggi- og býarskipanarnevndini:

- At heimila umsitingini at fara undir at hoyra neyðugu myndugleikarnar og hoyringspartarnar í hesum sambandi um at fáa nýtsluloyvi til at skipa vælveruvirksemi, so sum hitapottar og sauna, í einum parti av á kaiøkinum í Hoyvík, í einum parti av strandarøkinum í Sandagerði og við Bátahylin í Kollafirði. (í mesta lagi 100m² í hvørjum einstøkum føri)
- At heimila umsitingini at nágreina staðsetingarnar og menna ein góðan sáttmálaleist til at gera avtalur við áhugafelagsskapir og fyritøkur, sum ynskja at bjóða vælveruvirksemi fram í økjum, sum kommunan vísir á.

Nú er umsitingin komin nakað væl longri við málinum, og tískil verður málið lagt fyri av nýggjum, fyri at fáa loyvi at bjóða ítøkilig økir út til sjóbundið vælveru- og trivnaðarvirksemi.

**Lýsing av málinum**
Umsitingin hevur fingið fyrispurningar frá áhugafelagsskapum og fyritøkum um at fáa loyvi til at bjóða fram vælveru- og heilsutilboð, sum t.d. sauna, hitapottar o.a. á ymsum økjum í kommununi.

Eins og í londunum rundan um okkum, eru fyribrigdi, sum sjódypping, hitapottar og saunasmáttur við sjóvarmálan partur av eini trivnaðar- og vælverumentan, sum er komin fyri at vera.

Í Tórshavnar Kommunu síggja vit, hvussu henda mentanin spírar millum fólk og ymsar áhugabólkar, har umstøðurnar loyva tí á ein meira ella minni tilvildarligan hátt. Fólk dyppa í dag á støðni í Hoyvíki (sokallaðu gl. Hoyvík), á Sandagerði, á Hvítanesi, í Kaldbak, í Kollafirði, í Nólsoy osfr.

Men av tí at umstøðurnar at hýsa hesi mentanini eru lutfalsliga óskipaðar í verandi løtu, ber illa til at menna tær á ein tryggan og tilætlaðan hátt.
Vansarnir við hesum lutfalsligu óskipaðu viðurskiftunum eru fleiri, eitt nú kann nevnast, at:

- Illa ber til hjá kommununi at halda yvirlit yvir, hvussu umstøðurnar eru í hvørjum einstøkum føri, og eftirlit er ikki við um viðurskiftini hjá veitaranum eru nøktandi í mun til trygd, atkomu o.a.

- Illa ber til hjá kunningarstovum, sum t.d. Visit Tórshavn at leiðbeina ferðafólki og borgarum annars um hetta sum áhaldandi tilboð á sínum miðlapallum, tá viðurskiftini eru óstøðug og har ongin bókingaskipan er í ávísum førum.

- Mannagongdirnar eru lutfalsliga ógreiðar og avmarkaðar í mun til, hvussu veitarin knýtir seg í streym og vatnleiðingar í teimum ymsu økjunum, sum verða brúkt.

- Eisini hevur hetta við sær, at spontanar loysnir, sum t.d. viðfestivognar við sauna ella hitapottum síggja heldur klossutar út, og lýta um í einum vøkrum øki sum til dømis niðri á støðni í Hoyvík.

Tískil er ynskiligt við meira skipaðum viðurskiftum á hesum økinum, sum bæði kunnu tryggja:

1. At almenningurin fær atgongd til eitt áhaldandi, størri og tryggari útboð av vælveru- og heilsutilboðum.

2. At vinnan/veitarin fær greiðari mannagongdir at fyrihalda seg til og betri karmar at skipa sítt virksemi undir.

3. At umsitingarligi parturin av hesum gerst smidligari fyri kommununa.

Umsitingin hevur umrøtt, hvussu hesi mál kunnu røkkast á smidligasta hátt, hvørji øki í kommuni eru hóskandi til at skipa slíkt virksemi, og hvussu kommunan kann lofta umsóknum og fyrispurningum um at sleppa at bjóða fram ymiskt vælveruvirksemi í kommununi.

Í tilgongdini í hesum málinum hevur umsitingin mett, at fleiri øki eru væl hóskandi til at hýsa slíkum virksemi. Flestu av hesum økjunum hava smávegis inntriv fyri neyðini, áðrenn tey kunnu verða gagnnýtt til endamálið, so sum tað, at streym- og vatnleiðing skal leggjast til økið, og onnur hava meira umfatandi avbjóðingar, so sum at kloakk-útlát er í nærumhvørvinum, ella at Tórshavnar kommuna ikki eigur lendið, og at t.d. brúksavtala fyrst má fáast í lag við lendiseigaran.

<u>Soleiðis kann tilgongdin skipast</u>
Uppskot til, hvussu tilgongdin kann skipast, sæst í lýsing í viðhefta skjali, sí skjal *j.nr. 25/02597-3, Staðsetingar og Leistur í sambandi við vælveruvirksemi í TK.* Útvaldu økini, sum umsitingin metir kunnu bjóðast út nú sum ein fyrsta roynd, síggjast í hesum sama skjalinum, umframt at uppskot til hvussu hetta kann verða skipað somuleiðis verður lýst.

Í skjalinum verður í fyrstu atløgu mælt til at fara undir at bjóða økir út í hesum støðum:

- Í bátahylinum í Álakeri. Her verður víst til tvær staðsetingar.

- Í og við bátahylin í Kollafirði. Onnur staðsetingin er har verandi ruskpláss er staðsett í dag, og tískil verður neyðugt at umskipa og møguliga flyta ruskplássið, um hendan staðsetingin skal bjóðast út. Hin staðsetingin í Kollafirði er við nýggju bátabrúnna.

- Við sandin/Malarenda í Nólsoy.

Sí viðhefta skjal *j.nr. 25/02597-3, Staðsetingar og Leistur í sambandi við vælveruvirksemi í TK,* har staðsetingarnar eru lýstar við kortskjølum.

Uppskot til sáttmála fyri leiguøki á sjónum úgreinar m.a. at leigukostnaðurin er settur til kr. 5.000 árliga (u.mvg). Hesin kostnaðurin, sum er viðmælti kostnaðurin frá Tórshavnar Havn, tekur støði í leigukostnaðinum fyri eitt vanligt ferðavinnubátapláss. Sí skjal *j.nr. 25/02597-5, Leigusáttmáli á landi_skabelón*.

Uppskot til sáttmála fyri leiguøki á landi við sjóvamálan útgreinar m.a. at árligi leigukostnaðurin er settur til kr. 42 pr. m² árliga (u.mvg) sum verður leigaður. Hesin kostnaðurin er somuleiðis viðmælti kostnaðurin frá Tórshavnar Havn, og er hann í samsvari við onnur leigugjøld í havnaøkjunum í kommununi. Sí skjal *j.nr. 25/02597-6, Leigusáttmáli á sjónum_skabelón*.

Brúksavtala um sjóvarmálan Í (gomlu) Hoyvík og í Sandagerði
Av tí at nógv tey mest nýttu økini til slíkt sjóbundið vælveru- og trivnaðarvirksemi eru økini á støðni í Hoyvík og í Sandagerði, verður mælt til, at kommunan fær í lag eina brúksavtalu um nevndu økir. Tað eru Búnaðargrunnurin og Føroya landsstýri, sum eiga og varða av hesum økjum.

Kommunan hevur tískil søkt Búnaðarstovuna um at kanna møguleikan til at fáa eina brúksavtalu í lag um økini, sum kunnu síggjast á viðhefta kortskjalinum *j.nr. 25/02597-4, Uppskot um øki fevnt av brúksavtalu - 09mai2025.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Kunnandi fundur var við aktørar innan økið fyri góðum 2 vikum síðani, har yvirskipaða ætlanin varð umrødd. Aktørarnir tykjast spentir og gleða seg at fáa viðurskiftini í rættlag.

Umhvørvisdeildin hevur gjørt vatngóðskuroyndir á teimum útvaldu staðsetingunum, sum hava fyrstu raðfesting. Hesar eru dagførdar 22. mai 2025. Vatngóðskukanningar verða eisini gjørdar í Álakeri um mánaðarskiftið mai/juni, og úrslitini av øllum hesum kanningunum kunnu síggjast á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu:

https://www.torshavn.fo/nattura-fritid-og-mentan/upplivingar-i-natturuni

Umhvørvisdeildin viðmerkir í hesum sambandi, at útbjóðingin av økinum í Álakeri má vera treytað av, at vatngóðskan á staðnum er nøktandi.

Tað kann skoytast upp í hetta, at um vatngóðskan á sjónum í Álakeri vísir seg at vera ivasom, so hava áhugaðir umsøkjarar sjálvir skotið upp, at køld kør við reinum vatni kunnu gerast á landi sum ein partur av teirra verkætlan, har t.d. saunagestir kunnu køla seg av. – Tað verður tá ábyrgd leigarans at kunna gestirnar um nýggjastu vatnkanningarnar hjá kommununi í økinum og biðja fólk taka alt neyðugt fyrivarni, um tey ætla sær á sjógv.

Viðvíkjandi ruskbingjunum við Bátahylin í Kollafirði, metir umhvørvisdeildin, at umstøðurnar við ruskskiljingini í Kollafirði kundu verið betraðar.

Í verandi løtu er trupult at sleppa eftir bingjunum, og tískil verður kranabilur týðum nýttur. Eisini er innhegnaða økið somikið trongt, at summar av bingjunum standa uttan fyri girðingina.

Í sambandi við ætlaninar um miðstaðarøkið í Kollafiriði um at skipa hetta økið sum trivnaðar- og vælveruøki, metir umhvørvisdeildin, at tað sømir seg, at ruskplássið í Kollafirði verður flutt á eitt betri hóskandi stað, og at hetta sjálvandi má gerast í tøttum samstarvi við Brennistøðina.

Í sambandi við júst hesa ætlanina við trivnaðar- og vælveruøkinum í Kollafirði, metir umhvørvisdeildin, at Í fyrstu atløgu ber til at umskipa hegningina / bingjurnar í økinum, soleiðis at tær standa betri, og at vælveruøkið fær tað plássið, sum er ætlað.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
23/04346, Sauna/saunagos í Tórshavnar kommunu
25/02604 Kollafjørður - Heildarætlan fyri miðstaðarøkið

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Nevnast skal, at veitarin/arnir sjálvir skulu tryggja, at øll myndugleikakrøv verða fylgd.

Umhvørvisdeildin upplýsir, at um ein umsøkjari søkir um loyvi at hava hitapott ella størri kør við vatni í, so skal søkjast um svimjihylsloyvi hjá Kommununi.

**Skjøl**
j.nr. 23/04346-4, Sauna/Saunagos í Tórshavnar kommunu
j.nr. 25/02597-3, Staðsetingar og Leistur í sambandi við vælveruvirksemi í TK.
j.nr. 25/02597-5, Leigusáttmáli á landi_skabelón
j.nr. 25/02597-6, Leigusáttmáli á sjónum_skabelón
j.nr. 25/02597-4, Uppskot um øki fevnt av brúksavtalu - 09mai2025

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | x | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | x | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjóri, stjórin á Havnaskrivstovuni, leiðarin á umhvørvisdeildini, leiðarin á teknisku deild og býararkitekturin mæla til:

- At heimila umsitingini at bjóða økini í Álakeri, í Kollafirði og í Nólsoy út til sjóbundið vælveru- og trivnaðarvirksemi.
- At farið verður undir tilgongdina at flyta verandi ruskpláss við bátahylin í Kollafirði til aðra staðseting í Kollafirði
- At senda málið til kunningar í avvarðandi staðbundnu nevndum
- At beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd, náttúru- og umhvørvisnevndina, og havnanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Anja Weyhe var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Havnanevndin 03. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Inn komu tríggjar umsóknir:

Ein umsókn um at leiga lendið á landi í bátahylinum við sjógv í Kollafirði. Tað er við áarósan á Botnánni í Kollafirði (í útbjóðingartilfarinum eitur hetta øki A í Kollafirði).
Umsøkjararnir eru Árni og Kitty Laksáfoss.

Og tvær umsóknir, sum kappaðust um økið í Álakeri (í útbjóðingartilfarinum eitur hetta øki A í Álakeri).

Teir umsøkjararnir eru Meinhard Egilsson Olsen vegna (spf Saunadypp), og Jan Zachariassen vegna (spf Saunagos)

Sí viðheftu tilboðini:
*Umsókn_Saunagus Við Sjógv Kollafyri_Árni Laksáfoss*, j. Nr. 25/02597-16
*Saunadypp_meinhard E Olsen_Umsókn samlad*, J. Nr. 25/02597-15
*Saunagos_Jan Zachariassen_Umsókn samlad*, J. Nr. 25/02597-14

Eingin umsókn kom inn um staðsetingina í Nólsoy.

Innkomnu umsóknirnar vórðu mettar sambært metingarmannagongdini, sum varð lýst í útboðstilfarinum, og niðurstøðan var, at Árni og Kitty Laksáfoss hava vunnið útboðið fyri Kollafjørð, og Meinhard E. Olsen hevur vunnið útboðið fyri Álaker.

Sí útbjóðingarfilfarið niðanfyri:
*Útbjóðingarskriv - vælveru og heilsutilboð*. J. nr. 25/02597-13

Umsitingin fer tískil víðari í eina sáttmálatilgongd við Árna Laksafoss um staðsetingina í Kollafirði og Fyritøkuna Saunadypp um staðsetingina í Álakeri.

**Skjøl**
J. nr. 25/02597-13, *Útbjóðingarskriv - vælveru og heilsutilboð*
J. nr. 25/02597-16, *Umsókn_Saunagus Við Sjógv Kollafyri_Árni Laksáfoss*
J. nr. 25/02597-15, *Saunadypp_meinhard E Olsen_Umsókn samlad*
J. nr. 25/02597-14, *Saunagos_Jan Zachariassen_Umsókn samlad*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, havnastjórin og býararkitekturin mæla til, at leigusáttmáli verður gjørdur við omanfyri nevndu vinnarar, og at málið verður beint í býráðið umvegis Fíggjarnevndina og Havnanevndina og til kunningar í teknisku nevnd, náttúru- og umhvørvisnevndini og staðbundnu nevndini fyri Kollafjørð.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. september 2025:** Viðvíkjandi Álakeri: Samtykt at taka av tilboðnum frá Saunagos. Viðvíkjandi Kollafirði: Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at ruskplássið verður flutt.

**Tekniska nevnd 01. september 2025:** Kunnað varð um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. september 2025:** Kunnað varð um málið.

**Havnanevndin 02. september 2025:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
<u>Viðv. útboðnum í Álakeri:</u>
Sí notat um útboð, spurningar innan avtalurætt og møgulig endurgjaldsábyrgd. *Vísast skal til skjal nr. 25/02597-60 í málinum*.

**Skjøl:**
25/02597-3 – "*Staðsetingar og Leistur í sambandi við vælveruvirksemi í TK*"
25/02597-13 - "*Útbjóðingarskriv - vælveru og heilsutilboð*"
25/02597-14 - "*Saunagos_Jan Zachariassen_Umsókn samlad*"
25/02597-15 – "*Saunadypp_meinhard E Olsen_Umsókn samlad*"
25/02597-16 – "*Umsókn_Saunagus Við Sjógv Kollafyri_Árni Laksáfoss*"
25/02597-60 – "*Notat - Útboð, spurningar innan avtalurætt og møgulig endurgjaldsábyrgd*"

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, Havnastjórin og býararkitekturin mæla til:
- at leigusáttmáli verður gjørdur við upprunaliga vinnaran, spf Saunadypp,
- og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina og havnanevndina og síðani til kunningar í teknisku nevnd og náttúru- og umhvørvisnevndini.

Um nevndirnar ikki ynskja at leigusáttmáli verður gjørdur við upprunaliga vinnaran, so mæla kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin til:
- at útboðið verður trekt aftur, og at støða verður tikin til um nýtt útboð skal skipast.
- Verður málið trekt aftur og viðgjørt av nýggjum, skulu greiðari ásetingar vera um metingargrundarlag og treytir, og hvussu hesi skulu vektast, um politiskt ynski er um at fáa eitt annað úrslit.
- Metingargrundarlagið og treytirnar skulu verða sakligar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, Kári Johansen, ynskja ikki, at leigusáttmáli verður gjørdur við upprunaliga vinnaran, men at útboðið verður trekt aftur, og at nýtt útboð verður skipað.

Annita á Fríðriksmørk tekur undir við at leigusáttmáli verður gjørdur við upprunaliga tilmælinum.

**Havnanevndin 30. september 2025:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Í August 2025 metti umsitingin í Tórshavnar kommunu, at sp/f Sauna Dypp vann almenna útboðið um at leiga eitt øki í Álakeri at nýta til saunavirksemi. Tað vóru einans tveir umsøkjarar. Áðrenn sáttmáli varð gjørdur við «metta vinnaran», varð avgerðin løgd fyri nevnd í byggi- og býarskipanarnevndini. Tikið varð ikki undir við avgerðini hjá umsitingini, og nevndin metti, at sáttmáli heldur skuldi gerast við hin umsøkjaran.

Báðir umsøkjararnir vórðu kunnaðir um hetta, og verkætlanin kann tískil ikki halda fram, fyrr enn nýggj støða verður tikin í hesum málinum.

Tann 16. desember 2025 legði Sp/f Sauna Dypp, sum var "*metti vinnarin*" sambært avgerðini hjá metingartoyminum í umsitingini í august 2025, sakarmál móti kommununi.

Sum rættarmálskrav ger "*metti vinnarin*" galdandi, at Tórshavnar kommuna skal verða dømd at viðurkenna, at hava endurgjaldsskyldu mótvegis Sp/f Sauna Dypp fyri ikki at geva Sp/f Sauna Dypp rætt til at leiga eitt lendi, sum Tórshavnar kommuna annars hevði givið Sp/f Sauna Dypp rætt til at leiga í 3 ár.

Vísandi til notat um útboð, spurningar innan avtalurætt og møgulig endurgjaldsábyrgd (*Vísast skal til skjal nr. 25/02597-60 í málinum*), kann kommunan saktans koma undir endurgjaldsábyrgd, av tí at " *metti vinnarin*" hevði hægri samlaðu metingina, sambært metingarskjalinum í útboðstilfarinum, og at kommunan ikki hevði sakligar orsøkir til heldur at velja "*metta taparan*" framum.

Í fyrra útboðnum var tað umsitingin, sum mannaði dómsnevndina. Talan var um starvsfólk á Býarskipanardeildini og Havnaskrivstovuni.

Um nýtt útboð verður skipað, so siga báðir tilboðsveitararnir frá fyrra útboðnum seg tó enn vera sinnaðar at lata tilboð inn.

Umsitingin hevur hugt at útbjóðingartreytunum av nýggjum, og er komin til ta niðurstøðu, at núverandi treytir eru nøktandi, og tískil eru treytirnar ikki broyttar í mun til upprunaligu treytirnar.

Mælt verður tí til, at leigusáttmáli verður gjørdur við upprunaliga vinnaran, Sp/f Sauna Dypp.

<u>Viðv. útboðnum í Álakeri:</u>
Sí notat um útboð, spurningar innan avtalurætt og møgulig endurgjaldsábyrgd. *Vísast skal til skjal nr. 25/02597-60 í málinum*.

**Skjøl:**
25/02597-3 – "*Staðsetingar og Leistur í sambandi við vælveruvirksemi í TK*"
25/02597-13 - "*Útbjóðingarskriv - vælveru og heilsutilboð*
25/02597-14 - "*Saunagos_Jan Zachariassen_Umsókn samlad*"
25/02597-15 – "*Saunadypp_meinhard E Olsen_Umsókn samlad*"
25/02597-16 – "*Umsókn_Saunagus Við Sjógv Kollafyri_Árni Laksáfoss*"
25/02597-60 – "*Notat - Útboð, spurningar innan avtalurætt og møgulig endurgjaldsábyrgd*"

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, havnastjórin og býararkitekturin mæla til:
- at leigusáttmáli verður gjørdur við upprunaliga vinnaran, sp/f Saunadypp,
- og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina og havnanevndina og til kunningar í teknisku nevnd og náttúru- og umhvørvisnevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. januar 2026:** Útsett.

**Tekniska nevnd 12. januar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 12. januar 2026:** Útsett.

**Havnanevndin 13. januar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Tilmælið í september 2025 til politiska støðutakan var soljóðandi:
*Tekniski stjórin, havnastjórin og býararkitekturin mæla til, at leigusáttmáli verður gjørdur við omanfyri nevndu vinnarar, og at málið verður beint í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina og Havnanevndina og til kunningar í teknisku nevnd, náttúru- og umhvørvisnevndini og staðbundnu nevndini fyri Kollafjørð.*

Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti viðv. Kollafjørð at taka undir við tilmælinum og at ruskplássið verður flutt.

Málið varð síðani beint til kunningar í teknisku nevnd, náttúru- og umhvørvisnevndini og havnanevndini. Havnanevndin, Fíggjarnevndina og býráðið hava sostatt ikki tikið støðu til tilmælið, ei heldur til samtyktina um at gera leigusáttmála um saunavirksemi í Kollafirði. Tískil verður málið nú lagt fyri hesar nevndir til støðutakan og til kunningar í staðbundnu nevndini.

**Tilmæli:**
Víst verður til tilmælið í september 2025.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur i Skála og Høgni Vilhelmsen tekur undir við at leigusáttmáli verður gjørdur við Saunagos við Sjógv, Kollafjørður og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 24. februar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Kári Johansen legði fram broytingaruppskot um at beina málið aftur í nevnd.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við trimum atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen.

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen.

Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

# 43/26 Dagføring av sertstøku byggisamtyktini fyri Argjaboða, matr. nr. 43g og 43h, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.05.2025 | 77/25 | 25/02905-4 |
| 2 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 137/25 | 25/02905-4 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2025 | 104/25 | 25/02905-4 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 43/26 | 25/02905-4 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna móttók 09.03.2022 umsókn um byggiloyvi til íbúðarbygging á matr. nr 43h. Umsóknin lýsir bygning niðanfyri Argjaboðagøtu við 16 íbúðum, og samtykt var at viðmæla umsóknini. Økið liggur innan fyri C3- miðstaðarbygging í almennu byggisamtyktini, og er krav um, at serstøk byggisamtykt verður gjørt fyri økið.

Serstøk byggisamtykt hevur síðani 2021 verið galdandi fyri matr. nr 43h (sí skjalið *SB_Argir_Argjaboði_2018_3_2021)*, ið er omanfyri Argjaboðagøtu, har verkætlan við 30 íbúðum er farin í gongd.

Hetta málið snýr seg um at víðka økið, sum serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, soleiðis at økið eisini fevnir um matr. nr 43h, og ætlanina at byggja 16 íbúðir har (sí skjal, *20240124_Myndugleikaprosjekt.pdf)*.

**Lýsing av málinum**
Ítøkiliga snýr broytingin seg um at rætta markið (sí *Kort 1 - Áðrenn* og *Kort 1 - Eftir broyting*), og at dagføra fylgiskjal 2 og 3, soleiðis at verandi serstaka byggisamtyktin fyri Argjaboða eisini rúmar íbúðarverkætlanina fyri matr nr. 43h (sí *Serstøk byggisamtykt fyri Argjaboða - Við dagføringum.)*

Umsitingin ásannar, at tað eru býarskipanarligir vansar við at staðaseta íbúðabygging við endan á Argjaboðagøtu, og eru hesir, at vegurin er smalur og í ringum standi, umframt at núverandi busssamband ikki koyrir eftir vegnum. Hinvegin kann økta íbúðarútboðið á Argjaboða tálma bústaðarneyðini og fjøltátta bústaðarviftuna fyri niðara part av Argjum (gomlu bygdina), har stórt sæð øll grundstykkini eru løgd av til sethúsabygging. Somuleiðis er staðsetingin skynsom til tess at økja um íbúðartalið uttan at taka útsýnið frá verandi bygging og uttan at byggja á meira miðskeiðis staði í býnum, har kostnaðarstøði sannlíkt verður munandi hægri.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
Økisásetingarnar eru:

*§ 17. Ásetingar fyri umráðispartin C3 í 3. grundumráði*
1. Umráðisparturin verður lagdur til miðstaðarbygging og íbúðir.
2. Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
3. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,4.
4. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,8.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur kannað søguligu gongdina fyri nær økið á Argjaboða varð broytt frá at vera vinnuøki til at gerast miðstaðarøki, sum loyvir íbúðarbygging. Vísandi til mál nr. *2003-1602, Meinhard Dam: Umsókn um broyting av ásetingunum av matr. nr. 43g, Argir – broyting av byggisamtykt á Argjaboða*, so er tað hendan umsóknin sum upprunaliga var við til at fremja broytingina í Almennu byggisamtyktini. Upprunaliga varð søkt um at broyta byggisamtyktina til A1 ella A3, og metti umsitingin, at rætta ásetingin fyri økið var

A3, tá tað varð grundgivið við, at tað var tørvur á fleiri bústøðum í kommununi, umframt at tá Argja kommuna var løgd saman við Tórshavnar kommunu, so varð mett, at tað vóru aðrar betri egnaðar staðsetingar til vinnuligt virksemi. Táverandi Innlendismálaráð metti ikki, at økið kundi broytast til bústaðarøki, tá tað lá so tætt uppat vinnuøkinum. Í 2008 varð økisásetingin fyri matr. nr. 43g broytt til C3, Miðstaðarbygging, sum loyvir íbúðarbygging, meðan restin av økinum framvegis lá sum vinnuøki. Seinni í 2008 varð restin av økinum á Argjaboða broytt til C3, Miðstaðarbygging.

Økið, sum uppskotið um serstaka byggisamtyktin fevnir um, verður økt til umleið 5630 m$^2$, og loyvir sambært verkætlanunum tilsamans 46 íbúðum við 54 p-plássum. Nýggja útboðið av íbúðum kann vera liður í at bøta um bústaðartørvin í Havnini. Staðsetingin er við endan á Argjaboðavegnum og er omanfyri 800 metrar burturi frá nærmastu bussleið. Tað er týdningarmikið, at nøktandi flytføri verður tryggjað eftir Argjaboðavegnum, soleiðis at tað er trygt at ganga, súkkla og koyra eftir vegnum.

Galdandi serstaka byggisamtykt varð góðkend av landsmyndugleikunum við treyt um, at strekkið fyribils verður regulerað við ljósregulering, áðrenn vegastrekkið verður breiðkað.
Tekniska deild upplýsir, at arbeitt verður við at gera ljósregulering fyri vegastrekkið Argjavegur til Argjaboðagøtu. Harumframt verður upplýst, at arbeitt verður við at nøkta atkomuna út á Argjaboða við at breiðka vegin, men verður vegastrekkið í fyrsta umfarið regulerað við ljósregulering.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Umsókn um prinsipployvi og møguligar viðmerkingar til byggiloyvi til íbúðarverkætlan á matr. nr. 43h, Argir*, journal nr. 22/01040
- *Nýggj serstøk byggisamtykt á Argjaboða, matr. nr. 43g, Argir,* journal nr 18/03069
- *Meinhard Dam : Umsókn um broyting av ásetingunum av matr nr. 43g, Argir - broyting av byggisamtykt á Argjaboða,* journal nr. 2003-1602

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Í viðgerð av málinum um Umsókn um prinsipployvi og møguligar viðmerkingar til byggiloyvi til íbúðarverkætlan á Argjaboða (mál nr: 22/01040) vísa byggimálsdeildin og tekniska deild á, at:
- Uttasti parturin av Argjaboðagøtu er ikki nøktandi til so nógva bygging, sum ætlanin er at gera afturat. Vegurin er uml. 5 m breiður, har eru ongar gongubreytir, onki vendipláss og ongi almenn parkeringspláss.
- Kloakkir og aðrar leiðingar eru heldur ikki nøktandi.
- Roknast má tí við, at kommunan má gera eitt prosjekt fyri at dagføra vegin og leiðingar, og at hetta arbeiði má setast í verk innan ikki alt ov langa tíð.
- Eisini eigur kommunan at umrøða, um kommunala bussleiðin ikki eigur at koyra út til Argjaboða, nú ætlanin er at byggja so nógvar nýggjar íbúðir á staðnum.

**Skjøl**
- *SB_Argir_Argjaboði_2018_3_2021,* journal nr 25/02905-6
- *Serstøk byggisamtykt fyri Argjaboða - Við dagføringum,* journal nr 25/02905-6
- *Kort 1 - Eftir broyting,* journal nr 25/02905-5
- *Kort 1 - Áðrenn broyting*, journal nr 25/02905-5
- *20240124_Myndugleikaprosjekt.pdf,* journal nr 25/02905-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at dagføra serstøku byggisamtyktina fyri Argjaboða sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt fyri Argjaboða - Við dagføringum*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. mai 2025:** Birgir Nielsen tekur undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen og Heidi Lava Elgeirsdóttir taka ikki undir við tilmælinum.

Kári Johansen atkvøður blankt. Birgir Nielsen og Kári Johansen krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Einmælt samtykt at beina málið aftur í nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2025:** Nevndin tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til, at málið verður tikið upp aftur, tá vegatkoman og verandi byggivirksemi eru broytt.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá umsitingini, ið varð samtykt við seks atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Bergur Robert Dam Jensen,.

Blankt atkvøddi: Heðin Mortensen og Annfinn Brekkstein.

# 44/26 Útstykking til sethús við Stórutjørn - 22/02943

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 32/25 | 25/00581-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 10.02.2025 | 6/25 | 25/00581-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 25/25 | 25/00581-2 |
| 4 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 57/25 | 25/00581-2 |
| 5 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 85/25 | 25/00581-2 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.02.2026 | 37/26 | 25/00581-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 21/26 | 25/00581-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 30/26 | 25/00581-2 |
| 9 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 44/26 | 25/00581-2 |

**Upprunin til málið**
Málið er framhald av málinum 22/02943 Útstykking til sethús við Stórutjørn

**Lýsing av málinum**
Viðgerðin av málinum higartil er lýst í málslýsingini fyri mál nr. 22/02943.
Í stuttum snýr málið seg um, at politiskt var ynski at seta gongd á bústaðarbyggingina við Stórutjørn.

Meðan arbeitt varð við at gera klárt til at bjóða arbeiðið at gera útstykking á økinum út, gav P/F Articon kommununi eitt tilboð upp á at útstykkja býlingarnar 1 og 4 úr heildarætlanini. Tilboðið var skipað sum heildararbeiðstøka, har kommunan innan fyri rammurnar av tilboðnum kundi gera tillagingar. Sáttmáli varð gjørdur áljóðandi kr. 79.320.642,13, íroknað mvg við afturbering til kommununa.

<u>Spillvatnsoptión</u>
Henda útstykkingin er so statt sambært samtykt sett í verk sum heildarverkætlan við P/F Articon sum heildarveitara. Afturat tilboðnum hevur P/F Articon givið eina optión upp á at stoypa reinsiverk og leggja kloakkering millum útstykkingarnar við Stórutjørn til reinsiverkið og millum reinsiverkið og útlát út á sjógv eystan fyri Sandvíkar. Kostnaðurin fyri hesa optión er kr. 7.078.911,56 íroknað mvg við afturbering.

Henda optiónin kann síggjast sum verkætlan fyri seg, tí at reinsiverk og kloakkering skal eisini gerast og bindast í høllina við Tjarnir, vinnuútstykkingina á Ovara Hjalla, umframt framtíðar útstykkingar við Stórutjørn (býlingur 2, 3, 5 og 6), soleiðis at økið verður virkið við nøktandi leiðingum. Sáttmáli varð ikki gjørdur um hesa optión í fyrstu atløgu.

Nú høllin við Tjarnir er um at verða liðug og vinnuútstykkingin á Ovara Hjalla verður liðug í summar, gerst tað alt meiri átroðkandi at fáa eina spillvatnsloysn til hesar útbyggingarnar, og tað er somuleiðis av hesi grund, at neyðugt er at taka støðu til spillvatnsætlanina fyri samlaða økið. Somuleiðis er neyðugt at fáa eina spillvatnloysn til útstykkingina við Stórutjørn, sum ikki kann leiðast í verandi spillvatnsloysnir í økinum, vegna ov smáar dimensiónir á leiðingunum og longu staðfestar avbjóðingar við verandi nýtslu.

Mett verður, at Tórshavnar kommuna eigur at fara undir at aktivera optiónina fyri spillvatnsloysnina fyri at tryggja, at høllin við Tjarnir og vinnustykkini á Ovara Hjalla kunnu takast í nýtslu, beinanvegin, sum tey eru liðug.

<u>Byggiharraútreiðslur og óvæntað</u>
Í upprunamálinum er einans játtaður peningur fyri sáttmálan við P/F Articon um heildararbeiðstøku. Nú arbeiðið er farið í gongd er tørvur á, at peningur eisini verður játtaður til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanararbeiðið. Her er talan um viðurskifti, so sum verkætlanarleiðsla, uttanhýsis eftirlit,

óvæntaðar útreiðslur o.l. Mett verður, at 5% av sáttmálaupphæddini eiga at verða játtaðar til óvæntaðar útreiðslur og 2,5% til verkætlanarleiðslu og uttanhýsis eftirlit. Tilsamans 7,5% ella kr. 6.480.000,-.

Keyp av lendi:
Tórshavnar kommuna hevur fingið tilsøgn frá Búnaðarstovuni at keypa lendi til víddar 74.000 m² til útstykkingina í býlingi 1 og 4, sí tilsøgn og kortskjal j.nr. 25/00581-3. Keypspeningurin áljóðandi kr. 8.424.500,00 skal játtast sum útlegg av verkætlanini.

Játtanaryvirlit
Í talvuni niðanfyri kann síggjast yvirlit yvir verandi játtan, og játtanirnar, sum biðið verður um afturat.

| **Dato** | **Játtan** | **Upphædd** |
|---|---|---|
| 20.06.2024 | Sáttmáli við P/F Articon um heildararbeiðstøku v. komm. mvg | 79.320.642,13 |
| - | Optión um spillvatnsleiðing v. komm. mvg. | 7.078.911,56 |
| - | Byggiharraútreiðslur og óvæntað 7% | 6.480.000,00 |
| - | Keyp av lendi | 8.424.500,00 |
| | **Tilsamans** | **101.304.053,69** |

Framhaldandi tilgongdin:
Fram til í dag hevur verið arbeitt við býlingi 1 og 4, sum í heildarætlanini verða nevnd oyggj 1 og oyggj 4.

Í málinum, Skipan av Stórutjørn (mál nr. 18/03468), varð samtykt á býráðsfundi 28.09.2023, at heildarætlanin fyri Stórutjørn skuldi nýtast sum vegleiðandi amboð fyri víðari menningina av økinum.

Arbeitt verður framhaldandi við at skipa býlingarnar niður í smálutir, soleiðis at tilgongdin verður gjørd rætt og gott.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu er galdandi fyri økið, og skal serstøk byggisamtykt gerast, tá prosjekteringin er liðug.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr. 18/03468 Skipan av Stórutjøn er yvirskipaða málið fyri økið. 28. apríl 2022 var málið seinast fyri býráðið, har tað varð endaliga samtykt, at:
- Játta fígging til keyp av lendinum til Innkomuvegin og komandi vinnuútstykkingina Ovari hjalli.
- at heimila umsitingini at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi í stigum til framtíðar útstykkingar burtur av matr. nr. 1æf og 139ed. So hvørt, sum tørvur er á fígging, verður málið lagt fyri aftur avvarðandi nevndir til støðutakan.
- at heimila umsitingini at samráðast við og gera avtalu við festaran um avlopstilfar og um at framtíðartryggja møguleikarnar at reka landbúnaðarvirksemi á festinum. Avtalan verður at leggja fyri aftur og góðkenna av avvarðandi nevndum.

Mál nr. 22/02943 Útstykking til sethús við Stórutjørn (arkiverað upprunamál)

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
J.nr. 22/02943-4 VS: Útstykking við stórutjørn – sjálvboðið tilboð

## Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: Deild | Verk-ætlan | Navn | Játtast á: Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | 6475 | L64021 | Útstykking við Stórutjørn, B1, B4 | | 21.983.411,56 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 101.304.053,69 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024/2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500.000 |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at:

- gera sáttmála við arbeiðstakara um loysn fyri spillvatn frá Stórutjørn við støði í optiónini áljóðandi kr. 7.079.000,-, sum verður fíggjað sum útlegg á verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn, B1, B4, kt, 6475 Byggibúning bústaðir.
- at játtað verða 7,5% av arbeiðstøkusáttmálanum svarandi til kr. 6.480.000,- til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanarleiðslu, uttanhýsis eftirlit, óvæntaðar útreiðslur og líknandi í sambandi við heildararbeiðstøkuna,-, sum verður fíggjað sum útlegg á verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn, B1, B4, kt, 6475 Byggibúning bústaðir.
- at játtaðar verða kr. 8.424.500,- til útreiðslur í sambandi við keyp av lendi til verkætlanina.
- at málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at arbeiðið við at gera kloakkina frá reinsiverkinum og út á sjógv skal bjóðast út.

**Tekniska nevnd 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Við hesi umbøn um eykajáttan verður biðið um at hækka upprunaliga útleggið í jnr. 22/02943 á kr. 79.320.642,13 við kr. 21.983.411,56, soleiðis at samlaða útleggið til útstykkingina við Stórutjørn verður 101.304.053,69.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri broyting, at arbeiðið at gera kloakk og reinsiverk verður boðið út. Játtaðar verða kr. 6.480.000,00 til byggiharraútreiðslur og óvæntað 7% og kr. 8.424.500,00 til keyp av lendi sum eykajáttan, ið tørvar tvær viðgerðir í býráðnum.

Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við fyrstu viðgerð við 11 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímót og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen

Uppskotið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Sunnvá Dahl Høgfeldt, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

**Ískoyti**
Umsitingin er biðin um at gera dagføringar í útstykkingararbeiðinum, soleiðis at fleiri íbúðareindir verða enn í upprunauppskotinum.

Væntaða útreiðslubýtið til dagføring av verkætlanina verða mettar til:

1) Keyp av manglandi lendi – kr. 3.500.000,-
   Í hesari verkætlanini eru longu goldnar 8,4 mió til Búnaðarstovuna fyri 74.000 m2 av íalt 104.000m2. Fyri teir írestandi 30.000 fermetrarnar skal sostatt rindast uml 3,5 mió íroknað kostað fyri lendi, frábýtingarútreiðslur, tinglýsingargjald og sakargjald.

2) Matrikulering - kr. 4.000.000,-
   Umhvørvsstovan tekur matrikuleringssgjald sambært galdandi ásetingum

3) Index av ca. 120.000.000 - kr. 3.600.000,-
   Kostnaðarstøðið fyri allari verkætlanini verður mettur til í minsta lagi kr. 120 mió og mett verður at prísvøksturin verður ca 3% p.a.

4) Øking av íbúðareindum - kr. 20.000.000,-

Umsitingin hevur móttikið tilboð arbeiðstakaranum upp á kr.20 mió kr. um broyting av verkætlanini um øking av íbúðareindum frá 150 til 420.
Víst verður til skjal nr. 25/00581-257

**Skjøl**
Víst verður til mál nr. 25/08816 "Skipan av býlingum við Stórutjørn", har býráðið her tann 23. oktober 2025 samtykti skipanina av býlingunum og umsitingin framhaldandi arbeiðir eftir tí leistinum.
25/08816-1 Skipan av býlingum við Stórutjørn
25/00581-27 Bústaðir Stóratjørn_dagførd arbeiðstekning 15 nov 2025_c.jpg

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Dagføringin av verkætlanini hevur við sær ein meirkostnað á umleið kr. 32 mió. Henda metta upphædd kann býtast upp í hesi viðurskifti (uttan fjarhita sí mál nr. 26/00599)

5) Keyp av manglandi lendi kr. 3.500.000
6) Matrikulering kr. 4.000.000
7) Index av ca. 120.000.000 kr. 3.600.000
8) Øking av íbúðareindum kr. 20.000.000

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útlegg | 6475 | L64021 | Ústykking við Stórutjørn, B1 og B4 | | 32.600.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 126.825.142 |
| Áður játtað | Upphædd: | 94.225.142 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | Ultimo 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500.000 |

**Tilmæli**
Tekniski stjóri, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at
1. útleggið til verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn, B1 og B4, verður hækkað við 32,6 mió kr., sum eykajáttan til kr. 126.825.142,-.
2. At málið verður beint umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina í býráðið til tvær viðgerðir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur støðu á seinni fundi.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Anja Weyhe, Guttormur í Skála, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at seta eina bygginevnd.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við átta atkvøðum ímóti, fimm atkvøðum fyri og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddi: eingin.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og ongum blankum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: eingin.

# 45/26 Fjarhiti til útstykkingina Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.02.2026 | 38/26 | 26/00599-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 25/26 | 26/00599-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 35/26 | 26/00599-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 45/26 | 26/00599-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 09.03.2026 | 44/26 | 26/00599-1 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. 25/00581

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við útstykkingararbeiðið á Stórutjørn, skal støða verða tikin til um farast skal undir arbeiði at leggja fjarhita ella ikki. Fjarhitafelagið hevur boðað frá, at fíggjarligt rúm er ikki til at bera kostnaðin at leggja fjarhitaleiðingar. Tískil er neyðugt at kommunan í samstarvi við Fjarhitafelagið rindar fyri arbeiðið eins og gjørt er í sambandi við veitan av fjarhitaleiðingum til vinnustykki á Ovara Hjalla. Víst verður til mál nr. 22/01377 og 25/01179

Vísandi til at útstykkingararbeiðið er longu sett í verk í 2024 og at støða enn ikki er tiknin um at fjarhitaleiðing, er neyðugt er at taka eina skjóta avgerð so arbeiðið ikki steðgar upp. Vanliga hevur Fjarhitafelagið ikið sær av at veita og leggja fjarhitaleiðingar, men orsaka av væntandi haldføri hjá felagnum er støða ikki tikin til hetta eftir at farið var undir ústykkingararbeiði.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
26/00599-2 Upplegg til sáttmála millum Tórshavnar kommunu og Fjarhitafelagið ver5.docx
25/08816-5 137/25 Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 29.09.2025 Skipan av býlingum við Stórutjørn
25/08816-2 Upprunalig málslýsing mál nr. 25_00581 Útstykking til sethús við Stórutjørn 22_02943
25/08816-1 Skipan av býlingum við Stórutjørn
25/00581-2 Útstykking til sethús við Stórutjørn - 22/02943
25/01179-1 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla - 22/01377

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Verkætlanin at leggja fjarhitarør í Stórutjørn verður mett at kosta uml. kr. 8 mió. Talan er um prosjektering, at veita og leggja fjarhitarør og eftirlit. Neyvari kostnaðarmeting fyriliggur, tá ið prosjekteringsarbeiðið er liðugt væntandi primo apríl 2026.

| | **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 152<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | Útlegg | 6475 | | | Fjarhiti til útstykking til Sethús Stórutjørn | 8.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 8.000.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | ultimo 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:

1) heimila umsitingini at gera avtalu við Fjarhitafelagið um planlegging, fremjan og avhandan av fjarhitaanleggi til býlingarnar B1 og B4 við Stórutjørn.
2) kr. 8 mió. verða játtaðar til at leggja fjarhita o.a. í sambandi við hetta útleggið til verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn, B1 og B4, verður hækkað við 8 mió kr., sum eykajáttan til kr. 134.825.142.
3) beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur støðu á seinni fundi.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, við tí nágreining at endalig avtala við Fjarhitafelagið verður løgd fyri býráðið aftur til góðkenningar, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

| | Býráðsfundur<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 153<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 46/26 Átøk á vegnum Úti á Heyggi og á Bakkavegnum á Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 20/26 | 26/00219-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 38/26 | 26/00219-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 46/26 | 26/00219-1 |

**Upprunin til málið**
Áheitan er komin frá nevndarlimi í teknisku deild, um at fáa ymiskt gjørt á vegunum Úti á Heyggi og á Bakkavegnum á Velbastað.

**Lýsing av málinum**
Á vegnum Úti á Heyggi er ynski um at fáa málað 30 km á vegin, og annars at seta upp manglandi ferðsluskelti í bygdini. Hetta kann fíggjast av rakstrarkontu 8115, Vegir o.a. Planlegging.

Ynski er eisini um at fáa asfalterað strekkið á Bakkavegnum, frá brunninum og niðan á bygdavegin, strekkið er áleið 300 m. Arbeiðið er mett til kr. 420.000. Víst verður á, at hetta kann fíggjast av konto 8175, Vegir (íløgur), løgukarmi LK81063, Vegagerð Gerðisbreyt Velbastað.

**Skjøl:**
Tekning 26/0219-2

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81063 | Vegagerð Gerisbreyt Velbastaður | 8175 | | | Asfaltering av Bakkavegi á Velbastað | 420.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At mála 30 km á vegin Úti á Heyggi, og annars at seta upp manglandi ferðsluskelti í bygdini. Hetta kann fíggjast av rakstrarkonto 8115, Vegir o.a. Planlegging.
- At asfaltera strekkið á Bakkavegnum, frá brunninum og niðan á bygdavegin, at játtað kr. 420.000 av konto 8175, Vegir (íløgur), løgukarmi LK81063, Vegagerð Gerðisbreyt Velbastað, inn á nýggja verkætlan: Asfaltering av Bakkavegi á Velbastað.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Elsa Berg luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

# 47/26 Fjallasúkklubreyt til Oyggjaleikir 2027

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.11.2025 | 121/25 | 25/09594-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.11.2025 | 211/25 | 25/09594-2 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 300/25 | 25/09594-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 11.02.2026 | 29/26 | 25/09594-2 |
| 5 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 47/26 | 25/09594-2 |

## Upprunin til málið

Umbøn frá Sersambandinum fyri Súkkling og Triathlon (SST), at byggja eina altjóða góðkenda fjallasúkklubreyt í Flatnahaga/vesturvarða, í sambandi við Oyl 2027.

## Lýsing av málinum

Tann 21.10.2025 var SST á fundi við TK viðv. nýggja fjallasúkklubreyt. Umframt at fjallasúkklubreyt er týdningarmikið fyri Oyl 2027, so hevur slík breyt, sbrt. SST, eisini **stóran trivnaðar- og samfelagsligan týdning:**

1. Skúlar kundu brúkt hana sum eitt náttúrligt og trygt læruumhvørvi fyri børn og ung at lært at handfara súkklu.
2. Hon hevði kunnað styrkt **súkklutrygdina**, við at børn og ung læra at súkkla undir tryggum og skipaðum umstøðum – vekk frá ferðsluni og vekk frá gongubreytum.
3. Breytin hevði gjørt tað møguligt hjá bæði børnum og vaksnum at spæla, venja og læra súkkling í einum umhvørvi, sum er bæði sunt og fjølbroytt.

Samlaði kostnaðurin fyri alla verkætlanina er 9.459.901 kr uttan MVG. Hetta er við projektering, ráðgeving frá Kanadiskum serfrøðingi, útinning og 10% í óvæntaðum.

SST hevur boðað TK frá, at tey hava fingið 500.000 kr. í stuðli frá føroyskari fyritøku til fjallasúkklubreytina. SST boðar frá, at partur av hesari upphæddini skal brúkast til projektering.
Harumframt hevur SST køn fólk, sum fara at søkja út útlendskum fondum. Fleiri freistir eru um árskiftið 2025/26. Í samband við hetta arbeiðið krevst ein tilsøgn um fíggjarligan stuðul frá TK. SST leggur upp til eina tilsøgn á 3,5 mió kr. fram til 2027.

Vísandi til skjal 25/09594-1 SST leggur upp til fylgjandi leist:

Stig 1) Projektera og gera part av fjallasúkklubreytini oyggjaleikaklára. Kostnaður 4 mió kr. TK gevur eina tilsøgn á 3,5 mió kr. fram til 2027
Stig 2) Gera eitt felagshús við startmálið á við gomlu ríðingabreytini á Marknagilið. Kostnaðurin er mettur at verða 2 mió kr.
Stig 3) Gera restina av verkætlanini klára.

Í oyggjaleikahøpi brúkar man hugtakið "Legacy of the game". Tvs. hvat liggur eftir í samfelagnum eftir einar oyggjaleikir. Innan oyggjaleikirnar í 1989, høvdu Føroyar onga rennibreyt, og tí íðkaðu vit ikki frælsan ítrótt, sum vit síggja í dag. SST ynskir at ein altjóða fjallasúkklubreyt verður "Legacy of the games" í 2027.

## Lógir, ásetingar o.a.

| | **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 156<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
**15/03842 (Umsókn um lendi til fjallasúkklurás)**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáleiðarin mæla til at geva SST eina tilsøgn upp á samanlagt kr. 2.000.000 kr. komandi ár, treytað av, at upphæddin verður sett av á fíggjarætlanini 2026.

**Mentamálanevndin 05. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, um tilsøgnina á 2.000.000 og beina málið í fíggjarnevndina.

Mentamálanevndin setur sum treyt at ein nýggj staðseting verður funnin, um ikki verandi uppskot kann tillagast, soleiðis at nevndin kann taka undir við staðsetingini. Partar, sum hava virksemi í økinum skulu hoyrast og atlit má takast til ávirkanina í náttúruni.

At leggja fyri mentamálanevndina aftur.

**Fíggjarnevndin 19. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti 4. desember 2025**
Sbrt. mál 25/09786 (Eykajáttan av meirinntøkum 2025) eru 2.000.000 kr. settar av til nýggja fjallasúkklubreyt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

- At geva Sersambandinum fyri Súkkling og Triathlon (SST) tilsøgn upp á kr. 2.000.000 í 2025 til nýggja fjallasúkklubreyt. Upphæddin verður játtað av 5370 Stuðul til íløgur.
- Stuðulin og tilsøgnin er treytað av, at øll neyðug loyvi eru fingin til vega.
- At beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Borgarstjórin legði fram broytingaruppskot um at taka undir við tilmælinum um at geva tilsøgn um stuðul kr. 2 mió av 5370 og at uppskot um staðseting av súkklubreyt verður lagt aftur fyri mentamálanevndina til góðkenningar.

Atkvøtt varð fyri broytingaruppskotinum, ið varð samtykt við tólv atkvøðum fyri og einari blankari atkvøðu.
.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein

Atkvøddu blankt: Kári Johansen

**Ískoyti:**
TK hevur skipað fyri tveimum fundum við viðkomandi partar í rossaumhvørvinum í Havnardali og við Oyggjarvegin, og súkklusambandið (SST).

Endamálið við fyrsta fundinum var, at SST og rossafólkini kundu greiða frá sínum sjónarmiðum við møguligari fjallasúkklubreyt í Flatnahaga/frá Vesturvarða.

SST vísir á, at økið er ideelt til fjallasúkkling, bæði tí at lendið er gott, og tí tað liggur stutt frá vesturbýnum. Stutta frástøðan ger, at t.d. børn hava nemmari koma til breytina. Samstundis vísur SST á, at tey hava longu brúkt pengar og orku upp á økið, og at kommunan hevur sjálv víst á økir í Flatnahaga, herundir eisini partvís við Vesturvarða. Hetta sær man í málsgongdini í mál 15/03842 (Umsókn um lendi til fjallasúkklurás).

Rossafólkini greiddu frá hvat ross er fyri eitt djór, og at tað kann verða farligt, at ross og fjallasúkklur eru ov tætt saman. Tað má verða ein ávís fjarstøða, so vandastøða ikki tekur seg upp. Og her metta tey, at uppskotið um fjallasúkklubreyt kom ov tætt við teirra virksemi, sum tey eisini hava brúkt brúkt pengar og orku upp á.
Avtalað var, at SST ger eitt tillagað uppskot, har einans stutta oyggjaleikabreytin er.

Á næsta fundinum, tann 7. Januar 2026, leggur SST eitt tillagað uppskot fram. Her er talan um tað stuttu oyggjaleikabreytina. Tað tættasta breytin kemur at verandi grúsgøtum er 30m. Tó eru tvey íbindingarpunkt til breytina, eitt við “undir Fjalli” og eitt undir gamla startmálinum við gomlu ríðingarbreytina.

SST boðar frá, at tey hava longu brúkt ½ mió upp á hesa verkætlanina, og um breytin verður flutt, so dýrkar verkætlanin og verður samstundis seinkað.

Rossafólkini boða frá, at økt virksemi við einari fjallasúkklubreyt ger, at fleiri súkklur koma til økið, áðrenn tey skulu inn á fjallasúkklubreytina. Tey vísa á, at á sumri fara áleið 100 ross eftir grúsgøtuni kring fjallasúkklubreytina um dagin, og spyrja um hvør hevur ábyrgdina um nakað hendir. Rossini í Havn blivu í sínari tíð flutt í Havnardal, so

tað m.a. ikki skuldi uppstanda óhepnar støður. Rossafólkini boðaðu frá, at teirra fyrsti prioritetur og tilráðing er, at fjallasúkklubreytin verður staðsett aðrastaðni, í t.d. Húsahaga ella á økinum við "Dynamithúsið/vatnbrunnin.

Á fundinum bleiv kjakast um hvussu man kann skelta seg til, at økið verður betri skipað. Støðan í dag er, at ongin skelting er við grúsgøtuna, og tí brúka bæði hestar, gongufólk, súkklur og prutl gøtuna. Sbrt. rossafólkunum, hevði ein gøta undir Skotabrúnni og inn Havnardal hjálpt báðum ríðingafeløgunum, tó ikki Berghestum.

Eisini var kjakast um, at um Oyggjaleikabreytin skal víðkast til eina størri breyt í framtíðini, sbrt. upprunatekningini, so ynskja rossafeløgini trygd fyri, at hetta ikki hendir. Støðan hjá SST er, at størra fjallasúkklubreytin nýtist ikki at verða á sama stað sum oyggjaleikabreytin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja uppskotið um Oyggjaleikabreyt.

**Mentamálanevndin 11. februar 2026:** Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Heðin Mortensen og Bergur Robert Dam Jensen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Annfinn Brekkstein legði fram broytingaruppskot um at finna aðra staðseting

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddi: Eingin.

Síðani varð atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í mentamálanevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

# 48/26 Keyp av tunnilsgróti frá EST

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 19/26 | 25/10813-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.02.2026 | 20/26 | 25/10813-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 34/26 | 25/10813-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 48/26 | 25/10813-1 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. 21/02196 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK og mál nr. 22/01377 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla.

**Lýsing av málinum**
Býráðið samtykti 21.12.2022 at gera sáttmála við P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil (EST) um keyp av 200.000 m³ av gróti í føstum máti (360.000 m³ í leysum máti) frá Sandoyartunlinum fyri eina upphædd á kr. 10.800.000,- (u/mvg), har av kr. 5.000.000 (u/mvg) skuldu gjaldast við undirskrift. Hetta var at fíggja við útleggi av konto L69004 Vinnuútstykking Ovari Hjalli undir deild 6975 Byggibúning ídnaðarøkir (íløgur). Sáttmálin bleiv undirskrivaður sama dag, sum málið bleiv samtykt í býráðnum.

15. februar 2023 verða kr. 5 mió. fluttar til EST. Eftir hetta steðgar málið upp, og EST hevur ikki fingið tær 5,8 mió. kr (u/mvg), sum teimum eru til góðar. Sambært § 2 í sáttmálanum, so skuldi manglandi upphæddin á kr. 5,8 mió. (u/mvg) gjaldast til EST í seinasta lagi 10. januar í 2025. EST rykti feiri ferðir eftir peninginum í fyrru hálvu av 2025, uttan úrslit.
Avleiðingin av hesum er, at EST frá 1. august 2025 byrjaði at tilskriva mánaðarliga rentu á 1,25% av restskuldini. Við árslok 2025 var kostnaðurin av hesum vorðin kr. 461.488.

Hví steðgar málið upp?
Viðgerðin av hesum keypi fer fram í tveimum ymiskum málum, og tað er sannlíkt tað, sum hevur ørkymlað og gjørt, at ivi er sáddur um, hvørt fíggjarlig heimild er til at útgjalda peningin, ið kommunan skyldar EST.

- Í fyrsta málinum (21/02196 málið um stuðulslóg) er tilmæli, at sáttmáli verður gjørdur við EST. Tilmælið um at gera sáttmálan er eitt av fleiri punktum, sum verða viðgjørd undir einum, og verða tey viðgjørd sum "vanlig játtan", sum einans krevur eina játtan í býráðnum. Men júst málið um keyp av gróti frá EST er eitt útleggsmál, har tað stendur, at tað er L69004 (Vinnustykkini) sum leggja út fyri keypið av grótinum. Hetta punktið átti tí helst at verið viðgjørt sum eitt eykajáttanarmál, sum krevur 2 viðgerðir í býráðnum. Men býráðsins vilji hevur heilt klárt verið, at ein sáttmáli bleiv gjørdur. Tó kann ivi valda um, hvørt heimildin er í lagi.

- Í seinna málinum (22/01377 um Vinnustykkini) er júst sama uppskot til sáttmála við EST við í tilmælinum, hesaferð sum ein eykajáttan. Men tá málið er fyri í byggi- og býarskipanarnevndini 19. juni 2023, verður punktið um keyp av gróti frá EST tikið burtur úr málinum. Hetta komst av, at semja ikki var um tey árin á umhvørvið, ið nógva koyringin gjøgnum Havnina fór at hava við sær. Málið fer víðari til tvær viðgerðir, men uttan punktið um grótkeypið. Tí er heimildin ikki givin í hesum uppskotinum.

Fyri at eingin ivi skal valda, verður málið um keyp av gróti frá EST nú lagt fyri aftur, soleiðis at Tórshavnar Kommuna heldur sínar skyldur, og rindar EST restskuldina á kr. 5,8 mió. (u/mvg). Um Býráðið tekur undir við málinum, valdar eingin ivi um heimildirnar handan avtaluna við EST, og restupphæddin á kr. 5,8 mió. (u/mvg) kann sostatt útgjaldast.

Skotið verður upp, at rokningin verður deild í tríggjar partar, har verkætlanin um vinnustykkini rindar ein triðing, Løgukarmurin Vegaverkætlanir rindar ein triðing, og konta 6177 – Umsiting og røkt av bygningum rindar ein triðing. Við kommunalum MVG er restupphæddin 6.162.500 kr.

Fyri at taka samanum, so kemur heimildin endaliga uppá pláss viðvíkjandi teimum fyrstu kr. 5 mió. (u/mvg), sum vóru útgoldnar til EST. Eisini verður heimild nú til at gjalda restskuldina á kr. 5,8 mió. (u/mvg). Málið veður viðgjørt sum eykajáttan og skal sostatt tvær ferðir fyri býráðið.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr. 21/02196 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK og mál nr. 22/01377 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
21/02196-2 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK
22/01377-1 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6975 | L69004 | Útlegg | | | P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil | | 2.054.167 |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | | | P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil | | 2.054.167 |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | | | P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil | | 2.054.167 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til,

- at játtaðar verða kr. 6.162.500 til at rinda EST restskuldina í sambandi við avtaluna um grótkeypið sambært niðanfyri standandi býti:
  1. Kr. 2.054.167 verða goldnar sum útlegg í verkætlan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla undir konto 6975 Byggibúning ídnaðarøki.
  2. Kr. 2.054.167 verða goldnar av LK81999 Vegaverkætlanir undir konto 8175 Vegir.
  3. Kr. 2.054.167 verða goldnar av LK61705 Orkupolitikkur undir konto 6177, Umsiting og røkt av bygningum, Orkuátøk.
- at málið verður beint í býráðið umvegis, teknisku nevnd, náttúru- og umhvørvisnevndina og Fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Anja Weyhe, Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til viðmerking sínar í undanfarnu viðgerð av málunum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annita á Fríðriksmørk, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til viðmerkingar sínar í undanfarnu viðgerð av málunum (19. juni í 2023).

Kári Johansen tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til at pengarnir verða játtaðir av Orkupolitikkinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við uppskotinum við tí broyting, at øll upphæddin á kr. 6.162.500 í fyrstu syftu verður flutt av LK81999 Vegaverkætlanir yvir á og goldin av verkætlan L81037 Innkomuvegur undir konto 8175.

Hetta er treytað av, at upphæddin verður flutt afturá konto 8175, tá ið meirinntøkurnar 2026 koma til viðgerðar síðst í hesum árinum og at beina málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum.

Ein annar minniluti Høgni Vilhelmsen tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

# 49/26 Kanningar í sambandi við møguligan parkeringstunnil í Havn - 19/01708

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 31/26 | 26/00500-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 36/26 | 26/00500-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 49/26 | 26/00500-1 |

**Ískoyti**
Málið er upprunaliga lýst í jnr. 19/01708-1 Kanningar í sambandi við møguligan parkeringstunnil í Havn, ið er lagt við sum fylgiskjal.

Ynskt var at kanna møguleikan at gera ein parkeringstunnil. Í tí sambandi var stovnað verkætlan L81035, Kanningar ísv møguligan parkeringtunnil í Havn.

Prosjektering av parkeringstunlinum er liðug, og verkætlanin verður nú løgd fyri teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið at loka.

Tá verkætlanin var liðug restaðu í kr. 42.331, sum verða at fíggja av løgukarminum LK81999 Vegaverkætlanir, undir konto 8175 Vegir (íløgur).

**Skjøl**
jnr. 19/01708-1 Kanningar í sambandi við møguligan parkeringstunnil í Havn

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | L81035 | Kanningar ísv møguligan parkeringstunnil í Havn | | 42.331 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- Verkætlanin L81035, Kanningar ísv møguligan parkeringtunnil í Havn, verður lokað.

- At hallið á kr. 42.331 verður fíggjað av Løgukarmi LK81999, Vegaverkætlanir, undir konto 8175 Vegir (íløgur).
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Samtykt við tólv atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddi: Eingin.

Blankt atkvøddi: Kári Johansen,.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 164<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 50/26 Dagføring av kloakk leiðingum Mikkjalstrøð, Tórshavn - 20/03621

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 28/26 | 26/00526-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 33/26 | 26/00526-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 50/26 | 26/00526-1 |

**Ískoyti**
Málið er upprunaliga lýst í jnr. 20/03621-37 Dagføring av kloakk leiðingum Mikkjalstrøð, Tórshavn, ið er lagt við sum fylgiskjal.

Verkætlanin er liðug og verður nú løgd fyri teknisku nevnd, fíggjarnevnd og býráð at loka.

Tá verkætlanin var liðug restaðu í kr. 307.000, sum verða at fíggja av løgukarminum LK68999 Kloakkir undir konto 6875 Kloakkir (íløgur).

**Skjøl**
20/03621-37 Dagføring av kloakk leiðingum Mikkjalstrøð, Tórshavn

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | L68038 | Kloakk Mikkjalstrøð | | 307.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at:
- At verkætlanin L68038, Dagføring av kloakkleiðingum Mikkjalstrøð, verður lokað.
- At hallið á kr. 307.000, verður fíggjað av løgukarmi LK68999, Kloakkir, undir konto 6875 Kloakkir (íløgur)
- At beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Elsa Berg luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 166<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 51/26 Fígging til smærri verkætlanir - 21/01164

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 27/26 | 25/00255-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 37/26 | 25/00255-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 51/26 | 25/00255-1 |

**Ískoyti**
Málið er upprunaliga lýst í jnr. 21/01164-1 Fígging til smærri verkætlanir, sum er lagt við sum fylgiskjal.

Arbeiðið er liðugt, og verkætlanin L81042 "Fígging til smærri verkætlanir" verður nú løgd fyri teknisku nevnd, fíggjarnevnd og býráð at loka. Verkætlanin hevur eitt hall á kr. 2000, sum verður at fíggja av løgukarmi LK81999 undir konto 8175 Vegir (íløgur).

**Skjøl**
jnr. 21/01164-1 Fígging til smærri verkætlanir, sum er lagt við sum fylgiskjal

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | L81042 | Fígging til smærri verkætlanir | | Kr. 2.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At verkætlanin L81042, Fígging til smærri vegaverkætlanir, verður lokað.
- At hallið á kr. 2.000 verður fíggjað av Løgukarmi LK 81999, Vegaverkætlanir, undir konto 8175, Vegir (íløgur)
- At beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið. Elsa Berg luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

# 52/26 Fráboðan um vegskráningin á matr. nr. 23l, Velbastað er so illa frágingin, at tað ríður undan vegnum oman á matr. nr. 23k, Velbastað (2009-0525) - 14/00178

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 29/26 | 25/01183-26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 31/26 | 25/01183-26 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 52/26 | 25/01183-26 |

**Ískoyti**
Málið byrjaði, tí borgarar ynsktu, at kommunan betraði vegin. Í tí sambandi var verkætlan L81032, Liðuggerð av Ervavegnum á Velbstað, stovnað undir konto 8175, Vegir (íløgur).

Upprunaliga málslýsingin *jnr. 14/00178-42 Fráboðan um vegskráningin á matr. nr. 23l, Velbastað er so illa frágingin, at tað ríður undan vegnum oman á matr. nr. 23k, Velbastað*, er løgd við sum fylgiskjal.

Vegurin er betraður, men grundað ósemju millum grannar er ilt at gera meir. Tískil verður verkætlanin nú løgd fyri teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið at loka, og avlopið á kr. 346.000 flutt aftur á løgukarmin.

**Skjøl**
14/00178-42 Fráboðan um vegskráningin á matr. nr. 23l, Velbastað er so illa frágingin, at tað ríður undan vegnum oman á matr. nr. 23k, Velbastað

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | L81032 | Liðuggerð av Ervavegnum á Velbastað | 8175 | LK81999 | Vegaverkætla nir | | 346.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At verkætlanin L81032, Liðuggerð av Ervavegnum á Velbastað, verður lokað.

- At avlopi á kr. 346.000 verður flutt yvir á Løgukarmm LK 81999, Vegaverkætlanir, undir konto 8175, Vegir (íløgur).
- At beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Klik eller tryk her for at skrive tekst.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

# 53/26 Vatntrupulleikar, við Sjógv 64, matr. nr. 154, Kollafjørður - 20/03632

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 30/26 | 25/04926-15 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 32/26 | 25/04926-15 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 53/26 | 25/04926-15 |

**Ískoyti**
Málið er upprunaliga lýst í jnr. 20/03632, Kloakk við sjógv (økið við gamla skúla), ið er lagt við sum fylgiskjal.

Í sambandi við dagføring av kloakk varð verkætlan L68039 "Kloakk við Sjógv" stovnað undir kontu 6875 Kloakkir (íløgur).

Verkætlanin er liðug, og verður hon løgd fyri teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið at loka.

Avlopið á kr. 37.000 verður at flyta aftur á løgukarmin.

**Skjøl**
jnr. 20/03632, Kloakk við sjógv (økið við gamla skúla)

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | L68039 | Kloakk við sjógv | 6875 | LK68999 | Kloakkir | | 37.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At verkætlanin L68039, Kloakk við sjógv, verður lokað.
- At avlopi á kr. 37.000 verður flutt aftur á Løgukarmin LK68999, Kloakkir, undir kontu 6875 Kloakkir (íløgur).
- At beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Elsa Berg luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

# 54/26 Verkætlan øki BX1-BX4 - Nýggj havleiðing á Kjalnesi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 18/26 | 26/00650-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.02.2026 | 16/26 | 26/00650-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 39/26 | 26/00650-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 54/26 | 26/00650-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært galdandi ásetingum skal spillivatn leiðast burtur á tryggan og umhvørvisliga forsvarligan hátt. Tað merkir, at spillivatn ikki skal leiðast í vøtn, áir ella løkir, men í staðin førast út í sjógv, har streymviðurskifti tryggja nøktandi útblanding.

Tí er neyðugt at avtaka verandi útlát og í staðin seta í verk at gera eina nýggja havspillivatnsleiðing (havútlát).

**Lýsing av málinum**
Endamálið er at savna spillivatnið í eina høvuðsleiðing, har tað verður leitt víðari út frá landi gjøgnum eina nýggja havleiðing.

Verkætlanin fevnir um at gera ella tillaga gomlu spillivatnsleiðingarnar, at gera eina nýggja havleiðing og at staðseta útløpið soleiðis, at spillivatnið verður fortynt effektivt og ikki ávirkar strandarøki.

Umsitingin ynskir at bjóða arbeiðið út til ráðgeva at lýsa tørvin og at gera uppskot til loysn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021
Kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn

**Upplýsingar frá umsitingini**
Havleiðingin verður prosjekterað soleiðis, at tá hon verður dimensionerað, verða verandi spillivatnsmongdir og sannlíkar broytingar í belastningi íroknaðar. Leiðingin verður løgd støðugt á havbotninum og tryggjað móti uppdrift og ávirkan frá streymi og aldugongd.

Verkætlanin skal byggjast á tøkniligar kanningar av spillivatnsmongdum og belastningi, botnviðurskiftum og vatndýpdum, eins og streymviðurskiftum og móttakara-/recipientviðurskiftum.

Kostnaðarmetingin er vegleiðandi og byggir á tær upplýsingar og fortreytir, ið fyriliggja á hesum stigi. Endaligur kostnaður kann broytast í sambandi við prosjektering og útbjóðing, sí skjal nr. 26/00650-2 Kostnaðarmeting og tíðarætlan.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☐**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 173<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Skjøl**
26/00650-2 Kostnaðarmeting og tíðarætlan
23/04594-11 Fylgiskjal 35 – Ætlan fyri BX1-BX4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | | | Nýggj havleiðing á Kjalnesi | 318.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at tikið verður undir við at bjóða arbeiðið út til ráðgeva, at lýsa tørvin og at gera uppskot til loysn,
- at játta kr. 318.000 til prosjektering og útbjóðing av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875 Kloakkir, á nýggja verkætlan Nýggj havleiðing á Kjalnesi undir konto 6875
- at leggja málið fyri nevndina aftur, tá tilboð fyriliggur
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. februar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Elsa Berg luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

# 55/26 Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.05.2025 | 35/25 | 25/00315-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 92/25 | 25/00315-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 126/25 | 25/00315-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.02.2026 | 21/26 | 25/00315-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 42/26 | 25/00315-1 |
| 6 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 55/26 | 25/00315-1 |

**Upprunin til málið**
Umhvørvispolitikkurin 'Grøna Leiðin' hjá Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum**
Í samsvari við orðingar í samgonguskjalinum um at minka um CO2 útlát frá kommunalum bygningum, er málið ein liður í gongdini at knýta kommunalu bygningarnar í varandi orkukeldur.

Samstundis er hetta málið eisini ein liður hjá Tórshavnar kommunu at fylgja við allari tøkniligari framgongd og vera við í áhaldandi menningini innan aðrar orkukeldur.

Umsitingin ynskir heimild at gera útbjóðingartilfar og at bjóða út sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali, umframt at játta kr. 300.000 av løgukarminum LK61705 "Orkupolitikkur" til ráðgeving og útbjóðing.

Ein sólorkuskipan við mátti á 259 kW og við einari mettari árligari framleiðslu á 181.000 kWt verður fyri samlaðu verkætlanina mett at kosta umleið kr. 3,2 mió uttan mvg.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | x | | | |
| Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 176<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 6177 | | Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali | ja | 300.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla nevndini til at taka undir við at flyta kr. 300.000 av løgukarminum LK61705 Orkupolitikkur undir kontu 6177 Umsiting og røkt av bygningum, inn á nýggja verkætlan Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at umsitingin leggur málið fyri nevndina aftur til støðutakan, tá tilboðini koma inn.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at flyta kr. 300.000 av løgukarminum LK61705 Orkupolitikkur undir kontu 6177 Umsiting og røkt av bygningum, inn á nýggja verkætlan Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali, og beina málið í býráðið.
Fíggjarnevndin viðmerkir, at talan bert er um heimild at gera útbjóðingartilfar v.m., og at innkomin tilboð verða løgd fyri viðkomandi nevndir til viðgerðar og støðutakan.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Talan er bert um tekjuna, sum vendir suðureftir (gamla svimjihøllin allir hyljar) og ikki yvir skiftirúmunum, skrivstovu v.m.

Vit hava nú gjørt kanningar av verandi tekju, í mun til styrki. Kanningarnar vísa, at takið er nóg sterkt til at bera eina sólorkuskipan, tó mugu súlurnar í fasaduni inni í høllini brunamálast og onkur besløg styrkjast.

Verandi tak á svimjihøllini varð lagt á fyri 23 árum síðani, tá var takið sera vánaligt, og kommunan valdi tá eina bíliga loysn við at leggja ein dúk omaná verandi papptekju. Tá varð skorið í verandi tekju fyri at fáa tað dampopið.

Undirtakið er í vánaligum standi og takdúkurin er gamal, so takið eigur at verða skift, áðrenn sólorkuskipan verður løgd á tekjuna. Tað eru nakrir lekar í tekjuni.

Í høllini eru 27-28 gradir inni, og av tí at takið ikki er væl bjálvað, so gevur tað eitt stórt orkutap upp gjøgnum tekjuna. Tí eigur meira bjálving at verða løgd á tekjuna, samstundis sum takið verður skift.

Takdúkurin er kannaður av RS-service, fyri at fáa at vita meira nágreiniliga, hvat standurin er á takinum og nær tað má skiftast. RS-service metir, at takið hevur eina liviðtíð uppá 15+ ár aftrat. Tað er tó ikki galdandi fyri trýkantslistarnar, sum eru í sera vánaligum standi, og fara at loysna meir og meir frá takinum.

Vit eru í ferð við at gera 6 destruktivar prøvar fyri at síggja, hvussu standurin er longur niðri í bjálving og stáltrapetsurnar.

Alt prosjektið er mett at kosta umleið kr. 9 mió., harav kr. 4 mió. eru til sólorkuskipan og kr. 5 mió. til at skifta og bjálva takið.

Mælt verður til, at hetta verður fíggjað soleiðis:
- Konto 6177, umsiting og røkt av bygningum, orkuátøk, kemur at gjalda kr. 6,5 mió.
- Konto 6110, umsiting og røkt av bygningum, egið rakstrarstað, kemur at gjalda kr. 2,5 mió.

**Hjálagt:**
j.nr. 25/00315-5 Støðulýsing av takinum frá RS-service

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eykajáttan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 6177 | L61715 | Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali | | 400.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:
- At farið verður undir at prosjektera og bjóða út arbeiðið at skifta tekjuna, eftirbjálva og seta upp sólorkuanlegg á tekjuna.
- At játta kr. 400.000 til prosjektering og útbjóðing av Løgukarmi LK61075 Orkupolitikkur undir konto 6177 á verkætlan L61715 Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali.
- At málið verður lagt fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.
- At málið verður lagt fyri umhvørvisnevndina aftur, tá tilboðini eru komin inn.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annita á Fríðriksmørk, Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til at arbeiðið er ikki átrokandi.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson,

Blankt atkvøddi: Kári Johansen,

# 56/26 Ruskplássið í Kollafirði - 23/00546

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 29.09.2025 | 59/25 | 25/00087-1 |
| 2 Havnanevndin | 30.09.2025 | 39/25 | 25/00087-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.10.2025 | 145/25 | 25/00087-1 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | 13.11.2025 | 23/25 | 25/00087-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.01.2026 | 6/26 | 25/00087-1 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.02.2026 | 13/26 | 25/00087-1 |
| 7 Kollafjarðarnevndin | 24.02.2026 | 4/26 | 25/00087-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 40/26 | 25/00087-1 |
| 9 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 56/26 | 25/00087-1 |

**Upprunin til málið**
Ætlanin er at gera eitt øki til vælveru har verandi ruskpláss er. Økið skal innrættast til sauna, saunagos, dipping, uppihald o.a. Í hesum sambandi er ynski sett fram at flyta ruskplássið til eitt annað øki í Kollafirði. (j.nr. 25/02597)

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna rekur í dag eitt minni ruskpláss við bátahylin í miðbýnum í Kollafirði. Plássið verður nýtt til móttøku og fyribils goymslu av ruski og burturkasti frá húsarhaldum, bátum og nærliggjandi virksemi.

Ætlanin er at fríðka og menna økið við bátahylin til frítíðar- og ferðavinnutengd endamál, herímillum dypping, uppihald og annað maritimt virksemi. Í tí sambandi er ætlanin at flyta ruskplássið frá bátahylinum inn á Firði, soleiðis at havnarøkið kann nýtast til annað virksemi.

Samstundis er møguleiki at fáa eina meira tíðarhóskandi og umhvørvisvinarliga loysn fyri ruskhandfaring í Kollafirði.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Arbeitt verður við eini nýggjari staðseting á havnarøkinum á Langasandi, matr. nr. 230a, sum Kollafjarðar havn eigur. Fundur hevur verið við Tórshavnar havn og hildið verður, at hetta øki er vælegnað til endamálið og harafturat er økið tøkt.

Økið, sum biðið verður um, er uml. 600 $m^2$ til víddar, staðsett aftanfyri Atlanticpane á Langasandi.
Tá verandi ruskpláss verður flutt, er neyðugt at tryggja, at nýggja staðsetingin lýkur øll galdandi krøv til umhvørvi, trygd og atkomu, herundir:

- Ein betongkantur skal gerast við hegni omaná, soleiðis at alt plássið er innigirt. Portur skal vera, sum kann læsast.
- Har sum bingjurnar koma at standa, skal lendi stoypast, soleiðis at bingjur kunnu forankrast í betongið (uml. 300 $m^2$), rest av økinum skal asfalterast.
- Á økinum skal vera ljós og vatn, hetta skal leggjast inn.
- Frárenning og uppsamlingarbrunnur skal gerast.
- Ein skúrur við wc skal gerast til starvsfólk, og rúm skal vera til vandamikið burturkast.

Kostnaðurin av at flyta ruskplássið er mettur til kr. 1.600.000.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
j.nr. 25/02597 Økið til sauna, saunagos, dipping, uppihald o.a.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Onki

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☐**

**Skjøl**
25/00087-3 Uppskot til staðseting og kostnaðarmeting

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | x | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | x | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 1.600.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á brennistøðini mæla til, at ruskplássið verður flutt til matr. nr. 230a, Langasandur, sambært hjálagda uppskoti j.nr. 25/00087-3, at umsitingin ger útbjóðingartilfar og bjóðar arbeiðið út, soleiðis at tað kann byrja fyrst í komandi ári, at málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina, staðbundnu nevndina fyri Kollafjørð, Havnanevndina í sambandi við leigu av økinum og fíggjarnevndina fyri at fáa neyðuga fígging við í fíggjarætlanini 2026. Eisini verður mælt til at senda málið til hoyringar hjá Atlanticpane, sum er nærmasti granni.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 29. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Havnanevndin 30. september 2025:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Guttormur Skála og Heidi á Lava Elgarsdóttir tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Birgir Nielsen og Kári Johansen tekur ikki undir við tilmælinum og mæla til staðseting uttan fyri havnaøkið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. oktober 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Birgir Nielsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 13. november 2025:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2026:** umrøtt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt støðumynd, við uppskoti til innrætting av nýggjum ruskplássi í Kollafirði, sum kemur at liggja vestan fyri Atlanticpane á Langasandi.

Plássið er uml. 800 $m^2$ til víddar (30,9 x 26 m).

Plássið er sera ábært fyri vind og tí má ein verja verða. Ætlanin er at seta upp betongklossar sum verjuvegg vestanfyri, veggurin verður 1,8 m høgur. Annars verður hegn sett upp runt plássið og portur við innkoyringina.

Pláss verður gjørt til 5 bingjur, har undirlendið verður stoypt. Lendið annars verður asfalterað, við halli ímóti frárenningum.

Ferðslan verður skipað soleiðis, at tað ber til at koyra runt um bingjurnar og so út aftur.

Verandi skúrur verður settur upp til starvsfólk og pláss verður eisini til IPC-tangar og eina minni bingju til vandamikið burturkast.

4 ljóssteyrar verða settir upp, soleiðis at plássið verður upplýst.
El og vatn verður lagt til plássið, eisini verður uttandura spulikrani og el-stikk.
Ætlanin er at grava ein rottanga niður í sambandi við wc og vask í skúrinum. Tangin kemur ikki at hava frárensl, men má tømast, tá hann er fullur.

Ein kostnaðarmeting er gjørd, sum vísir, at verkætlanin kemur at kosta kr. 1.542.000,-
Økið sum skal leigast frá Tórshavnar havn er uml. 800 $m^2$ til víddar og kostar kr. 33.600 í leigu um árið (42kr/$m^2$).

Umsitingin hevur tosað við Atlanticpane, sum er nærmasti granni.

Umsitingin hevur biðið um tilboð upp á nakað av arbeiðinum.

Viðmerkjast skal, at um nýggja burturkastkunngerðin, sum Umhvørvisstovan arbeiðir við, kemur í gildið, so kemur hetta plássið helst ikki at lúka krøvini til eitt endurnýtslupláss.

**Fíggjarlig viðurskifti:**

Skal ruskplássið flytast, sambært hjálagda uppskoti, so er neyðugt at finna fígging til íløguna, sum er mett til kr. 1.542.000 og til leigu av lendinum, sum er mett til kr. 33.600 pr./ár.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á KOB mæla til, at nevndin tekur undir við hjálagda uppskoti við kostnaðarmeting, til nýtt ruskpláss í Kollafirði j.nr. 25/00087-10, og at málið verður beint í staðbundnu nevndina fyri Kollafjørð til kunningar og í fíggjarnevndina.

Eisini verður mælt til at heimila umsitingini til at bjóða arbeiðið út og at seta arbeiðið í verk, tá fíggingin til íløgu og rakstur er komin upp á pláss.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Kunnað verður um málið.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum, har 1,6 mió. kr. verður játtað til verkætlanina av kontu 7175 Renovatión nýggj verkætlan gjørd undir somu kontu og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 24. februar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen,

# 57/26 Umhvørvispolitikkur 2024 - 2030

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 10.02.2025 | 8/25 | 25/00207-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 12.01.2026 | 1/26 | 25/00207-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.02.2026 | 8/26 | 25/00207-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.02.2026 | 29/26 | 25/00207-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 16/26 | 25/00207-1 |
| 6 Havnanevndin | 10.03.2026 | 15/26 | 25/00207-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 11.02.2026 | 19/26 | 25/00207-1 |
| 8 Trivnaðarnevndin | 12.02.2026 | 15/26 | 25/00207-1 |
| 9 Heilsu- og eldranevndin | 12.02.2026 | 4/26 | 25/00207-1 |
| 10 Vinnunevndin | 09.02.2026 | 4/26 | 25/00207-1 |
| 11 Tilbúgvingarnevndin | 06.05.2026 | | 25/00207-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 26/26 | 25/00207-1 |
| 13 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 57/26 | 25/00207-1 |
| 14 Havnanevndin | | | 25/00207-1 |

**Upprunin til málið**
Framhald av málinum 22/01711 Umhvørvispolitikkur 2022-2028.

Farið var undir at endurskoða umhvørvispolitikkin í 2021 undir heitinum Umhvørvispolitikkurin 2022-2028, sum eftir ætlan skuldi almannakunngerast summarið 2022.

Hetta bar ikki á mál, og verður tí arbeitt víðari við politikkinum undir heitinum Umhvørvispolitikkurin 2024-2030, sum eftir ætlan verður almannakunngjørdur í 2025.

**Lýsing av málinum**
Umhvørvispolitikkurin er skipaður í øki og mál. Endamálið er at fyribyrgja útláti av vakstrarhúsgassi, burturkasti og dálking, og at varðveita eitt fjølbroytt plantu- og djóralív. Tórshavnar kommuna skal vera ein grøn kommuna, og komandi ættarlið skulu hava somu møguleikar sum verandi at fáa gagn og gleði av náttúru og tilfeingi.

Arbeiðið at endurskoða Umhvørvispolitikkin verður framt út frá leisti lýstur í ískoyti undir heitinum “Uppskot til framhaldandi leist” í upprunamálinum, sum varð samtykt av náttúru- og umhvørvisnevndini í undanfarna valskeiði hin 3. september 2024, tó við broyttari tíðarætlan sum verður løgd fram á fundi.

Samanlagt eru játtaðar 650.000 kr av 6610 í trimum umførum. Av hesum eru brúktar umleið 150.000 kr. Settar eru 200-300.000 kr av til verkætlanarleiðara (Óluva Zachariasen), 100.000 kr til uppseting, prent o.a.

Minnilutin hevur valt Annfinn Brekkstein í stýrisbólkin.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
14/05441 Umhvørvispolitikkur hjá Tórshavnar kommunu
22/01711 Umhvørvispolitikkur 2022-2028

**Skjøl**
25/00207-1 Umhvørvispolitikkur hjá Tórshavnar kommunu 2022 – 2028 (gomul málslýsing).

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 184 |
| | Forkvinnunnar merki: |

Yvirlit yvir mál og átøk

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**
Kunnað verður um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 10. februar 2025:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Arbeiðið við at gera uppskot til umhvørvispolitikk fyri Tórshavnar kommunu er nú liðugt og verður lagt fram. Heitið á Umhvørvispolitikkinum verður broytt til: Umhvørvispolitikkur fyri Tórshavnar kommunu 2025-2032.

Umhvørvispolitikkurin hevur fokus á hesi trý høvuðsøki:

- Náttúra og lívmargfeldi: Ein kommuna við sterkum vistskipanum, har náttúra og menniskju trívast.
- Útlát og orka: Ein kommuna við munandi minni útláti av vakstrarhúsgassi.
- Ringbúskapur og burturkast: Ein kommuna við burðardyggari nýtslu og minni burturkasti.

Innan hvørt høvuðsøki eru tilsamans 19 lutmál, sum kommunan ætlar at røkka.

Eitt týdningarmikið amboð í umhvørvispolitikkinum verður ein virkisætlan (handliplanur), sum útgreinar, hvussu málini verða rokkin og átøkini útint, umframt at tíðarmeting og kostnaðarmeting verða gjørdar. Virkisætlanin verður endurskoðað javnan – og í minsta lagi annað hvørt ár.

**Skjøl**
25/00207-4 Uppskot til umhvørvispolitikk fyri Tórshavnar kommunu 2025 - 2032

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til at hava kunnandi fund fyri øllum býráðnum, har uppskotið "Umhvørvispolitikkur fyri Tórshavnar kommunu 2026-2032" verður lagt fram, áðrenn málið verður lagt fyri nevndina aftur til góðkenningar.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 12. januar 2026:** Framlagt og umrøtt. Samtykt at taka undir við tilmælinum.

| **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 185 |
| --- | --- |
| | Forkvinnunnar merki: |

**Ískoyti:**
Uppskotið til umhvørvispolitikk fyri Tórshavnar kommunu 2025 – 2032 varð lagt fram fyri býráðslimum mikudagin 4. februar kl. 16.00.

**Skjøl**
25/00207-6 Uppskot til umhvørvispolitikk fyri Tórshavnar kommunu 2026 - 2032

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla nevndini til at taka undir við uppskotinum “Umhvørvispolitikkur fyri Tórshavnar kommunu 2026 – 2032”, journal nr. 25/00207-6, og beina málið í allar tær føstu nevndirnar til kunningar og síðani í býráðið til samtyktar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. februar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Vinnunevndin 09. februar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annita á Fríðriksmørk, tekur undir við tilmælinum við fylgjandi tillagingum:

Deilmál 15, í 2. reglubroti skal standa:
Raðfestar verða stuttfluttar vørur við lágum CO2-útláti. Tá ið valt verður ímillum vørur og tænastur frá veitarum, verður eisini hugt eftir, hvør veitari tekur flest umhvørvisfyrilit.

Deilmál 18, Átak um nærskiljing, skal broytast til:
Smærri skiljistøðir verða settar upp í býarpørtum, og nærskiljing skal altíð hugsast inn í nýggj bústaðarøki. Allir býarpartar skulu hava skiljistøð í 2028.

Annfinn Brekkstein og Kári Johansen taka støðu á seinni fundi.

**Mentamálanevndin 11. februar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Trivnaðarnevndin 12. februar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Heilsu- og eldranevndin 12. februar 2026:** Limirnir eru kunnaðir um málið á øðrum fundum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur i Skála og Høgni Vilhelmsen tekur undir við tilmælinum frá náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála,.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen

# 58/26 Raðfesting av konto 6177 – Umsiting og røkt av bygningum, orkuátøk fyri 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.02.2026 | 17/26 | 26/00687-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 41/26 | 26/00687-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 58/26 | 26/00687-1 |

**Upprunin til málið**
Ein raðfesting skal gerast av konto 6177, umsiting og røkt av bygningum, orkuátøk fyri 2026.

**Lýsing av málinum**
Í umhvørvispolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu er ásett, at allir kommunalir bygningar skulu verða hitaðir við varandi orku í 2030, somuleiðis er ásett, at allir nýggir og umvældir bygningar skulu lúka lágorkukrøvini.

Kommunan er í holt við at fáa uppsett ein sokallaðan klimaroknskap, sum væntandi verður liðugur ultimo februar 2026.

Í klimaroknskapinum verður lættari at síggja, hvar best er at seta inn, fyri at minka mest møguligt um $CO_2$ útlátið. Ein stórur partur av $CO_2$ útlátinum kemur frá bygningunum.

Í dag eru umleið ein triðingur av bygningunum hitaðir við varandi orku, fleiri eru knýttir í fjarhitaskipanina, nakrir hava hitapumpu og onkur einstakur hevur harafturat eisini sólorkuskipan.

Umsitingin hevur gjørt eina ætlan fyri, hvussu Tórshavnar kommuna eisini kann fáa teir írestandi bygningarnar umlagdar til varandi orku.

Tað at fáa bygningar umlagdar til varandi orku krevur eina ávísa fyrireiking, har ið tað millum annað skal staðfestast, hvørt bygningurin skal knýtast í fjarhitanetið ella møguliga skal hava eina hitapumpuloysn. Umsitingin mælir sjálvandi til, at bygningar verða knýttir í fjarhitanetið, har ið tað er møguligt.

Skal bygningurin hava eina hitapumpuloysn, so krevur hetta eitt ávíst fyrireikingararbeiði, har ið avgjørt verður, hvør loysnin hóskar best til júst hendan bygningin.

Tá ið ein hitapumpuloysn verður vald, er neyðugt at fáa eina loysn, sum svarar til orkutørvin á bygninginum. Tað kann tí hugsast, at ein íløga í bjálving verður gjørd áðrenn hitapumpuloysnin verður sett til.

Í 2026 er 20 milliónir játtaðar til "Umsiting og røkt av bygningum", orkuátøk.

Umsitingin leggur upp til, at 12,6 milliónir verða brúktar til at leggja bygningar um til varandi orkuskipanir.

Umsitingin hevur gjørt eitt yvirlit yvir bygningarnar sum ætlanin er fara undir í 2026 (sí skjal 26/00687-2 Yvirlit bygningar umlegging 2026).

Sum tað sæst í skjalinum, so verða ætlandi 10 bygningar lagdir um til varandi orku í 2026, umframt at 4 bygningar verða gjørdir klárir og endaliga lagdir um í 2027.

Umsitingin hevur gjørt eisini gjørt eina nágreining øllum 14 bygningunum, sum lýsir m.a. stødd á bygninginum, minking av $CO_2$ útláti, kostnaðarmeting, møguligar avleiddar uppgávur v.m. (sí skjal 26/00687-3 Listi verkætlanir 2026).

| | **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 188<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

Kommunan eigur í løtuni 186 bygningar og av hesum eru umleið ein triðingur lagdir um til varandi orku.

Seinastu 10 árini eru umleið 30 bygningar lagdir um til varandi orku, so talan er um eina uppraðfesting, tá ið ætlanin er at leggja 10-14 bygningar um til varandi orku í 2026.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
26/00687-2 Yvirlit bygningar umlegging 2026
26/00687-3 Listi verkætlanir 2026

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6177 | | | Leggja bygningar um til varandi orku 2026 |

| Upphædd |
|---|
| 12,6 mió. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 12,6 mió |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026-2027 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 1,1 mió |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini, mæla nevndini til at játta kr. 12,6 mió. av konto 6177, til at leggja 10 bygningar um til varandi orku, og gera 4 bygningar klárar at leggja um í 2027, sambært lista yvir verkætlanir í 2026, j.nr. 26/00687-3.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

# 59/26 Elinnlegging á Bacalao

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 01.04.2025 | 20/25 | 25/04357-17 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 76/25 | 25/04357-17 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 114/25 | 25/04357-17 |
| 4 Havnanevndin | 17.02.2026 | 9/26 | 25/04357-17 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 43/26 | 25/04357-17 |
| 6 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 59/26 | 25/04357-17 |

**Upprunin til málið**
Komandi frystigoymslan hjá Barðinum á Vestaru bryggju – J.nr. 23/03220.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við, at Barðið skal byggja frystigoymslu á vestaru bryggju, má el-innleggingin til Bacalao umleggjast. Orsøkin er, at partur av Bacalao (slógvrúmið), har ið ein av høvuðs eltalvunum stendur, skal takast niður, umframt at elkaðalar liggja í lendinum, har ið frystigoymslan skal byggjast.

Tá ið málið um frystigoymsluna varð viðgjørt í 2023, samtykti býráðið at játta eina ávísa upphædd til at taka ein part av Bacalao niður. Í hesi upphædd varð ein partur avsettur til umlegging av el-innleggingini til Bacalao, men neyvar kanningar av el-innleggingini vórðu tó ikki gjørdar tá vegna ov stutt skotbrá. Barðið hevur síðani útsett byggingina av frystigoymsluni og enn er einki arbeiðið byrjað.

Tórshavnar havn hevur nú havt ein el-innleggjara at kanna el-innleggingarnar á Bacalao nærri, soleiðis at til ber at gera eina ætlan fyri hvussu umleggingin skal gerast.

Niðurstøðan av hesi kanning er, at verandi el-innlegging á Bacalao sum heild er í vánaligum standi. Øll innleggingin er gomul, innføringskaðalar eru gamlir, høvuðstalvurnar eru heilt gamlar og eru ikki heilt tryggar sambært installatørinum. Tað sæst, at man gjøgnum árini hevur lagt aftrat og lagt aftrat, og tí er el-innleggingin vorðin sera fløkjaslig við tíðini. Umleggingin av innleggingini verður tí væl meiri umfatandi og torgreidd enn hildið av fyrstan tí, og má fremjast í fleiri stigum.
Kanningin vísir eisini, at uttan mun til um frystigoymslan hjá Barðinum verður bygd ella ikki, so verður neyðugt at gera innleggingina til Bacalao av nýggjum sum skjótast, vegna trygdina (persónstrygd, brunatrygd og veitingartrygd til leigarar á Bacalao).

Installatørurin hevur saman við Tórshavnar havn og í samráð við SEV gjørt eina ætlan fyri, hvussu umleggingin kann gerast. Í stuttum fevnir umleggingin um at leggja nýggjar innføringskaðalar frá nýggjari trafostøð hjá SEV, uppseta nýggjar høvuðstalvur til innføringarnar, og umleggja forsýningar av verandi undirtalvum frá gomlu høvuðstalvunum og til nýggju høvuðstalvurnar. Umleggingin verður mett at kosta uml 1,6 mió kr.
Arbeiðið fevnir ikki um útskifting av undirtalvum ella elnetinum annars inni á Bacalao.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til:
- at arbeiðið við at umleggja el-innleggingarnar til Bacalao verður framt sum skjótast soleiðis sum lýst er omanfyri.
- at arbeiðið verður fíggjað soleiðis, at fluttar verða 0,3 mió kr frá verkætlan "P39BAC - Niðurtøka Bacalao" og 1,3 mió kr frá "P39 – Niðurtøka av pakkhúsum" til verkætlan "P44 – Bacalao – umvæling".
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 01. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá Havnanevndini. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at umleggja el-innleggingarnar á Bacalao er nú liðugt. Arbeiðið hevur gingið væl og eftir ætlan. Umframt at leggja nýggjar innføringskaðalar og 2 nýggjar høvuðstalvur, eru flestu av teimum gomlu undirtalvunum skiftar út við nýggjar talvur, og aðrar umleggingar eru eisini framdar, soleiðis at el-skipanin nú er trygg og í væl betri standi enn áður.
Játtanin til arbeiðið er í alt kr. 1,6 mió. Bókaða nýtslan pr 31.12.2025 er kr. 1,588 mió.

**Tilmæli**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at verkætlanin verður lokað, at avlopið á uml. 12 tkr. verður flutt aftur á løgukarmin hjá Tórshavnar havn, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 17. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 193<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 60/26 Nevndarval til nevndina í P/F Visit Faroe Islands 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 60/26 | 26/01201-1 |

**Upprunin til málið**
23/01374 Val til nevndina í P/f. Visit Faroe Islands

**Lýsing av málinum**
Vísandi til § 3 í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/f. Visit Faroe Islands, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 7. november 2025, verður nevndin í P/f. Visit Faroe Islands mannað við 7 nevndarlimum, harav Tórshavnar kommuna tilnevnir eitt umboð. Lutfalsval.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Lóg um P/f. Visit Faroe Islands.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mett verður skilabest, at avvarðandi stjóri, sum hevur ferðavinnu sum fyrisitingarligt málsøkið í kommununi, verður valdur í nevndina.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Kommunustjórin mælir til at velja ein lim í nevndina fyri P/f. Visit Faroe Islands.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt at velja Jeanette Ellefsen Blaasvær.

# 61/26 Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval í Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 61/26 | 26/01384-1 |

**Málslýsing**
Sambært lovbekendtgørelse nr. 41 af 15. januar 2020 af lov om folketingsvalg på Færøerne er ásett:

*§ **19**. Senest når valg er udskrevet, vælger kommunalbestyrelsen for hvert valgdistrikt mindst 3 og højst 5 valgstyrere til at forestå afstemningen og stemmeoptællingen på valgstedet*.

*Stk. 2. Valgstyrerne vælges ved forholdstalsvalg under eet blandt de vælgere, der har bopæl i valgdistriktet.*

og

sambært løgtingslóg um val til Løgtingið, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 137 frá 22. september 2020 er ásett:

*20. 3) Atkvøðugreiðslan á hvørjum valstaði verður fyriskipað undir leiðslu av einum valstýri, sum sett er av kommunustýrinum. Hoyra bygdir úr ymsum kommunum til sama valstað, ger landsstýrismaðurin av, hvussu nógvar limir avvarðandi kommunur skulu velja. Stýrið hevur í minsta lagi 3 og hægst 5 limir og skipar seg sjálvt. Valstýrið førir gerðabók, sum kommunustýrið lóggildir.*

Lutfalsval

Tríggir av teimum fimm valdu limum í valstýrinum fyri Tórshavn, Mjørkadal og Norðadal eru sinnaðir at halda fram í valstýrinum. Tey eru Jóan Petur Hentze, Jógvan Martin Mørk og Súsanna Sondum.

Sostatt skulu veljast tveir nýggir limir í valstýrið, sí hjálagt skjal.

Siðvenja hevur verið, at velja tvey fólk frá fyrisitingini í valstýrið, so tað er lættari at fyriskipa valið.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at velja eitt fólk frá fyrisitingini og ein borgara í valstýrið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt at velja Hjalgrím Samuelsen og Helenu Dam á Neystabø í valstýrið.

# 62/26 Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 62/26 | 26/01386-1 |

**Málslýsing**
Sambært lóg um val til løgting § 20 er ásett:

*«Atkvøðugreiðslan á hvørjum valstaði verður fyriskipað undir leiðslu av einum valstýri, sum sett er av kommunustýrinum. Hoyra bygdir úr ymsum kommunum til sama valstað, ger landsstýrismaðurin av, hvussu nógvar limir avvarðandi kommunur skulu velja. Stýrið hevur í minsta lagi 3 og hægst 5 limir og skipar seg sjálvt. Valstýrið førir gerðabók, sum kommunustýrið lóggildir"*

og í lov om folketingsvalg på Færøerne §19 er ásett:

*«Senest når valg er udskrevet, vælger kommunalbestyrelsen for hvert valgdistrikt mindst 3 og højst 5 valgstyrere til at forestå afstemningen og stemmeoptællingen på valgstedet.»*

Lutfalsval

Tveir av teimum fýra valdu limunum í valstýrinum fyri Argir eru sinnaðir at halda fram í valstýrinum. Tær eru Birgit Andersen og Sólrun Gleðisheygg.

Sostatt skulu veljast tveir nýggir limir í valstýrið, sí hjálagt skjal.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja tveir nýggjar limir í valstýrið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt at velja Bergur Rask Olsen og Jógvan Reynslág í valstýrið.

# 63/26 Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 63/26 | 26/01387-1 |

**Málslýsing**
Sambært lovbekendtgørelse nr. 41 af 15. januar 2020 af lov om folketingsvalg på Færøerne er ásett:

§ 19. Senest når valg er udskrevet, vælger kommunalbestyrelsen for hvert valgdistrikt mindst 3 og højst 5 valgstyrere til at forestå afstemningen og stemmeoptællingen på valgstedet.

Stk. 2. Valgstyrerne vælges ved forholdstalsvalg under eet blandt de vælgere, der har bopæl i valgdistriktet.

Og

sambært løgtingslóg um val til Løgtingið, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 137 frá 22. september 2020 er ásett:

20. 3) Atkvøðugreiðslan á hvørjum valstaði verður fyriskipað undir leiðslu av einum valstýri, sum sett er av kommunustýrinum. Hoyra bygdir úr ymsum kommunum til sama valstað, ger landsstýrismaðurin av, hvussu nógvar limir avvarðandi kommunur skulu velja. Stýrið hevur í minsta lagi 3 og hægst 5 limir og skipar seg sjálvt. Valstýrið førir gerðabók, sum kommunustýrið lóggildir.

Lutfalsval

Trý av teimum fýra valdu limunum í valstýrinum fyri Kollafjørð eru sinnaðir at halda fram í valstýrinum. Tey eru Arnbjørn Kristiansen, Christian Martin Dam og Marian Jacobsen.

Sostatt skal veljast ein nýggjur limur í valstýrið, sí hjálagt skjal.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin mælir til at velja ein lim í valstýrið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt at velja Sóleyð P. Hansen í valstýrið.

# 64/26 Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval í Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 64/26 | 26/01388-1 |

**Málslýsing**
Sambært lovbekendtgørelse nr. 41 af 15. januar 2020 af lov om folketingsvalg på Færøerne er ásett:

*§ **19**. Senest når valg er udskrevet, vælger kommunalbestyrelsen for hvert valgdistrikt mindst 3 og højst 5 valgstyrere til at forestå afstemningen og stemmeoptællingen på valgstedet*.

*Stk. 2. Valgstyrerne vælges ved forholdstalsvalg under eet blandt de vælgere, der har bopæl i valgdistriktet.*

og

sambært løgtingslóg um val til Løgtingið, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 137 frá 22. september 2020 er ásett:

*20. 3) Atkvøðugreiðslan á hvørjum valstaði verður fyriskipað undir leiðslu av einum valstýri, sum sett er av kommunustýrinum. Hoyra bygdir úr ymsum kommunum til sama valstað, ger landsstýrismaðurin av, hvussu nógvar limir avvarðandi kommunur skulu velja. Stýrið hevur í minsta lagi 3 og hægst 5 limir og skipar seg sjálvt. Valstýrið førir gerðabók, sum kommunustýrið lóggildir.*

Lutfalsval
Siðvenja hevur verið til onnur val, at velja tvey fólk frá fyrisitingini í valstýrið, so tað er lættari at fyriskipa valið.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin mælir til at velja fýra limir, tvey fólk frá fyrisitingini og tveir borgarar í valstýrið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt at velja Eyðfríð L. Jacobsen, Jeanette Ellefsen Blaasvær, Inga Dahl og Jákup Símun Simonsen í valstýrið.

# 65/26 Møgulig yvirtøka av bygninginum - Gamla Hospital - matr. nr. 220d, Sigmundargøta 25, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.09.2025 | 100/25 | 25/00349-4 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.02.2026 | 20/26 | 25/00349-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 45/26 | 25/00349-4 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 65/26 | 25/00349-4 |

**Upprunin til málið**
Áheitan frá sjálvsognarstovninum Gamla Hospital um at Tórshavnar kommuna yvirtekur bygningin og raksturin av honum.

**Lýsing av málinum**
Fíggjarnevndin samtykti 22. mai 2024 at gera uppskot til yvirtøkusáttmála við sjálvsognarstovnin Gamla Hospital um bygningin Gamla Hospital og savnsvirksemi.

Ætlanin er, at kommunan gjøgnum Tórshavnar Býarsavn stendur fyri virkseminum í bygninginum, harímillum eisini fakliga savnsvirkseminum.

2.000.000kr eru settar av í fíggjarætlanini á løgukarminum til yvirtøkuna.

Í samráðingunum um yvirtøkusáttmála er ósemja um treytirnar. Sjálvsognarstovnurin ynskir at áseting skal vera í sáttmálanum um, at tvey rúm skulu altíð vera innrættað sum ávikavist skurðstova og seingjarstova. Sjálvsognarstovnurin eigur yvir 30 plattar av lutum, sum skulu nýtast til hetta endamálið.

TK ynskir ikki at binda eitt møguligt komandi býarsavn til eina tílíka fasta framsýning. Hetta hevði avmarkað virksemið hjá býarsavninum nógv bæði í mun til pláss, men eisini í framsýningar- og samskiftisvirksemi, sum altíð hevði mugað verið lagað soleiðis at fasta framsýningin hóskaði til.

Umboð fyri mentamáladeildina vóru 20. august á ástaðarfundi í Gamla Hospitali saman við umboðum fyri Tjóðsavnið og sjálvsognarstovnin Gamla Hospital. Endamálið við ástaðarfundinum var bæði hjá mentamáladeildini at gera sær eina meting av hølunum í mun til eitt møguligt býarsavn og at fáa eina savnsfakliga meting frá Tjóðsavninum.

Metingin frá Tjóðsavninum er viðheft. Í stuttum verður ført fram, at tað ber til at brúk Gamla Hospital sum *part* av einnum Býarsavni, men at hølini eru ikki væl egnað til framsýningar, og at fermetratalið er ov lítið til at nøkta tørvin hjá einum Býarsavni. Í mun til at hava eina fasta framsýning, so verður ført fram, at søgan hjá húsinum er givin og sermerkti arkitekturin í summum rúmum er verdur at fáa fram. Hetta hevði tó hóskað best sum partur av einum savni um heilsu- og sosialsøgu.

*Samanumtøkan úr metingini frá Tjóðsavninum:*
"Samanumtikið verður mett, at Gamla hospital kann nøkta ein part av tørvinum hjá Tórshavnar býarsavni. Tað er tó greitt, at Gamla hospital ikki nøktar fulla hølisliga tørvin hjá Býarsavninum. Til tað er neyðugt at byggja ella umbyggja/tillaga ein bygning til endamálið."

Mentamálaleiðarin og fulltrúi á mentamáladeildini upplivdu somu avbjóðingar sum umboðini fyri Tjóðsavnið. Rúmini eru smá við nógvum vindeygum, lágum lofti og nógvum karakteri. Framsýningarrúm skulu helst vera neutral, høg og kunna myrkaleggjast. Atkomuviðurskiftini eru sera trupul – høgar gáttir eru ímillum hvørt rúm, ongin lyfta er uppá loft og onki handikappvesi er. Nógvar tillagingar skulu til fyri at

gera hesi viðurskiftini í lagi útyvir arbeiðið sum restar í at gera húsini liðug. Umboð fyri sjálvsognarstovnin metti kostnaðin fyri at gera arbeiðið, sum er í gongd, liðugt at vera 1,5mió kr. So koma tillagingar og annað afturat.

Eitt nútíðarhóskandi Býarsavn hevur tørv á munandi meira og fjølbroyttari plássi enn í Gamla Hospitali. Eitt nútímans savn krevur ikki bara høli til framsýning av lutum, men eisini pláss til annað fevnandi virksemi fyri allar aldursbólkar og samfelagsbólkar. Har skulu vera verkstovur, tiltøk, filmssýningar, kafé, handil osfr. Eisini skal atkoman vera góð, og sjálvandi skulu starvsfólk til.

Eitt sera gott boð uppá eitt hóskandi nútímans Býarsavn við rúmi fyri fjølbroyttum virksemi hevði verið bankabygningurin í Steinatúni, um hann varð umvældur og umbygdur við virksemi Býarsavnsins í huga. Her hevði tú kunnað skapt ein flottan og framtíðartryggjaðan savningartað fyri borgarar í Tórshavnar kommunu mitt í miðbýnum, sum tók støði í okkara søgu og samleika.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/01012 Samskifti viðvíkjandi Gamla Hospital
https://360.torshavn.fo/locator.aspx?name=Common.Details.Navigate&module=Case&subtype=12&recno=269955

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Meting frá Tjóðsavni Føroya: “Viðmerking til TK um gamla hospital”

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5575 | LK55002 | Søvn og mentanararvur | 5510 | | Tórshavnar Býarsavn | X | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Við støði í omanfyrinevndu lýsing mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at Tórshavar kommuna *ikki* yvirtekur bygningin Gamla Hospital, og steðgar samráðingarnar við sjálvsognarstovnin Gamla Hospital. Mælt verður eisini til at peningurin, sum er settur av til yvirtøkuna, í staðin verður nýttur til at arbeiða við aðrari staðseting til Býarsavnið.

**Mentamálanevndin 03. september 2025:** Samtykt ikki at taka undir við tilmælinum, men at umsitingin fær uppskotið til yvirtøkuavtaluna uppá pláss saman við sjálvsognarstovninum at leggja aftur fyri nevndina.

**Ískoyti:**
Fundir hava verið við nevndina um orðing av einum yvirtøkusáttmála.

Í samráðingunum hevur verið ósemja um treytirnar í yvirtøkusáttmálanum.

Sjálvsognarstovnurin ynskir at áseting skal vera í sáttmálanum um, at tvey rúm skulu altíð vera innrættað sum ávikavist skurðstova og seingjarstova. Sjálvsognarstovnurin eigur yvir 30 plattar av lutum, sum skulu nýtast til hetta endamálið.

TK ynskir ikki at binda eitt møguligt komandi býarsavn til eina tílíka fasta framsýning. Hetta hevði avmarkað virksemið hjá býarsavninum nógv bæði í mun til pláss, men eisini í framsýningar- og samskiftisvirksemi, sum altíð hevði mugað verið lagað soleiðis at fasta framsýningin hóskaði til.

Eftir ynski frá nevndini í Gamla Hospital er orðað nýtt uppskot til yvirtøkusáttmála, ið samsvarar hesum ynskjum.

Sambært uppskotinum skal bygningurin lutvíst sum savn og frásøgukarmur fyri føroyska sjúkrahússøgu, í tráð við endamálið hjá Sjálvsognarstovninum Gamla Hospital.

Kommunan skal virða søguliga og mentanarliga týdningin hjá bygninginum, og umsita ognina við tí endamáli at tryggja varðveitslu av bygninginum sum søguligur sjúkrahúsbygningur.

Harumframt skal kommunan arbeiða fyri, at lutir og savnslutir, ið nevndin fyri Gamla Hospital hevur savnað, verða skipaðir, skrásettir og nýttir í savnsvirkseminum.

Í sáttmálanum er eisini ásett, í samsvari við ynski frá nevndini, at skurðstovan og ein seingjarstova skulu varðveitast og innrættast samsvarandi teirra upprunaliga endamáli sum partur av savnsframsýningini. Tó kunnu skiftandi framsýningarlutir sýnast fram í rúmunum, so framsýningin kann virka sum ein livandi og fakliga grundað frásøgn um sjúkrahússøguna.

**Skjøl:**
25/00349-4: "*Viðmerking til TK um Gamla hospital*"
25/00349-19: "*2025-10-27 Skriv til Kommununa*"

25/00349-22: "*Yvirtøkusáttmáli AFTANÁ BROYTING eftir ynski frá Nevndni fyri Gamla Hospital - Yvirtoekusattmali Gamla Hospital*"
25/00349-23: "*Uppskot hjá TK til yvirtøkusáttmála av Gamla Hospital*"

**Tilmæli:**
Við støði í omanfyrinevndu lýsing mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at Tórshavnar kommuna *ikki* yvirtekur bygningin Gamla Hospital, og steðgar samráðingarnar við sjálvsognarstovnin Gamla Hospital. Mælt verður eisini til at peningurin, sum er settur av til yvirtøkuna, í staðin verður nýttur til at arbeiða við aðrari staðseting til Býarsavnið.

At beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2026**: Samtykt ikki at taka undir við tilmælinum, men at skriva undir sáttmálan.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur i Skála og Høgni Vilhelmsen taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson tekur undir við tilmælinum frá umsitingini.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Birgir Nielsen.

| | **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 202<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

## 66/26 Keypari av vinnustykkið nr. 26 á Ovara Hjalla, letur stykkið innaftur til kommununa.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 44/26 | 25/05489-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 66/26 | 25/05489-1 |

**Upprunin til málið.**

Keypari, Sp/f Ovari Hjalli, hevur 02.02.2026 sent fráboðan til kommununa um, at felagið ikki ynskir at byggja á Ovara Hjalla, og at felagið letur vinnugrundstykkið innaftur til kommununa

**Lýsing av málinum.**

Felagið  hevur skrivað undir fyribils skeytið 04.04.2024 og hevur goldið ávegis keypspeningin kr. 1.506.000,- hin 18.09.2023.

**Lógir, ásetingar o.a.** Undirskrivað fyribils skeytið.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☒**

**Skjøl. 22/05699-12.** Undirskrivað fyribils skeyti.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | ja | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐

| | Býráðsfundur<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 203<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| 6975 | L69004 | Vinnustykki á Ovara Hjalla |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| 1.506.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 1.506.000,- |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**: Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at taka stykkið innaftur, og at afturrinda keypara kr. 1.506.000,00 Grundstykkið verður síðani sett til sølu aftur á heimasíðuni hjá kommununi.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 204 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 67/26 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 48/26 | 26/00100-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 67/26 | 26/00100-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Framlagt og góðkent.

| | **Býráðsfundur**<br>26. februar 2026 | Blað nr.: 206<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 68/26 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum - 21/02924

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.06.2025 | 77/25 | 25/05986-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 03.09.2025 | 90/25 | 25/05986-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 135/25 | 25/05986-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 184/25 | 25/05986-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 220/25 | 25/05986-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 23.02.2026 | 36/26 | 25/05986-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 25.02.2026 | 53/26 | 25/05986-1 |
| 8 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 68/26 | 25/05986-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekstur og tilfar kemur áðrenn fundin.

**Mentamálanevndin 04. juni 2025:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 2.251.000 |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Umbiðið hesa ferð | Upphædd: | 2.251.000 |
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 71.185.391,65 |
| Áður játtað | Upphædd: | 68.935.343,38 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Mál til viðgerðar: 25/05986 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum**
Fleiri avleiddar verkætlanir eru íkomnar rundanum økið við Dagstovnin á Hamrinum, sum verða lýst niðanfyri. Talan er í høvuðsheitum um hesi arbeiði:

**Uttandura arbeiði**
*Stuðlaveggur,* sí skjal 1 & sí skjal A-C, j.nr. 25/05986-3, 25/05986-4, 25/05986-5 og 25/05986-6
*Skifta brotnar pelar og lækka hegn til 4 m. við FIFA vøll,* sí skjal 2, j.nr. 25/05986-7
*Gøta, trappa í lendi og tvey portur til FIFA vøll,* sí skjal 2 j.nr. 25/05986-7 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-8
*Klæðing av rimaverki, sí skjal 2B, j.nr. 25/05986-9*
*Tilboð Graslíki á Dagstovninum á Hamrinum á Argjum, veiting og álegging av graslíki/undirlendi íroknað, sí skjal 2C, j.nr. 25/05986-10*
*Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki, garður,* sí skjal 3, j.nr. 25/05986-11

**Innandura arbeiði í verandi stovni**
*Køkur*
*Umbygging í verandi stovni*
*Skilaveggir, ovnar, køliskáp o.a.*

*Hæve/sænkeborð – broyting av skiftirúmum*
*Annað*
*Stuðlaveggur*
Avbjóðingar hava verið við lendisviðurskiftum og uttanumøkinum á eystanfyri Dagstovnin á Hamrinum. Stórur hæddarmunur hevur verið við ovara benið og vegin. Fyri at økið kann vera trygt og at arbeiðið ikki verður steðgað upp hjá báðum arbeiðstakarum á staðnum, Búsetur og RTS, hevur verið neyðugt gera eykaarbeiðið á stuðlavegg framvið vegnum mótvegis økinum við Dagstovnin á Hamrinum. Umsitingin hevur verið í samráðingum við arbeiðstakaran, RTS, um at gera stuðlaveggin við uttanumøkið hjá Dagstovninum á Hamrinum, tí stuðlaveggurin liggur á arbeiðsøkinum hjá RTS. RTS hevur veitt tilboð á hetta arbeiðið at gera stuðlavegg á 50 m, sum 2m høgur og 20cm tjúkkur, íroknað fundament til stuðlavegg 50 m x 0,4 m x 0,4 m. Verkætlanin L31011 hevur fyribils fíggjað hetta arbeiðið, sí skjal 1, skjal 1A, skjal 1B, skjal 1C, j.nr. 25/05986-3, 25/05986-4, 25/05986-5 og 25/05986-6.

Samlaður prísur fyri at hava gjørt hesi arbeiðið er áljóðandi tls.

| | |
|---|---|
| Tilboð á stuðlavegg (RTS) | 349.260,00 u/mvg |
| Prosjektering (LBF) | 20.366,75 u/mvg |
| Kvalitetsikring/eftirlit (LBF) | 5.205,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | **374.831,75 u/mvg** |

*Umbygging og nýtsla av FIFA vølli við Dagstovnin á Hamrinum.*
Dagstovnurin á Hamrinum hevur tørv á at fáa eina loysn viðvíkjandi málinum um FIFA vøllin.
Manglandi atgongd til sparkivøllin skapar eina ótrygga støðu, tá skúlabørn skulu á vøllin í fríkorterum og tá børn í frítíðini spretta net meskarnar í málinum upp fyri at fáa atgongd. Tí er bráðfeingistørvur at fáa loysn á málinum.

Skúlin á Argjahamri hevur havt tørv á eini høgligari leið inn á sparkivøllin, sum er trygg í mun til virksemi hjá dagstovninum.

Børnini í grannalagnum hava eisini tørv á eini høgligari leið inn á sparkivøllin, sum er trygg í mun til virksemi hjá dagstovninum. Byggiprosjekt er sum nú er á staðnum, har byggihegn er sett rundanum vøllin og spæliplássið hjá dagstovninum er flutt, soleiðis at eingin atgongd er til vøllin, uttan gjøgnum høvuðsportrið til dagstovnin.

Umsitingin hevur verið í samskifti við Eigarafelagið á Hamrinum, sum FIFA vøllurin av fyrstani tíð hevur verið bygdur/ætlaður til. Loysnin á málið verður, at tá ið byggiprosjektið er liðugt verður rás, trappa í lendi og tvey portur eystanfyri FIFA vøllin gjørt til børnini á dagstovninum og hjá børnum í grannalagnum annars at nýta um kvøldarnar og í frítíðini sum heild, tá ið stovnurin er stongdur, sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8

Eigarafelagið uppi á Hamrinum hevur viðmerkingar at bøta skaðan á verandi hegn rundanum og gera tvey portur, rás, trappu í lendi, sum framvíst, er ein nøktandi loysn.
Eigarafelagið viðmerkir kortini, at vøllurin ikki er í góðum standi, og at vøllurin tíðum er dekkaður við sandi í pørtum av vøllinum, soleiðis at mann ikki kann brúka vøllin. Ynskið er at fáa nýtt graslíki á vøllin og at ein betri loysn verður funnin við at eingin sandur kemur á vøllin, ella í munandi minni mát. Umsitingin hevur kannað málið saman við arbeiðstakaranum og er komin til ta loysn at skerma vøllin betri av frá plássinum við at klæða rimaverkið, soleiðis at børnini ikki sleppa at koyra sand inná vøllin, sí skjal 2B_Klæðing av rimaverki, j.nr. 25/05986-9.

Umsitingin somuleiðis biðið um tilboð á veiting og álegging av graslíki/undirlendi íroknað, sí skjal 2C, j.nr. 25/05986-10.

*Afturbøting av verandi hegni við FIFA vøll*
Verandi hegn rundanum FIFA vøllin varð skatt í vetur. Umsitingin hevur biðið Búsetur kannað málið, hvat ið skilabest er at gera. Búsetur boða frá, at hegnið rundanum er sera høgt og viðbrekið og tað ber illani til at dimensionera og uppbyggja eitt fundament, sum tolir føroyska veðurlagi, tá ið hegni er somikið høgt. Fyri stoyping stórum fundamentum mugu gerast størri inntriv á vøllin og økið annars. Búsetur leggur upp til at seta skrástívarar í, afturbøta verandi pelar og at lække hegni í til 4 metrar, sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8.

*Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki við garði/stakitti*
Ynski er frá stovninum at fáa avskerma vøggustovuøkið og barnagarðsøkið við garði. Hetta hevur ikki verið við í prosjektinum. Búsetur hevur veitt tilboð á hetta arbeiðið, áljóðandi 76.053,00 u/mvg, sí skjal 3, j.nr. 25/05986-11

Umsitingin hevur verið í samráð við Búsetur at veita eitt samlað tilboð á ymisk arbeiðið við FIFA vøllin, sí sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8.

| | |
|---|---|
| Gera gøtu, trappu í lendi og tvey portur til FIFA vøll: | 106.024,00 u/mvg |
| Skifta brotnar pelar og lækka hegn til 4 m. við FIFA vøll: | 108.000,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | **261.614,24 u/mvg** |

**Innandura arbeiði**
Umsitingin hevur verið í samráð við Búsetur um at gera eina samlað loysn og heildartilboð á tilbygging av køki og goymslu í verandi stovni, veiting og montering av nýggjum av køki, ymiskum eykaarbeiði í verandi stovni. Hetta arbeiðið umfatar:

- Verandi veggur við køk verður niðurtikin og berandi límdrakari verður bygdur ístaðin
- Nýggjur køkur sum víst í prinsippi í hjáløgdu skitsu. Ovnar (1 industri + 1 vanligur), 2 kóki plátur á 80 cm uml, og avtrekk verður á somu síðu uttan til høgru, sum verandi.
- Eymhetta/ur skulu monterast í loft.
- Industri vaskimaskina - flutt út mótvegis útiveggi. Vask verður eftir flutt út mótvegis útveggi.
- Rustfrí borðpláta.
- Niðurtøku av verandi foldiveggi og umgerð av goymslurúmi.
- Nýggj høg skáp úr góðari góðsku v/foldivegg.
- Avmontering og eftirmontering av radiatori v/rørføringum.
- Í køkstilboðnum skal prosjektering av køkim´samskifti skal gerast av professionellum køksveitara - alt neyðugt samskifti til brúkarans krøv og ynski (eftirjusteringar) av hyllum skáp við øllum, sum hartil hoyrir - skal verða íroknað
- Yvirskáp ynskjast ikki men heldur góðar hyllar og høgskáp(serliga í trýkantinum, har sum ovnar eru)
- Eitt køliskáp skal vera undir borðinum nær við oynna
- 4 nýggj frystiskáp
- Køliskáp og ovnar í stovunum í verandi stovni
- Fleiri gardropur í verandi stovni í sambandi við, at stovnurin verður broyttur frá vøggustovu til barnagarðsstovu
- Broytingar av borðum og vøskum o.a.
- Veiting og montering av skilaveggjum millum w.c. kummur. BH ynskir tilboð á avmontering/flyting av vaski(flutt-stillað hægri), veiting og montering av nýggjum kranum í vøskum, burturtakan av einum skiftiborð við vaski og veiting og montering av nýggjari borðplátu.

- Broytingar í skiftirúmum. 2 hæve/sænkeborð til 4 vøggustovur, somuleiðis ynskir mann eyka funktiónir inn í skiftirúmini fyri 4 vøggustovur.
- Skilaveggir / spanskveggir
- Nýggj køliskáp og ovn í tveimum stovum í verandi stovni
- Starvsfólkarúm
- Tilhoyrandi timburarbeiði, el arbeiði, hvs arbeiði, málaraarbeiði.

Búsetur hevur veitt samlað tilboð á hesi arbeiði, sum er áljóðandi: 975.776,00, sí skjal 4, j.nr. 25/05986-12

**Samlað fígging**
Samlað fígging til avleiddar verkætlanir, ið eru íkomnar rundanum økið við Dagstovnin á Hamrinum, sí skjal 5, j.nr. 25/05986-13.

**Uttandura arbeiði**

| | |
|---|---|
| Stuðlaveggur | 374.831,75 u/mvg |
| Ymiskt við FIFA vøll | 261.614,24 u/mvg |
| Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki, garður | 86.153,00 u/mvg |
| Skjal 2B_Klæðing av rimaverki | 30.000,00 u/mvg |
| Skjal 2C_Tilboð Graslíki á Dagstovninum á Hamrinum | 196.800,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | 949.398,99 u/mvg |

**Innandura arbeiði**
*Skiftirúm – puslirúm*
*Starvsfólkarúm*
*Klárgera rúm til nýggjan køk*
*Nýggjur køkur*
*Hvítvørur til nýggjan køk*
*Barnagarður í verandi stovni*
*Flyta gardropuskáp*
*Nýggj gardropuskáp*
*Flyta vaskirennur*
*Nýggj w.c. kumma*
*Spanskveggir*
Tilhoyrandi timburarbeiði, el arbeiði, hvs arbeiði, málaraarbeiði.

| | | |
|---|---|---|
| Til samans uttan mvg. | 975.776,00 | u/mvg |
| Samlað fyri innandura og uttandura arbeiði u/mvg | 1.925.174,99 | u/mvg |
| Ókendar útreiðslur | 192.517,50 | u/mvg |
| Til samans uttan mvg | 2.117.692,49 | u/mvg |
| **Til samans við mvg (6,25%)** | **2.250.048,27** | **v/mvg** |

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at tikið verður undir við fyriliggjandi tilboðum, og at byggiarbeiðið verður sett í gongd eftir leisti, sum lýst omanfyri

- At játtaðar verða 2.251.000 kr. á Løgukonto L31011, Útbygging – Dagstovnurin á Hamrinum. Fíggjað av tøkum peningi frá 2024.
- at tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu fíggingini.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

**Mentamálanevndin 03. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum við tí nágreining, at fíggingin verður játtað av meirinntøkum fyri 2024.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Kári Johansen skjýtur upp at bjóða arbeiðið út.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Kára Johansen.

Fyri atkvøddu: Sunnuva Dahl Høgfeldt, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen, Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Í móti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk og Guttormur í Skála.

5 atkvøddu fyri og 8 atkvøddu ímóti málinum, sum sostatt fall.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Sunnuvá Dahl Høgfeldt.

Í móti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Málið varð sostatt samtykt við 11 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

**Ískoyti :**
**Parkeringsøki**
Upprunaliga var ætlað, at parkeringsøkið sunnanfyri Dagstovnin á Hamrinum skuldi verða boðið við verkætlanini Bónus og íbúðir á Hamrinum. Tilboðsveitarin á hesari verkætlan hevur boðað frá, at tey standa ikki við tilboð sítt. Hendan verkætlanin skal bjóðast út av nýggjum seinni. Parkeringsøkið er planerað og hevur verið nýtt sum skúrpláss og atkomu hjá Búsetur í byggitíðini í verkætlanini Dagstovnurin á Hamrinum. Nú sum Dagstovnurin á Hamrinum er um at vera liðugur, er neyðugt er at taka støðu til leist at gera eina fyribils loysn til parkeringsøkið sunnanfyri Dagstovnin á Hamrinum. Verkætlanin Dagstovnurin á Hamrinum má hava í minsta lagi 26 parkeringsbásar afturat, til tess at hava nøktandi parkerings- og somuleiðis atkomuviðurskifti.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við verandi arbeiðstakara, P/F Búsetur, at standa fyri arbeiðnum at gera eitt fyribils parkeringspláss. Talan er um eitt tilboð á fínplanering, asfaltering av berilagi á økið og fyrireika avvatning og uppstriking av parkeringsbásum. Av tí at tung ferðsla kemur at virka til eina komandi verkætlan á Bónus og íbúðir á Hamrinum - og harvið slíta hetta økið verður bíðað við at asfaltera ovara slitlagið til seinni.

Búsetur hevur veitt tilboð at gera hetta arbeiðið áljóðandi:

**1.042.348,50** u/mvg

Ì hesum kostnaði eru soljóðandi postar:

Klárgering av p-øki við 0-32 skervur t=50mm:
Asfaltering av p-øki við Ab16, t=50 mm:
Avvatning
Garður 40 m
Kantsteinar uml. 80 m

**Fjarhiti**
Í verkætlanini er ikki settur kostnaður av til fjarhita. Umsitingin hevur funnið ein leist at knýta fjarhitan í glyvursvegin. Umsitingin hevur fingið tilboð á fjarhita fingið tilboð á Grevstur og tyrving av fjarhita innføring frá glyvursvegnum til Dagstovnin á Hamrinum áljóðandi 149.480 u/mvg. Afturat hesum varð grivið frá fýrrúminum á nýggja Dagstovninum á Hamrinum og lagt fjarhitarør út í uttanumøki, soleiðis at kundi fáa ræsarúm at arbeiða. Avtalað er at Búsetur og TK deila kostnað 50/50 tí at byggskrá ikki fevndi um fjarhita, áljóðandi 29.328,00. Samlaður kostnaður á Fjarhita er áljóðandi:

149.480 u/mvg,
<u>29.328 u/mvg</u>
178.808 u/mvg

**Innbúgv**
Umsitingin hevur boðið út innbúgv til verkætlanina Dagstovnurin á Hamrinum.
3 tilboð komu inn:

| | |
|---|---|
| ELDING ELRISIN | 2.333.468,17 u/mvg. |
| INNVENTARTÆNASTAN | 1.760.014,40 u/mvg. |
| STOKHOLM | 1.617.197,12 u/mvg. |

Eftir sáttmálasamráðingar við vinnandi arbeiðstakara Stokholm vóru nakrar tillagingar gjørdar á verkætlanina. Endaliga tilboðið var áljóðandi: 1.695.815,92 u/mvg.

Ì útboðnum er somuleiðis øll leys útgerð, smá køksútgerð og allar smáar leikur íroknaðar. Hetta seinasta varð ikki við í upprunaligu kostnaðarmetingini. Settar vóru av 1.282.195,00. Munurin er sostatt 413.620,92 kr u/mvg, sum resta í.

**Ymiskt**
Ynski frá stovninum at fáa gjørt ymiskar tillagingar í verkætlanini Dagstovnurin á Hamrinum:

| | |
|---|---|
| KT Ùtgerð | 69.669,83 |
| Eyka leikur uttanumøki | 271.586,77 |

| | |
|---|---|
| Kurvar til garderobur | 11.340,00 |
| 6 Stk Quooker | 64.084,50 |
| Ymisk El eykaarbeiði | 87.985,52 |
| Samlað | 504.666,62 |

**Prís og lønarvøkstur**
Umsitingin hevur í sáttmálasamráðingum við Búsetur gjørt avtalu um, at Búsetur og Tórshavnar kommuna deila prís og lønarvøksturin í verkætlanini.

Ì heildararbeiðstakarasáttmála millum Tórshavnar kommuna og Búsetur stendur:
*Samlaða prísjavnanin frá 3. ársfjórðingi 2022 og frameftir, verður býtt við eini helvt til byggiharran, og eini helvt til arbeiðstakaran, bæði um javningin hevur við sær, at prísurin hækkar ella lækkar.*

Samlaða talið á prís og lønarvøkstur í verkætlanini er mett til áljóðandi 4.800.000 u/mvg. Hetta svarar til eina upphædd áljóðandi 2.400.000 u/mvg., sum Tòrshavnar kommuna skal gjalda í prís og lønarvøkstri í verkætlanini.

**Fígging**
Samlaði kostnaður á parkeringsøkið og prís og lønarvøkstur:

| | |
|---|---|
| Parkeringsøkið | 1.042.348,5 u/mvg |
| Fjarhiti | 178.808 u/mvg |
| Innbúgv – munur | 413.620,92 u/mvg. |
| Ymiskt | 504.666,62 u/mvg. |
| Prís og lønarvøkstur | 2.400.000 u/mvg |
| Samlað | 4.797.096 u/mvg |

Við 6,25% mvg er samlaði kostnaðurin at gera hetta arbeiðið:

4.823.159,29 v/mvg.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | LK57047 | FC Hoyvík Felagshús og skýli | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 3.000.000 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 1.050.000 |
| 2775 | L31020 | Tillagingar á dagstovnaøkin um | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 800.000 |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Umbiðið hesa ferð | Upphædd: | 4.850.000 mió |
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 76.008.550,94 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

Ì mun til verkætlanina Dagstovninum á Hamrinum mælir umsitingin til, at uttanhýsis frágreiðing verður gjørd av byggi prosessini og galdandi reglugerðum og mannagongdum í samband við bygging.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At tikið verður undir við fyriliggjandi kostnaðum og tilboðum, og at byggiarbeiðið verður sett í gongd eftir leisti, sum lýst omanfyri.
- At játtaðar verða 4.850.000 kr. til verkætlan L31011 á henda hátt:
    a. 3 mió. kr. verða játtaðar av Løgukarmi LK57047 FC Hoyvík Felagshús og skýli, undir konto 5775
    b. 1,05 mió. kr. verða játtaðar av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875
    c. 0,8 mió. kr. verða játtaðar av verkætlan L31020, Tillagingar á dagstovnaøkinum, undir konto 3175

- At umsitingin fær heimild at gera arbeiðssetning við uttanhýsis ráðgeva í samband við at gera eina frágreiðing í hesum málinum.

- At tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu fíggingini.

- At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 23. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, við tí broyting at fíggja verður við 1 mió. kr. av 3175 Dagstovna, frítíðarskúla og ungdómstilboð og 2 mió. kr. av 3175 Tillagingar á dagstovnaøkinum og 1 mió. kr. av Løgukarmi LK 57047 FC Hoyvík Felagshús og skýli, undir kontu 5775 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, samtykti at taka undir við mentamálanevndini, við tí broyting at

a. verður fíggjað við 1 mió. kr. av 2775 Eldradepilin í Kollafirði, 1 mió. kr. av kontu 3175 Tillagingar á dagstovnaøkinum, 1 mió kr. av kontu 6109 røkt av bygningum

b. 1,05 mió. kr. verða fíggjað av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875, men arbeiðið verður boðið út.

c. og 0,8 mió kr. av kontu 6275, LK62999  Fríðkan í býnum.

Útreiðslurnar nevndar a, b og c verða játtaðar aftur á kontu í sambandi við fíggjarætlan 2027.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen.

# 69/26 Umsókn frá Landsverk um undantak viðvíkjandi støðini á Sornfelli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.02.2026 | 58/26 | 25/11161-4 |
| 2 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 69/26 | 25/11161-4 |

**Upprunin til málið**
Landsverk ynskir undantøk viðvíkjandi støðini á Sornfelli.

**Lýsing av málinum**
Vísandi til § 8 í byggilógini heitir Landsverk á Tórshavnar kommunu um at senda umsókn til Føroya Landstýri. Brot úr umbønini frá Landsverki:

> "Støðin á Sornfelli hevur sína serligu støðu sum hernaðarstøð frá sekstiárunum hjá donsku verjuni. Frá 2014 kom støðin undir føroyskt ræði hjá Føroya landsstýri og er umsitin av Landsverki. Hesi árini hevur staðið ein sivilur loftferðslueftirlitsradari á fjallinum, umframt ein røð av aðrari útgerð. Nú er ætlanin sbrt. avtalu millum landstýrið og donsku stjórnina, at har aftur skal vera hernaðarvirksemi við radara og inniber tað at tað koma at vera økir og hølir sum eru trygdarflokkaði í mun til loynd og har tað vera tikin stig viðv. fysiskari innrætting og verju av ymiskum slagi til at verja útgerð, samskifti v.m. Hvussu hetta verður gjørt er ætlað at vera undir strangari loynd.
>
> Landsverk kemur framhaldandi at vera rakstrarharri av støðini sum heild, meðan danska verjan kemur sbrt. sáttmála at hava ræði á pørtum av støðini og aðrir partar av støðini koma skipanirnar hjá verjuni og fregnartænastunum og herundir trygdargóðkenning. Talan er um viðurskifti, ið hava við ríkisins trygd og verju at gera og sum ikki mugu gerast atkomulig fyri óviðkomandi og eiheldur t.d. gjøgnum kommunalu málsviðgerðarskipanartilgongdina.
>
> Landsverk vil tí søkja um at Tórshavnar kommuna søkir landsstýrið (Uttanríkis- og mentamálaráðið), ið varðar av byggilógini um undantak sbrt. § 8 viðv. støðini á Sornfelli."

Landsverk hevur sent korttilfar(viðfest), sum nágreinar landafrøðiligu avmarkingina. Harumframt hevur Landsverk nágreina, at talan í fyrstu syftu er um eitt 5 ára tíðarskeið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
§ 8 í Løgtingslóg nr. 60 frá 15. mai 2012 um at byggja bygningar o.a., við seinni broytingum (byggilógin) er soljóðandi:

> " **§ 8.** Kommunali byggimyndugleikin kann við góðkenning frá landsstýrismanninum í ávísum førum gera frávik frá ásetingunum í hesi lóg og ásetingum, ásettar við heimild í hesi lóg."

Serligu viðmerkingarnar til ásetingina eru soljóðandi:

> "Kommunali byggimyndugleikin kann við góðkenning frá landsstýrismanninum heimila frávik. Fráviksheimildin er ikki algongd, tí heimildin kann bara nýtast í ávísum førum. Sum dømi um "í ávísum førum" kann nevnast frávik frá regluverkinum, tá talan er um at umvæla friðaðar bygningar. Kommunali byggimyndugleikin hevur við heimild í § 8 møguleika at geva frávik, um mett verður, at ásetingar í hesi lóg, ella ásetingar í kunngerðum, sum eru settar í gildi við heimild í hesi lóg, ganga ímóti endamálinum við friðingini. Eisini kann frávik gerast, um serligar umstøður tala fyri hesum. Sum dømi um serligar umstøður kann nevnast, tá tað grundað á lendisatlit verður mælt til at geva frávik frá nýtslustigi í ávísari útstykking.
>
> Ásetingin tryggjar eisini, at byggilógin ikki máar grundarlagið undan aðrari lóggávu sum t.d. fornminnalógini. Ætlanin við byggilógini er ikki at gera seg inn á galdandi rættarstøðu hjá friðaðum

ella varðveitingarverdum bygningum. Tílíkir bygningar vera framvegis friðaðir og varðveittir í samsvari við galdandi lóggávu um friðing og varðveiting.

Frávik frá ásetingum, ásettar í ella við heimild í hesi lóg, frítekur ikki skyldu borgarans at søkja um møgulig onnur frávik, sum søkjast skal um sambært ásetingum í góðkendari byggisamtykt, tá farið verður undir at byggja, umvæla, o.s.fr.”

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ásetingar um bygging eru eisini ásettar aðrastaðni enn einans í byggilógini. Í høvuðsheitum eru tveir geirar:

- Løgtingslóg um at byggja bygningar o.a. (byggilógin), og ásetingar heimilaðar í byggilógini m.a. bygningskunngerðin
- Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir (býarskipanarlógin) og byggisamtyktir ásettar við heimild í býarskipanarlógini; umframt reglugerðir ásettar við heimild í byggisamtyktum.

Byggilógin
§ 8 í byggilógini fevnir um møguleikan hjá kommununi at geva frávik frá byggilógini og ásetingum heimilaðar í byggilógini, tá kommunan tekur avgerð sambært lógini. Tað vil siga, at kommunan í einum t.d. byggiloyvi kann játta ymsar lættar.

Býarskipanarlógin
Í verandi støðu er eingin ítøkilig undantøkuheimlid í býarskipanarlógini. Ei heldur eru atlit tikin til undantøk til trygd landsins í galdandi byggisamtykt í økinum kring støðina á Sornfelli. Økið er í løtuni fevnt av 4. grundumráði sambært Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Økið er lagt av til landbúnað og alment frílendi.

Kap I, § 8 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er soljóðandi:

“**1** Byggivaldið kann, har tað er torført at halda ásetingarnar í hesi byggisamtykt, og har tað snýr seg um mál av lítlum týdningi, geva lættar viðvíkjandi ásetingunum í hesari byggisamtykt.

**2** Áðrenn lættar verða givnir, skulu boð sendast grannanum skrivliga, og skulu teir hava høvi til at kanna umsóknina í minsta lagi í tvær vikur frá tí teir hava fingið boðini. Møguligar viðmerkingar frá grannum eru vegleiðandi.”

Uttan at nágreina virksemi á Sornfellisstøðini nærri verður virksemið á Sornfellisstøðini sum heild ikki mett at vera landbúnaður, alment frílendi ella annað, sum er at sammeta við slíkt virksemi. Verður neyðugt at søkja um byggiloyvi til ymsar broytingar, verður talan væntandi um eitt lutfalsliga stórt frávik frá byggisamtyktini. Talan er sostatt væntandi ikki um “mál av lítlum týdningi”, sum byggisamtyktin heimilar frávik til.

Sjálvt um byggisamtyktin verður dagførd, so broytir ein tílíkur fráviksmøguleiki ikki myndugleikaábyrgd kommununnar. Kommunan verður sostatt framvegis avvarðandi byggimyndugleiki, við teimum ábyrgdum sum fylgja við eins og í støðuni viðvíkjandi § 8 í byggilógini, sum umrøtt omanfyri.

Ein broyting av byggisamtykt verður mett at taka umleið líka langa tíð sum broyting av eini løgtingslóg. Í staðin fyri at fara undir eina tilgongd at gera eina fyribils loysn í at broyta byggisamtyktina, mælir kommunan til, at avbjóðingin í staðin verður loyst við eini broyting í býarskipanarlógini.

Uppskot til varðandi heildarloysn
Tað er av avgerðandi týdningi at frá greidleika um, ikki bara um hvørt Landsverk skal verða undantikið ymsum skyldum; men eisini at fáa greidleika á vavinum á kommununnar myndugleikaábyrgd.

Vísandi til omanfyristandandi mælir umsitingin til, at heitt verður á landsstýrismannin um skjótast gjørligt at seta í verk nýtt lógararbeiði til eina yvirskipaða undantøkuheimild fyri bygging og býarskipan viðvíkjandi trygd landsins, sum eisini tekur atlit til myndugleikaábyrgd kommununnar í slíkum førum.

Talan kann t.d. vera at broyta í verandi lóggávu, ella at gera eina serstaka løgtingslóg fyri ávísa bygging og býarskipan, sum gevur kommunum heimild at søkja um góðkenning frá landsstýrismanninum til, at ein landsmyndugleiki varðar av kommunalu uppgávunum sambært byggi- og býarskipanarlógunum, tá talan er um ávísar bygningar.

Umframt í byggilógini og býarskipanarlógini, kann tørvur verða á broytingum í aðrari lóggávu viðkomandi fyri bygging, leiðingar osfr., herundir m.a. løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing við seinni broytingum í mun til bygging uttangarðs.

Samanumtikið
Vísandi til at talan er um tungtvigandi atlit til trygd landsins, verður tað mett skilabest at finna eina stigvísa loysn í tøttum samstarvi við landsmyndugleikan. Tað vil siga, at í fyrstu atløgu verður søkt um eitt § 8-frávik sambært byggilógini, samstundis sum arbeitt verður við eini varðandi heildarloysn.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
25/11161-1 Umsókn frá Landsverk
25/11161-4 Nágreinan av umsókn frá landsverk (kort og tíðarbil)

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og deildarleiðarin á byggimálsdeildini mæla til, at:

- Umsókn verður send Føroya Landstýri sambært § 8 í byggilógini samsvarandi við umbønina frá Landsverk.
- Umsitingin fer í samskifti við landsmyndugleikan um neyvu møguleikarnir at fáa ynskta undantakið til vega, herundir at tryggja greidleika um kommununnar myndugleikaábyrgd í sambandi við eitt undantak.
- Heimila borgarstjóranum at góðkenna møguligar minni broytingar, sum koma undan kavi í komandi málsgongdini, t.d. minni broytingar í korttilfarinum og ynskta undantakstíðarskeiðnum.
- Beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. februar 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur støðu, tá málið kemur fyri býráðið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at minnilutin er umboðandi í arbeiðnum.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fimm atkvøðum fyri, sjey atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddi: Heðin Mortensen.

Síðani var atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen,

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:55**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heðin Mortensen | Heidi Lava Elgeirsdóttir |
| Annita á Fríðriksmørk | Anja Weyhe | Kristianna Winther Poulsen |
| Bergur Robert Dam Jensen | Guttormur í Skála | Annfinn Brekkstein |
| Tróndur Sigurðsson | Kári Johansen | Høgni Vilhelmsen |
| | Birgir Nielsen | |